# GERÐABÓK

**Dato:** 25. juni 2020 **Kl**. 18:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 131/20 – 160/20**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Sigrun Wardum luttók í málunum 49, 150 og 159

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 592<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 131/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 594 |
| 132/20 | 20/00866-4 | Umsókn frá Articon um at víðka leiguøkið á Sundi | 596 |
| 133/20 | 20/01329-2 | Landstreymur á Vestaru Bryggju | 599 |
| 134/20 | 19/00034-10 | Matr. nr. 255eb, Kirkjubøur, Argir. Keyparar ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa. | 601 |
| 135/20 | 20/01020-1 | Søla av tveimum grundstykkjum í útstykkingini í Hamrabøi, matr. nr. 91m og 91x, Kollafirði | 603 |
| 136/20 | 20/02089-3 | Viðtøkur fyri Eigarafelagið við Klingurstjørn. | 604 |
| 137/20 | 19/00059-10 | Matr.nr. 255cv, Kirkjubøur,Argir. | 607 |
| 138/20 | 20/01536-2 | Ólavsøkan 2020 | 609 |
| 139/20 | 17/02942-1 | Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 612 |
| 140/20 | 18/00057-2 | Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri | 619 |
| 141/20 | 19/00412-1 | Útboð av útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, Argir | 624 |
| 142/20 | 20/02110-1 | Rætta fíggjarætlan hjá trimum stovnum í sambandi við serstovur | 628 |
| 143/20 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 631 |
| 144/20 | 19/00423-2 | Venjingarhøli í Kollafirði | 642 |
| 145/20 | 20/01962-1 | Verkløg við Hoyvíksvøll | 647 |
| 146/20 | 17/03897-1 | Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum | 651 |
| 147/20 | 16/00460-5 | Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingadalsvegin 2. stig (2013-2048) | 663 |
| 148/20 | 18/01471-2 | Umsókn um keyp av uppískoytisstykki av matr. nr. 3a til matr. nr. 1oe, Hoyvík | 667 |
| 149/20 | 19/00411-1 | Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat | 670 |
| 150/20 | 20/01272-1 | Skógfriðing av øki fram við Hoydalsá ísv makaskifti við Búnaðarstovuna | 674 |
| 151/20 | 20/02251-1 | Gøtan út á Hvítasand á Boðanesgjógv | 677 |
| 152/20 | 18/00808-1 | Vágsbotnur - skipan av økinum | 679 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 154/20 | 17/01822-1 | Útstykking Stórabrekka | 691 |
| 155/20 | 20/02249-2 | Nýggj umsókn um broyting av byggisamtykt til útstykking á matr. nr 83a, Hvítanes | 697 |
| 156/20 | 20/00758-1 | Uttanhýsis kanning av framtíðar tørvi á brennistøð | 699 |
| 157/20 | 17/02748-1 | Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir | 701 |
| 158/20 | 19/01969-1 | Tøkir skúlabygningar 2019-2020 | 706 |
| 159/20 | 20/01383-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2019 | 723 |
| 160/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 726 |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 594<br><br>Formansins merki: |

**Til viðgerðar**

## 131/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 87/20 | 20/00205-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 131/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 595 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

## 132/20 Umsókn frá Articon um at víðka leiguøkið á Sundi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 28/20 | 20/00866-4 |
| 2 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 50/20 | 20/00866-4 |
| 3 Vinnunevndin | 28.04.2020 | 39/20 | 20/00866-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 112/20 | 20/00866-4 |
| 5 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 89/20 | 20/00866-4 |
| 6 Vinnunevndin | 08.06.2020 | 50/20 | 20/00866-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 151/20 | 20/00866-4 |
| 8 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 132/20 | 20/00866-4 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Articon um at leiga 3.800 ferm á havnarlagnum á Sundi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Articon ætlar at uppseta 10 sementsiloir á økinum, sum teir nú leiga til goymslu av sandi og skervi, er ynski um at víðka um tað leigaða økið við 3.800 $m^2$.

Økið talan er um, er tann eystasti parturin av verandi øki á Sundi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er í byggisamtyktini ásett sum eitt B1 øki, í *sum heild verður lagdur av til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Líka síðani byrjan hevur sjálv bryggjan verið brúkt til bulkvørur, t.e. sandur, skervur og skrott, umframt at onnur skip.
Í 2014 var leiguavtala gjørd við Articon um leigu av 4.000 $m^2$.
Tann 30. oktober 2014 samtykti býráðið at gera ein 25 ára leigusáttmála við P/F Articon, og leigumálið varð víðkað til 10.000 $m^2$ av økinum.
Tann 19 apríl 2016 samtykti býráðið at gera eitt ískoyti til leigusáttmálan, har leigumálið varð víðkað til 12.000 $m^2$.
Um leiguavtala verður gjørd við Articon um økið, er ikki pláss til fleiri leigarar á tí økinum, og tann samlaða víddin, sum verður leigað til Articon, er 15.800 $m^2$.

Articon hevur brúkt tveir bygningar á økinum, annar verður brúktur sum goymsla, meðan hin verður brúktur til framleiðslu av elementum og rúmmodulum til bústaðarbygging.

Uppseting av sementsiloum hóskar væl til tað virksemið, sum er á økinum, og til galdandi byggisamtykt.

Fyri at tryggja, at iløgurnar í havnaløgum verða afturgoldnar av brúkarunum, verður arbeitt við at gera nýggjar leiðreglur um áseting av leigukostnaði.
Hesar leiðreglur verða galdandi fyri øll leigumál av grundøkjum á havnarlagnum, og tí er rættast at boða umsøkjaranum frá, at nýggjar leiðreglur fara at koma.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 597 |
| | Formansins merki: |

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við ískoyti til leigusáttmála j.nr. 20/00866-8.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Jákup Dam og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mælir til at bjóða økið alment út.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í telduposti hin 17. apríl 2020 boðar Articon frá, at tey ikki halda tað verða rímiligt, at broyta treytirnar fyri leigusáttmálan nú ið økið skal víðkast, og Articon hevur munnliga boðað frá, at tey ikki vilja skriva undir ískoyti. Articon sipar til fylgjandi áseting í § 2 í ískoytinum:

*"Nýggjar leiðreglur til áseting av leigukostnaði fyri fyritøkur á havnarøkið fara at koma. Broytingarnar fara at snúgva seg um umferðarábyrgd (omsætningsgaranti). Nýggju leiðreglurnar um áseting av leigukostnaði verða tá galdandi fyri fyriliggjandi leigumál og skulu hesar fráboðast leigarunum seks mánaðir, áðrenn tær fáa gildi."*

Articon vísir á, at í høvuðssáttmálanum eru gjaldstreytir ásettar, og um nakað skal broytast, eigur tað at verða gjørt mótvegis øllum leigarum samstundis, og ikki ein og ein sáttmála, tá ið ein broyting í sáttmálanum verður gjørd.

Havnameistarin vísir á, at ásetingin skal skiljast sum ein kunning um, at arbeitt verður við nýggjum leiðreglum fyri ásetan av leigugjøldum, og at ásetingin tískil ikki er ein broyting av verandi treytum. Nýggjar treytir skulu fráboðast leigarum við 6 mánaða freist.
Havnameistarin metir, at tað nettupp er neyðugt at kunna um hetta nú, ið nýggjur sáttmáli (ískoyti) verður gjørdur stutt frammanundan eini møguligari broyting í treytunum. Verður hinvegin ikki kunnað um hetta, kann leigarin framføra, at útleigarin ikki hevur kunnað um komandi broyting, hóast útleigarin visti um hesa, og harvið kann tað verða torførari at fremja broytingina.

**Tilmæli:**
[illegible]

**Vinnunevndin 28. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Boga Andreasen at beina málið aftur í vinnunevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Vinnunevndin 08. juni 2020:** Samtykt at taka undir við ískoyti til leigusáttmála j.nr. 20/00866-8, tó verður orðingin í § 2 í ískoytinum strikað og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

## 133/20 Landstreymur á Vestaru Bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 28.04.2020 | 38/20 | 20/01329-2 |
| 2 Vinnunevndin | 08.06.2020 | 49/20 | 20/01329-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 152/20 | 20/01329-2 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 133/20 | 20/01329-2 |

**Málslýsing:**
Landstreymsskipanin á Vestaru bryggju treingir til at verða endurnýggjað og viðkað. Eftirspurningurin eftir landstreymi við vestaru bryggju er rímiligur, og fleiri av skipunum taka vanliga landstreym. Mett verður, at tað hevði borið til at fingið enn fleiri skip at taka landstreym, um skipanin var endurnýggjað, nútímansgjørd og víðkað, og harvið gjørd til meiri brúkaravinarlig og attraktiv.

Í dag ber til at veita 63 Ampere í 3 støðum, og 125 Ampere í einum staði. Við landingarmiðstøðina Barðið liggja skip javnan og landa, men har er einki streymúttak nærhendis, tí hevði verið ynskiligt at víðka skipanina har til at kunna veitt landstreym har eisini.

Við verandi skipan er torført (í summum førum ógjørligt) at máta og halda skil á nýtsluna av landstreymi, og serliga, um fleiri skip taka streym samstundis. Ynskiligt hevði tí verið við eini meiri nýmótans skipan, sum mátar og avroknar nýtsluna sjálvvirkandi og so hvørt nýtslan fer fram, og sum forðar fyri óheimilaðari nýtslu.

Tað er torført at gera eina kostnaðarmeting av hesum arbeiðið, áðrenn arbeiðið verður boðið út, tí vanliga er tað el-innleggjarar sjálvir, ið projektera tílíkar innleggingar sambært galdandi myndugleikakrøvum, og sum kenna kostnaðin av el-útbúnaðinum frá veitarum og framleiðarum. Tískil er frægasti háttur at finna fram til kostnaðin at biðja um tilboð frá veitarum við grundarlagi í útbjóðingarskrivi, ið so neyvt sum gjørligt lýsir krøv og ynskir til skipanina.

Tórshavnar Havn hevur fyrireikað útbjóðingarskriv (j.nr. 20/01329-1), ið er næstan liðugt og klárt at bjóða út.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til, at biðja um undirhondstilboð frá teimum báðum el-installatørunum, ið Tórshavnar Havn vanliga nýtir til tílíkar uppgávur (LM electric og Install) sambært útbjóðingarskrivi (j.nr. 20/01329-1), og at tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur til støðutakan.

Vinnunevndin 28. apríl 2020: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tilmæli kemur til fundin í vinnunevndini 8. juni 2020

**Ískoyti:**
Tilboð uppá dagføring av landstreymsskipan á Vestaru Bryggju eru komin frá Install (J.nr. 20/01329-7) og LM electric (J.nr. 20/01329-10). Tilboðini eru nærri viðgjørd í notati, j.nr. 20/01329-11. Niðurstøðan er, at tilboðið frá Install er betri.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka av tilboðnum frá Install upp á dagføring av landstreymsskipan sambært uppseting í notati (j.nr. 20/01329-11), áljóðandi kr. 525.252,- og at játta kr. 600.000 til arbeiðið av

**Vinnunevndin 08. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 601<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 134/20 Matr. nr. 255eb, Kirkjubøur, Argir. Keyparar ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 157/20 | 19/00034-10 |
| 2 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 134/20 | 19/00034-10 |

**Upprunin til málið:** Eigarar lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Matr.nr. 255eb, Kirkjubøur/Argir. Vìdd 404m2. Grundstykkið er planerað.
Keypsprísur kr. 688.820,00

Eigarar ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

Keypspeningurin er goldin kommununi, og er endaligt skeytið undirskrivað, men enn ikki tinglýst.

Eigarar greiða frá, at sum støðan er í løtuni, er sera trupult at fáa sáttmála um bygging av sethúsum. Bíðitíðin er í øllum førum 2 ár ella longri, og er byggikostnaðurin sera høgur.

Tey hava tí slept ætlanum um at byggja, og vilja royna at keypa eini sethús í staðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kort.Skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið innaftur. Í fyrsta lagi verður stykkið bjóða møguligum umsøkjarum við serligum tørvi, og í øðrum lagi verður stykkið lutað út millum teir umsøkjarar sum við seinastu útlutan av grundstykkjum í útstykkingini Klingurstjørn 2, ikki fingu tillutað grundstykki.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

# 135/20 Søla av tveimum grundstykkjum í útstykkingini í Hamrabøi, matr. nr. 91m og 91x, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 71/20 | 20/01020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 65/20 | 20/01020-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 155/20 | 20/01020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 135/20 | 20/01020-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Kommunan eigur tvey grundstykkir í útstykkingini á Hamrabøi, Kollafjørður.

Talan er matrikklarnar
91 m søluprísur kr. 264.145,62
91 x søluprísur kr. 239.779,18

Snarskivan hevur í tveimum umførum útlutað stykkir í útstykkingini so hvørt sum grundstykkir eru komin innaftur.

Hetta varð gjørt á tann hátt, at tey sum ikki fingu tillutað grundstykkir í fyrsta umfari, fingu møguleika til at verða við í nýggjari útlutan.

Øll sum teknaðu seg til upprunaligu útlutanina, hava fingið grundstykkið í boðið.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin**.** Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 604<br>Formansins merki: |

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkini í fríðari sølu til ásettan minstaprís.

matr.nr. 91m minstiprísur kr. 264.145,62
matr.nr. 91 x minstiprísur kr. 239.779,18

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

Ískoyti:

Viðv. Matr.nr. 91m, Kollafjørður. Minsti prísur kr. 264.145,62
Grundstykkið hevur verið á sølulista hjá BetriHeim. Innkomið boð kr. 340.000,00 og kom onki mótboð innan freist.

Viðv. Matr.nr. 91 x, Kollafjørður. Minsti prísur kr. 239.779,18
Grundstykkið hevur verið á sølulista hjá Betri Heim. Innkomið boð kr. 430.000,00 sum gongur út 10.06.2020

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkini fyri innkomin boð.

Matr. Nr. 91m, Kollafjørður fyri kr. 340.000,00 og matr.nr. 91x, Kollafjørður fyri kr. 430.000,00

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 605 | |
| | Formansins merki: | |

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 158/20 | 20/02089-3 |
| 2 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 136/20 | 20/02089-3 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Eigarafelagið við Klingurstjørn, hevur sent kommununi viðtøkur fyri eigarafelagið til góðkenningar.

Sambært grein 4 í skeytunum framgongur.

Keyparin er skyldugur at vera limur í Eigarafelagnum, har allir grundeigarar í útstykkingarætlanini skulu vera limir. Felagið skipar seg sjálvt, men skulu viðtøkurnar góðkennast av býráðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 606 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at góðkenna viðtøkurnar fyri eigarafelagið við Klingurstjørn.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

# 137/20 Matr.nr. 255cv, Kirkjubøur,Argir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 185/20 | 19/00059-10 |
| 2 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 137/20 | 19/00059-10 |

**Upprunin til málið:** Eigarar hava keypt sethús, og heita á kommununa um, at taka grundstykkið matr.nr. 255cv, Kirkjubøur, Argir innaftur.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Viðv. matr.nr. 255cv, Kirkjubøur,Argir. Útstykking Klingurstjørn 2.
Vídd 400m2. Keypsprísur kr. 690.595,00

Sambært skeytinum, verður kommunan hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í samband við møguligari afturskeyting til kommununa.

Keyparin hevur goldið kommununi kr. 698.430,25 ( Keypspeningur kr. 690.595,00 + tinglýsing kr. 7.905,25 )
Kommunan lat skeytið inn til tinglýsing, men eydnaðist at afturkallað skeytið, og fær kommunan tá afturflutt frá tinglýsingini kr. 6.905,25 ( Tá frátrekt kr. 1.000,00 til tinglýsing )

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini, mæla til at taka stykkið innaftur, og at endur rinda keypara kr. 697.430,25

Stykkið verður síðani boðið teimum til keyps sum standa skrásett á bíðilista til grundstykkið sambært reglugerð, vegna serligan tørv. Í øðrum lagi, verður stykkið bjóðað teimum, sum ikki fingu stykkið tillutað í útstykkingini Klingurstjørn 2.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

## 138/20 Ólavsøkan 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.05.2020 | 141/20 | 20/01536-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 112/20 | 20/01536-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 138/20 | 20/01536-2 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 130/20 | 20/01536-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 193/20 | 20/01536-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við, at korona hevur rakt alheimssamfelagið og Føroyar eru tilmælini frá landinum, at í mesta lagi 100 fólk savnast – við frástøðu. Í sambandi við Ólavsøkuna viðførir hetta avbjóðingar og at vit mugu savnast á annan hátt.

Kommunan ynskir eina so vanliga Ólavsøka sum gjørligt, men vil royna at fáa fólk til at halda Òlavsøku við frástøðu. Ein arbeiðsbólkur er settur at koma við uppskoti til, hvussu hetta kann gerast.

**Ólavsøka í grannaløgum**
Mælt verður til at heita á eigarafeløg og býarpartar um at skipa fyri Ólavsøku í sínum øki. Fyri at eggja teimum til, og fáa tað hugnaligt kring býin, verður skotið upp, at hvørt eigarafelag/býarpartur fær møguleika til at vísa á eitt øki, har tey vilja skipa fyri tiltøkum og søkja um stuðul uppá kr. 10.000 til at leiga tjald, anlegg, grill, bonkar og borð ella annað, tey halda, er neyðugt.

Eigarafeløgini/grannaløgini hava ábyrgdina av sínum tiltaki, og feløgini rudda sjálvi uppeftir sær, men mett verður, at kommunan eisini má rudda upp eftirfylgjandi.

Henda ætlan verður bara tikin í nýtslu, um korona tiltøkini enn eru í gildi, tá ið Ólavsøkan verður hildin.

**Tórhavnar Ítrottarráð**
Tórshavnar Ítrottarráð hevur vanliga tivoli á Skálatrøð.
Fyri at ov nógv fólk ikki skulu fara í býin, verður ikki mett ráðiligt at hava tivoli í ár. Tey missa umleið kr. 500.000 við ikki at kunna selja armbond. Tað er ein stórur missur fyri feløgini. Tí kundi tað verið ein møguleiki, at feløgini fáa aðrar uppgávur í sambandi við Ólavsøkuna og eina samsýning frá kommununi fyri hetta. Hetta kundi til dømis verið at hjálpt eigarafeløgum/grannaløgum at skipa fyri Ólavsøkuni. Um feløgini t.d fáa 20.000 kr. hvør, verður tað ein meirútreiðslu uppá umleið 115.000 kr. meira enn í 2019.

Í 2019 fingu feløgini stuðul á kr. 185.000 til at skipa fyri Tivoli við meira. Tilsamans verður stuðulin til feløgini í 2020 kr. 300.000. Feløgini koma at arbeiða fyri hetta.
**Eyka kostnaður:**
Kommunan brúkar vanliga umleið kr. 800.000 kr. av konto 5310 Mentanartiltøk til útreiðslur í sambandi við Ólavsøkuna. Hetta verður millum annað brúkt uppá trygd, Tórspall, lýsingar, pynta býin. Afturat hesum brúkar reinhaldið uml. 400.000 kr. at halda býin reinan.

Av tí, at býurin framvegis skal pyntast, og ætlanin er at hava konsertir, sum verða varpaðar út, verður ikki mett, at nógv kann sparast her.

Roknað verður við, at ein øðrvísi Ólavsøka verður nakað dýrari:
Um t.d. 50 eigarafeløg/grannaløg skulu hava møguleika fyri at søkja um stuðul uppá 10.000 kr., verður

| | |
|---|---|
| Samsýning Ítróttarfeløg | 115.000 |
| Ólavsøkustuðul | 500.000 |
| Rudding & rusk | 400.000 |
| Undirhald vm. | 100.000 |
| | |
| Tilsamans | 1.115.000 |

Hetta kann fíggjast soleiðis:
Kr. 400.000 av konto 5310 Mentanartiltøk við at tað eru færri tiltøk í 2020 enn vanligt
Kr. 100.000 av konto 5361 Millumtjóðagrunnar við at grunnurin møttist umvegis Teams
Kr. 400.000 av konto 1310 Býráðsskrivstovan við at spara eitt starv og
Kr. 100.000 av konto 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið
kr. 115.000 av konto 5366 Stuðul annars.
Tilsamans kr. 1.115.000

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni, kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla Býráðnum umvegis fíggjarnevndina til, at fyrireika eina øðrvísi ólavsøku soleiðis sum víst á omanfyri og fíggja hetta við at flyta kr. 100.000 av konto 5361 Millumtjóðagrunnar, kr. 400.000 av konto 1310 Býráðsskrivstovan, kr. 100.000 av konto 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið og kr. 115.000 av konto 5366 Stuðul annars til konto 5310 Mentanartiltøk, tilsamans kr. 715.000.

Restin á kr. 400.000 verður fíggjað av konto 5310 Mentanartiltøk, sum víst á omanfyri.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Anniku Olsen at játta kr. 715.000 kr. sambært tilmælinum umframt 400.000, ið verður fíggjað av konto 5310 Mentanartiltøk og taka støðu til innihaldið á Ólavsøkuni á seinni býráðsfundi.

Broytingaruppskotið einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til reglugerð í mun til at grannaløg/eigarafeløg kunnu søkja um stuðul at brúka í sambandi við ólavsøkuna í grannaløgunum. Umsóknarfreistin er 12. juli 2020.

Mælt verður til, at tað verður fíggjað, sum víst er á í tilmælinum til býráðsfundin 28. mai 2020, men við fylgjandi broyting:

Kr. 100.000 verður ikki fíggjað av konto 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, men í staðin verður mælt til at fíggja eykakostnaðin við kr. 100.000 av konto 7312 Vinnutiltøk.

**Skjøl:**
Reglugerð

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni, kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla Býráðnum umvegis fíggjarnevndina til:

1. at samtykkja reglugerðina um stuðul og
2. at fíggja eykakostnaðin sum í upprunaliga uppskotinum, men við fylgjandi broyting: Kr. 100.000 verður ikki fíggjað av konto 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, men í staðin verður mælt til at fíggja eykakostnaðin við kr.100.000 av konto 7312 Vinnutiltøk.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Turið Horn, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Kunnað varð um málið. ið eisini kemur fyri á opnum býráðsfundi 25. juni 2020.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Heðini Mortensen um, at man tekur undir við tilmælinum hjá meirilutanum í fíggjarnevndini og burtur av játtanini til ólavsøkuna eisini kann játta stovnunum á eldraøkinum stuðult til at halda ólavsøku fyri.

Uppskotið samtykt við 8 atkvøðum fyri, fýra blonkum og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

## 139/20 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.09.2017 | 16/17 | 17/02942-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 196/17 | 17/02942-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 206/17 | 17/02942-1 |
| 4 Eldranevndin | 15.01.2018 | 39/18 | 17/02942-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 11/18 | 17/02942-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 15/18 | 17/02942-1 |
| 7 Eldranevndin | 21.08.2018 | 7/18 | 17/02942-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 231/18 | 17/02942-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 187/18 | 17/02942-1 |
| 10 Eldranevndin | 09.10.2018 | 14/18 | 17/02942-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 290/18 | 17/02942-1 |
| 12 Eldranevndin | 26.11.2018 | 17/18 | 17/02942-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 331/18 | 17/02942-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 269/18 | 17/02942-1 |
| 15 Eldranevndin | 15.06.2020 | 4/20 | 17/02942-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 165/20 | 17/02942-1 |
| 17 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 139/20 | 17/02942-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 195/20 | 17/02942-1 |

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

<u>Demensdepil</u>
Í løtuni eru 10 búpláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa

vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl lættari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

Tilgongd víðari
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18
- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið um ráðgevarasáttmála um prosjektering. Samlaður kostnaður fyri prosjekteringsleiðslu, prosjektering, byggileiðslu og fakeftirlit er kr. 3.100.000.

Á løgukontuni L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði, eru tøkar kr. 1 mió. Játtast kunnu 2,1 mió av tøka løguarminum 2775 Eldrarøkt L00001.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at játta kr. 2,1 mió av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði.

**Eldranevndin 15. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í samband við umbygging av Tjarnargarði eru komin fram viðurskifti sum gera at kostnaðarmetingin hækkar.

Stórt ynski hevur í nógv ár verið um at byggja báðar bygningarnar saman við einum glasmillumbygningi. Við at binda bygningarnar saman kann fáast meira skynsamur rakstur tí til ber hjá starvsfólkinum at ganga inni tí bygningurin er sum ein. Mett verður at glas millumbygningur kostar 315.500 kr. at gera.

Búfólkini á Tjarnargarði fáa mat av Lágargarði, av tí at køksviðurskiftini á Tjarnargarði ikki loyva at matur í stórum mongdum verður gjørdur á staðnum. Hetta passar illa við hugburðin um at røktarheimini í Tórshavnar kommunu skulu vera heimlig. Køkur skal gerast á Tjarnargarði í samband við umbyggingina.

at gera køkin til stórkøk og sær hetta út til at bera til. Meirkostnaðurin fyri at gera køkin til stórkøk sum kann gera allan matin á staðnum er 350.000 kr.

Dagtilhaldi skal flytast uppá lofti. Starvsfólkini hava viðmerkt at hetta kann verða óheppi í mun til at trupult verður hjá borgarunum at fara út um sjálvir. Starvsfólkini meta at um ein altan er í samband við dagtilhaldi kunnu borgararnir sjálvir fara at fáa sær fríska luft og vildi tað avgjørt veri ein góð loysn. Byggideildin metir somuleiðis at ein altan út frá dagtilhaldinum, er ein góð loysn, eisini í mun til brandtrygd. Meirkostnaður fyri at gera altan er 250.000 kr.

Mett verður at kostnaður fyri eyka projektering av omanfyri nevnda er 100.000 kr.

Omanfyri nevnda eru stórar betranir av umbyggingini og av bygninginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin gav ikki loyvi at gera rúmini til umlætting soleiðis sum upprunaliga ætla, tí mett var at tey vóru ov lítil og at tað ikki var wc/baðirúm til hvør kamar. Í tilmælinum hjá virkandi tekniska stjóra og virkandi leiðara á byggideildini verður tilmælt at geva byggiloyvi við teirri treyt, at verkætlanin verður endurskoða og dagførd samsvarandi dagsins normum fyri innrætting av slíkum stovnum og annars við teimum treytum sum umsitingin setur. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 18 juni 2018 at taka undir við tilmælinum.

Hetta er tikið til eftirtektar og nýtt uppskot er gjørt sum tryggjar baðirúm/wc til hvørt kamar, umframt at hvørt kamar nú er størri enn upprunaliga ætla.
Henda broyting hevur við sær, at umframt at flyta okkurt starvsfólkarúm uppá so er tali av nýggjum búrúmum nú 7 og ikki 8 sum upprunaliga ætla.

Hinvegin so eru rúmini størri og tað vera gjørd baðirúm/wc til hvørt rúm, sum sjálvandi er ein betran í mun til at tvey búrúm deila baðirúm/wc.

Fyri at gera búrúm størri og gera baðirúm/wc til hvør kamar metir TK at meirkostnaðurin er 350.000 kr. (kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

Meirkostnaður í sambandi við umbygging av Tjarnargarði er sostatt mettur at verða:

| | |
|---|---|
| Glas millumbygningur | 315.500,00 |
| Stór køkur | 350.000,00 |
| Altan | 250.000,00 |
| Eyka projektering, fyri omanfyri nevnda | 100.000,00 |
| Størri búrúm (serliga er tað baðirúm sum skapa meirkostna) | |

350.000,00 (hetta er ein meting frá TK, ein kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

| | |
|---|---|
| samanlagt | 1.365.500,00 kr. u/MVG |
| | 1.450.843,75 kr. v/6,25% MVG |

Kostnaðarmetingin av umbyggingini av Tjarnargarði sum bleiv gjørd var 23,8 mio. kr. Um omanfyrinevndu tillagingar skulu gerast heldur henda kostnaðarmeting ikki.

Við tillagingunum verður nýggja kostnaðarmetingin samla 25,3 mio kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka undir við, at omanfyrinevndu broytingar verða gjørdar í samband við umbyggingina av Tjarnargarði og at játta 1.5 mio kr. til endamáli.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við broytingunum og at játtanin verður fingin til vega á íløguætlanini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Útbjóðingartilfarið uppá út- og umbygging av Tjarnargarði frá ráðgevum er nú liðugt og endalig kostnaðarmeting fyriliggur. Endalig kostnaðarmeting fyri verkætlanina er hægri enn áður mett. Samlaður verkætlanarkostnaður áðrenn licitatión verður mettur til 35 mió kr. við øllum. Handverkaraútreiðslur eru leypandi vorðnar hægri, umframt at summar útreiðslur ikki hava verðið íroknaðar áður. Útreiðslur til kommunalt mvg. hava ikki verið íroknaðar frá byrjan, umframt at við nýggjastu kostnaðarmetingini eru íbindingargjøld, lønar- og prísvøkstur og umsitingarkostnaðir við. Harafturat hava útreiðslur til innbúgv og útgerð ikki verðið partur av kostnaðarmetingini, og hesar eru tiknar við nú.

Í samlaða kostnaðinum nú er: 7 nýggj umlætingarpláss, uppraðfesting av venjingarhølum og dagtilhaldinum, nýggjur ídnaðarkøkur og samanbinding av báðum høvuðsbygningunum. Øll ovara hædd verður gjørd av nýggjum, og fleiri fermetrar verða tí til venjingar og dagtilhald, umframt at stórur partur av bygninginum verður høvuðsumvældur har neyðugar ábøtur verða gjørdar viðv. m.a. brunaviðurskiftum og ventilatón.

Eftir ætlan skal útbjóðingartilfarið sendast teimum bjóðandi í viku 44.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu ætlan, og at karmurin fyri verkætlanina verður hækkaður samsvarandi nýggju kostnaðarmetingini.

**Eldranevndin 09. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sp/f Kontrast hava bjóðað arbeiðið út í innbodna lisitatión. Arbeiðstakararnar eru: P/F Articon, og Sp/f Búsetur, Sp/f JEP Smíð, P/F MTHøjgaard, Sp/f Húsavarðartænastan og Sp/f Eysturlon.

Tilboðini eru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon: | 21.673.531,80 kr uttan mvg. |
| Búsetur: | 23.471.810,00 kr --- // --- |
| JEP Smíð: | 25.810.304,41 kr --- // --- |
| MTHøjgaard: | 28.486.394,00 kr --- // --- |
| Húsavarðartænastan: | 28.643.768,00 kr --- // --- |
| Eysturlon: | Tilboð ikki innlatið |

Kontrast Arkitektar og umsitingin eru farin í samráðingar við Articon, sum hevði lægsta tilboðið, til tess at útgreina tilboðið.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina at umbyggja gamla Tjarnargarð til demensdepil. Samlaði kostnaðurin framgongur í kostnaðarmetingini á j.nr. 18/04091-01. Kostnaðarmetingin er grundað á tilboðið hjá Articon, sum er lægsta tilboðið. Í kostnaðarmetingin er HVÍ

Fyri 2018 eru 3.049 mio kr. játtaðar til verkætlanina

**Tilmæli:**
Bygginevndin hevur á fundi 22. november 2018 viðgjørt tilboð og mælir bygginevndin til at játta samlaða kostnað av (kostnaðarmeting j.nr. 18/04091-01) av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Mælt verður til at taka undir við tilboðnum hjá Articon P/F samsvarandi tilboðsupphædd og undirskrivað arbeiðstakarasáttmála.

Mælt verður samstundis til at játta løgukarmin soleiðis:

| | |
|---|---|
| 2018: | 7,9 mio kr. av karminum fyri 2018 |
| 2019: | 12,3 mió kr av karminum fyri 2019 |
| 2020: | 10 mió kr av karminum fyri 2020 |

**Eldranevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við 1. byggistig av út- og umbygging av gamla Tjarnargarði eru komin viðurskifti fram, sum gera at byggingin hevur tørv á eini eykajáttan.

Fyrsta byggistig hevur havt væl størri avbjóðingar við sær, enn roknað var við.

Fleiri eru orsøkirnar fyri at verkætlanin er dýrka. M.a. er talan um rokningar fyri vantandi projektering, eyka byggiharra útreiðslur, meir- og minniveitingar og ókent.

Umsitingin hevur gjørt eina dagførda kostnaðarmeting og staðfestast kann, at tørvur er á eini eykajáttan á kr. 3.984.375 kr.

Útgreining er viðløgd.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at taka undir við at játta 3.984.375 kr. eyka av konto 6175 umsiting og røkt av fastari ogn, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 15. juni 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í eldranevndini og beina málið í býráðið

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Annfinni Brekkstein um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn og Bogi Andreasen.

Málið beint aftur í eldranevndina.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 619<br><br>Formansins merki: |

## 140/20 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 4/18 | 18/00057-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 78/18 | 18/00057-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 62/18 | 18/00057-2 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 37/18 | 18/00057-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 155/18 | 18/00057-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 186/18 | 18/00057-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 173/18 | 18/00057-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 145/18 | 18/00057-2 |
| 9 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 172/18 | 18/00057-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 304/18 | 18/00057-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 297/18 | 18/00057-2 |
| 12 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 236/18 | 18/00057-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 161/20 | 18/00057-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 166/20 | 18/00057-2 |
| 15 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 140/20 | 18/00057-2 |

**Upprunin til málið:**
Sí niðanfyri

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður eisini til mál 14/01009 í sambandi við, at fimleikarhøllin er bygd út til nýggja ítróttarhøll á Argjahamri, og at tað í hesum sambandi varð tikin avgerð um at byggja frítíðarskúlan út, tí sum bygningspartar eru teir sambygdir. Talan er um 130 m2 stóran rábygning, ið er gørdur og innilokaður, men uttan vindeygu og hurðar.

Umsitingin hevur biðið MAP arbeiða víðari við hesari verkætlan við at prosjektera, søkja um byggiloyvi og gera eina samlaða kostnaðarmeting at byggja frítíðarskúlan lidnan. Her er í høvuðsheitum talan um timbur-, gólv-, stál-, el-, hvs-, ventilatións- og málaraarbeiði, vindeygu og hurðar, snyrilsstáltrappu til høllina, íroknað ráðgevarakostna, prosjektumsiting og trygging. Sí annars skitsutekning av innrætting.

Umsitingin ætlar at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð til høvuðsarbeiðstakararnar Sp/f TG-Verk og Sp/f 10.dec. 2013. TG-Verk kennir til verandi høll á Argjahamri. Sp/f 10.dec. 2013 hevur arbeiðsroyndir við loftshæddini á Hoyvíkshøllini, sum er eitt líknandi arbeiði sum útbyggingin av frítíðarskúlanum.

Á íløguætlanini fyri 2018 eru settar kr. 1,8 mió av til endamálið á kontu 3175 barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**
ABF 06, ABR89

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/01009

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at bjóða byggingina av frítíðarskúlan á Argjahamri út eftir omanfyristandandi leisti og at geva umsitingini heimild at samráðast um sáttmála at leggja fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til ráðgevaraavtalu við MAP Arkitektar áljóðandi kr. 285.000, ið fevnir m.a. um myndugleikaprosjekt, útbjóðingartilfar og skipan av útboði, høvuðsprojekt, byggileiðslu, fakeftirlit og garantisýn.

Tíðarætlan fyri samlaðu verkætlanina er, at myndugleikaprosjekt skal vera sent kommununi 1. mars 2018, byggiloyvi fáast til vega og útboð til arbeiðstakarar í apríl. Ætlandi verður arbeiðstøkusáttmáli latin mentamálanevndini í mai, so at byggingin kann byrja í juni. Byggingin skal vera liðug um ársskiftið.

Biðið verður harumframt um at flyta kr. 1.800.000 av íløgukarminum 3175 Barnaansing L00001 til nýggja løgukontu Útbygging Frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at góðkenna ráðgevarasáttmálan og at játta kr. 1.800.000 á løgukarmi

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiarbeiðið er boðið út í undirhondsboð til arbeiðstakararnar Sp/f BP Bygging og Sp/f TG-Verk. Innkomnu tilboðini eru soljóðandi:

BP Bygging: kr. 2.969.600,00 u/mvg.

TG-Verk: kr. 2.830.660,00 u/mvg.

Høvuðsráðgevin og umsitingin hava verið í samráðing við lægsta tilboðsgevan TG-Verk, til tess at eftirkanna tilboðið og at finna møguligar tillagingar, ið kunnu hava við sær lægri kostnað. Eftir hesar sparingar er tilboðið hjá TG-Verk kr. 2.408.822,00 u/mvg. Avleiðing av hesum er m.a., at trappurúmið/-uppgongdin til høllina ikki verður gjørd.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera Frítíðarskúlan á Argjaharmri lidnan, tvs. tilboðskostnaðurin (hvú), ráðgevarakostnaður, prosjektumsiting, trygging og mvg íroknað, og er samlaði kostnaðurin kr. 3.147.695,00.

Sum kunnugt er játtanin kr. 1,8 mió á kontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri. Tað resta sostatt kr. 1,35 mió í. Kostnaðarmetingin, sum íløgujáttanin byggir á, er upprunaliga frá várinum 2017, men ásannast má, at henda hevur ikki verið nóg neyv.

Aðrar íløgujáttanir eru ikki á grein 3 í fíggjarætlanini.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 300.000 av rakstrarkontu 3317 Ungdómshús á Argjum, ið er minninýtsla frá 2017, og kr. 200.000 av rakstrarkontu 3142 Frítíðarskúlan á Argjahamri, ið somuleiðis stavar frá minninýtslu í 2017, til verkætlanina. Játtanartørvur er tá kr. 850.000, ið mett verður ikki ber til at fáa til vega á grein 3.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega kr. 850.000 aftrat til verkætlanina til tess at kunna taka av tilboðnum og gera arbeiðstøkusáttmála.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til fíggjartørvin omanfyri, har kr. 850.000 vanta í til tess at kunna gera arbeiðstøkusáttmála við lægsta tilboðsgevan. Umframt nevndu fígging verður mett, at til ber at játta kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, og kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum.

Viðmerkjast skal, at játtanin til kontu 3214 er ætlað til at gera realskúlan kláran til dagstovn, men onnur játtan verður ætlandi fingin til vega sum íløgu í eykajáttan (sí mál 18/01522). Viðvíkandi kontu 3216, sum er játtan til frítíðartilboðið til 3. flokk, so verður mett, at skerda játtanin onga ávirkan fær á virksemið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin í barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála vil TG-Verk fyri tilboðsupphæddina kr. 2.408.822 u/mvg og játta kr. 3.147.695 til samlaða byggi- og projektkostnaðin

Harumframt verður mælt til at flyta kr. 200.000 av kontu 3142 Frítíðarskúlin á Argjahamri, kr. 676.000 av kontu 3214 Broytingar og minni umvælingar, kr. 172.000 av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, og kr. 300.000 av kontu 3317 Ungdómshús á Argjum til løgukontu 3175 L31007 Útbygging av frítíðarskúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Eftir at verkætlan, frítíðarskúlin á Argjahamri, varð samtykt í býráðnum, hevur TG-Verk boðað frá, at teir ikki longur standa við tilboðið. TG-Verk viðmerkir, at "tilboðið á Frítíðarskúlan á Argjahamri sambært ABF06, §3, stk. 5, ikki longur eru bindandi fyri TG Verk Sp/f, tí freistin á 20 dagar langt síðani er farin og TG Verk Sp/f ikki hevur lovað at staðið longur við tilboðini". Hetta er smb. ABF06 heimilað, tí 20 daga freistin er farin langt síðani farin, og eingin accept var givin, av tí at bíðað hevur verið eftir politiskari viðgerð. Niðurstøðan er, at TG-Verk eru leysgivnir av tilboðnum. Tórshavnar kommuna hevur síðani verið í sambandi við hægra tilboðsveitara, BP Bygging, hvørt teir eru áhugaðir í at gera verkætlanina við somu eindarprísum og sparingum sum hjá TG-Verk, áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg. Men BP bygging hava váttað, at teir ikki eru áhugaðir í tilboðnum.

Peningurin er longu settur av til verkætlanina, og fyri at stígur ikki kemur í, hevur umsitingin spurt annan arbeiðstakara sp/f VD, timburmeistara Valbjørn Dalsgarð, hvørt hann er áhugaður at gera verkætlanina við somu avtalum, eindarprísum og sparingum áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg. Samráðingar hava verið partanna millum og niðurstøðan er, at Sp/ VD boða frá, at teir standa við tilboðnum at gera verkætlanina við somu avtalum, eindarprísum og sparingum áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg. Av tí at trupulleikar hava verið við vindeygunum í frítíðarskúlanum og skúlanum á Argjahamri sum heild, hevur umsitingin gjørt tillagingar í tilboðnum við at broyta 3G dupultfasadu vindeyguni til standard einkultfasadu vindeygu, sum eru við sama sniði, liti og tilfari sum verandi. Útsjónd broytist lítið og einki uttandura.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála við sp/f VD, at gera verkætlanina, Frítíðarskúlin á Argjaharmi við somu avtalum, eindarprísum og sparingum áljóðandi 2.408.822,00 kr u/mvg.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Heðin Mortensen og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur sum heild gingið sera væl. Endaliga úrslitið er eitt

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og verktætlanarleiðarin mæla til at loka verkætlanina konta 3175 L31007 Frítíðarskúlin á Argjahamri og flyta avlopið kr. 67.390 til løgukarmin konta 3175 Barnaansing (íløgur). Málið at beina í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Kunnað varð um málið og beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

# 141/20 Útboð av útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 35/19 | 19/00412-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 32/19 | 19/00412-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 24/19 | 19/00412-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 177/19 | 19/00412-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 206/19 | 19/00412-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 163/20 | 19/00412-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 167/20 | 19/00412-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 141/20 | 19/00412-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss, har ein av ætlaðu verkætlanum er at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum. Ávíst fyrireikingararbeiðið hevur verið í hesum sambandi, har kostnaðarmetingar og tilboð eru fingin til vega fyri útbyggingini. Nú kommunan hevur leigað skúlalonina í Hoydølum og at talan er um stóra íløgu, verður mett skilabest, at arbeiðið verður boðið út á annan hátt, enn gjørt er. At annar leistur verður valdur kann hava við sær útreiðslur fyri kommununa um krav verður sett fram um gjald fyri útint arbeiði hesum viðvíkjandi.

Mett verður skilabest at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til tríggjuar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa).

Ætlanin er at byggja Dagstovnin á Hamrinum út við tveimum nýggjum stovum, so at stovnurin fer at hava sekst stovur. Víst verður í hesum sambandi til mál 18/03848 Staðseting av nýggjum og víðkan av dagstovnum, har økið er sett av til endamálið. Tørvur á møguligum meira lendi kann takast upp seinni.

Til tess at bjóða arbeiðið út, skal gerast útbjóðingartilfar, ið lýsir hølistørv, bygningskrøv, funktión v.m. Neyðugt er í hesum sambandi at seta av upphædd til fyrireikingar, ið mett verður kr. 100.000 ætlað ráðgeving, umframt samsýning til teir bjóðandi, ið ikki fáa arbeiðstøkusáttmála. Skotið verður í hesum sambandi upp kr. 75.000 í samsýning. Tilsamans er fíggjartørvurin til hesa tilgongdina kr. 250.000.

Á løgukarmi á grein 3 Børn og ung konta 3175 Barnaansing fyri 2019 eru í alt settar kr. 20 mió av til dagstovnar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fáa heimild til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út arbeiðið at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum í innbodnari lisitatión til tríggjar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa), og at gera avtalu um ráðgeving í hesum sambandi. Harumframt verður mælt til at játta kr. 250.000 av løgukarmi 3175 Barnaansing til nýggja løgukontu Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Greitt verður frá úrskurði viðvíkjandi innkomnu uppskotunum og tilboðunum.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Trý heildararbeiðstakaratoymi vórðu boðin í innbodna lisitatión at byggja út Dagstovnin á Hamrinum. Tvey tilboð komu inn við hesum handverkaraútreiðslum (HVÚ):

| | |
|---|---|
| Sp/f Búsetur | kr. 14.269.973,00 (alternativ innrætting, tó sami prísur) |
| Sp/f VD | kr. 16.561.139,24 |

Viðmerkjast skal, at Sp/f Búsetur eisini hevði eitt alternativ til innrættingina fyri sama prís.

Tilboðini eru mett eftir hesum metingartættum:
1. Arkitekturur og landslag (15%)
2. Uppfylling av byggiskrá (25%)
3. Innrætting, funktión og spælipláss (25%)
4. Tilboðsupphædd (35%)

Niðurstøðan hjá dómsnevndini er, at Sp/Búsetur fær flest stig. – Sí annars fylgiskjal 1b Dómsnevnd niðurstøða, og fylgiskjal 2 Tekningar og myndir.

Samlað kostnaðarmeting, har tað aftrat HVÚ er roknað við byggiharraveitingum, ráðgeving, verkætlanarleiðslu, eftirliti, listprýði, innbúgvi, óvæntaðum og mvg, er kr. 18.907.502, sí fylgiskjal.

Stór avbjóðing við hesi verkætlan eisini samanborið við tilboðini at byggja Býlingshúsið vesturi á Flat út (sí mál 19/00411), er dýri fermetrakostnaðurin, ið fyri stóran part skyldast lendis- og atkomuviðurskiftum. Endamálið við útbyggingini á Hamrinum er fyrst og fremst at økja um plásskapasitetin á dagstovnaøkinum sum heild og á Argjum ítøkiliga. Vísandi til annað mál um Dagstovnin á Argjum, ið krevur stórar ábøtur (sí mál 19/01794), so metir fyrisitingin skilabest, at ætlanin á Hamrinum ikki verður framd, men at Dagstovnurin á Argjum verður bygdur av nýggjum árini 2021-2022, har tað eisini er upplagt at vaksa um plásskapasitetin í mun til verandi støðd eisini væntandi fyri lutfalsliga ódýrari kostnað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til ikki at taka av nøkrum tilboði og ikki at fremja verkætlanina.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum varð boðið út samstundis sum útbyggingin av Býlingshúsinum vesturi á Flat. Játtaðar vórðu kr. 250.000 til fyrireikingar og útboð av útbyggingini av Dagstovninum á Hamrinum løgukonta 31011. Tá til stykkis kom, varð avgjørt ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum uppá Dagstovnin á Hamrinum.

Málið kann tí lokast. Úrslitið á løgukontu 31011 er ein meirnýtsla uppá kr. 136.864, sum kann fíggjast av tøkum løgukarmi konta 3175 Barnaansing (Íløgur).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at loka løgukontu 3175 L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum, og at fíggja meirnýtslu kr. 136.864 av tøkum løgukarmi konta 3175 Barnaansing (íløgur).

Málið at beina í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Kunnað varð um málið, ið varð beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

# 142/20 Rætta fíggjarætlan hjá trimum stovnum í sambandi við serstovur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 165/20 | 20/02110-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.06.2020 | 145/20 | 20/02110-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 123/20 | 20/02110-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 142/20 | 20/02110-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Staðfestur er skeivleiki í barnatalinum hjá trimum stovnum, har børn á serstovu av misgáum ikki eru tald uppí játtanina.

Í sambandi við ásetan at barnatalinum til fíggjarætlanina 2020 vóru ymiskir vangar nýttir at gera metingina útfrá, so størsti neyvleiki var í metingini av væntaða barnatalinum á hvørjum einstøkum stovni. Nevnast kunnu BARN skipanin, har hugt varð eftir barnatali á stovnunum undanfarna ár 2019 og har hugt varð eftir tí, ið kundi metast um komandi ár 2020, gjøgnumgongd av hvørjari einstakari tilmeldingini til forskúla og skúla, og síðani hvørjar skúgvingar hesar kundu føra við sær fyri børn, ið kundu vantast at fara úr vøggustovu til barnagarð.

Í hesum sambandi arbeiddi Barna- og ungdómsdeildin eisini við uppskoti um fasta játtan til serstovurnar á dagstovnaøkinum. Tað varð ikki tikið við í hesum umfari, men hetta arbeiðið hevur skapt skeivleika í fíggingini av tveimum stovnum, ið hava serstovur í barnagarðsaldri, og einum við frítíðarskúlavirksemi. Skeivleikin er tann, at í fyrireikingunum til grein 3 í fíggjarætlanina er kolonna, sum greiður frá serstovu-tørvinum, men har barnatalið hesum viðvíkjandi ikki er tikið við.

Avleiðing er, at hesir stovnar hava fingið játtað ov lága fígging til virksemið, sum førir við sær eitt fíggjarligt hall, um hetta ikki verður rættað.

Tað er á hesum stovnum:
- Dagstovninum í Øksnagerði, Serstovan Bólið, sjey BG børn (EIND A)
- Dagstovnurin við Landavegin, Serstovna Sóljan, eitt VS børn og fimm BG børn (EIND A)
- Frítíðarskúlin í Kongagøtu, Serstovan Frælsið, fimm FTS børn (EIND B)

Samlaða upphæddin, sum hesir stovnar ikki hava fingið við í játtanini er kr. 825.000 býtt soleiðis:
- Dagstovnurin  Øksnagerði, Serstovan Bólið kr. 357.000.
- Dagstovnurin við Landavegin, Serstovan Sóljan kr. 340.000.
- Frítíðarskúlin í Kongagøtu, Serstovan Frælsið kr. 128.000.

Reguleringsjáttanin á kontu 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur hevur ikki møguleika at fíggja upphæddina. Sí í hesum sambandi mál 20/02109 um nýggja vøggustovu í Býlingshúsinum og mál um nullstilling av undirskotum á grein 3 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Skotið verður upp at fíggja tær kr. 825.000 soleiðis: av løgujáttan 6475 L64016 Íbúðarbygging á Frúutrøð kr. 332.000, og av L64017 Kommunalar útstykkingar kr. 468.000. Írestandi kr. 25.000 kunnu fíggjast av kontu 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til at rætta fíggjar-ætlanina 2020 til serstovurnar hjá Dagstovninum í Øksnagerði við kr. 357.000, Dagstovninum við Landavegin við kr. 340.000, og Frítíðarskúlanum í Kongagøta við kr. 128.000, samlað kr. 825.000, soleiðis:

- løgujáttan 6475 L64016 Íbúðarbygging á Frúutrøð kr. 332.000
- løgujáttan 6475 L64017 Kommunalar útstykkingar kr. 468.000, og
- konta 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur kr. 25.000

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 143/20 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |
| 11 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 270/18 | 15/03761-9 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 31/19 | 15/03761-9 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 26/19 | 15/03761-9 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 18/19 | 15/03761-9 |
| 15 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 98/19 | 15/03761-9 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 13/19 | 15/03761-9 |
| 17 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 143/19 | 15/03761-9 |
| 18 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 278/19 | 15/03761-9 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 306/19 | 15/03761-9 |
| 20 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 268/19 | 15/03761-9 |
| 21 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 42/20 | 15/03761-9 |
| 22 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 43/20 | 15/03761-9 |
| 23 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 35/20 | 15/03761-9 |
| 24 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 96/20 | 15/03761-9 |
| 25 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 174/20 | 15/03761-9 |
| 26 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 15/03761-9 |
| 27 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 169/20 | 15/03761-9 |
| 28 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 143/20 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

"Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda  okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:
- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8
- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a).  at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:
- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á rættina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Rættin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men rættin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag.

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**
Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í økinum í Sandvíkum eru atlit at taka til umhvørvi, frítíðarvirksemi, seyðahald o.a. Felagið hevur í dag nógv stríð av upprudding sambært galdandi umhvørvisgóðkenning. Sum liður í at menna verkætlanina og tryggja neyðug atlit, verður mett hóskandi saman við felagnum at fáa landslagsarkitekt at gera uppskot um skipan av øki og lendi. Mett verður neyðugt at seta kr. 100.000 av til endamálið av játtan ætla til smærri ítróttarverkætlanir, sí mál 18/03320.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ætlanini og vísa til mál 18/03320 viðvikjandi játtan.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og tryggja, at atlit verða tikin til umhvørvið, fjøruna, gomlu rættina og møguleikan fyri almennum uppihaldi.

**Ískoyti:**
Uppskot um skipan av øki og lendi er nú tókt, sí hjáløgdu fílu, umframt at limirnir fáa handaða mappu á fundinum.

Málið kemur fyri í nevnd 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Limirnir fingu handað tilfar.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Skipanaruppskotið fevnir um uppskot til nýtt skjótianlegg í Sandvíkum hjá Veiðufelagnum Byrsumúli. Tað hevur verið týdningarmikið í sambandi við gerð av skipanaruppskotinum, at anleggið (skjótibreytin við tilhoyrandi viðurskiftum) hóskar inn í lendið og náttúruna kring økið. Harumframt hevur tað verið týdningarmikið, at nýggja anleggið er vakurt á at líta, er vælvirkandi og nútímans við fleiri

Tað sum eyðmerkir uppskotið er, at serlig atlit eru tikið fyri uppruddingar arbeiðinum í sambandi við skjóting. Breytirnar vera fluttar longur frá fjøruni, lendið verður drenað og slættað so gjørligt verður at skipa ruddingina betur.

Ein vallgarður er teknaður at liggja á markinum millum anleggið og fjøruna, hann skal forða splintrum frá leirdúgvunum í at enda í fjøruni. Somuleiðis skal vallgarðurin tryggja, at tað framvegis verður atkomuligt hjá almenninginum til fjøruna. Men upplýsast skal, at tá anleggið er í brúk, tá verður ikki møguligt at nýta fjøruna til uppihald.

Anleggið skal vera fyri øll, tí eru atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað raðfest høgt. Hetta verður gjørt við at ein gøta kemur at leggja seg gjøgnum lendið og virka sum bindiligur millum felagshúsið við yvirdekkaðum hátúni, áskoðaraskýlið og skjótistøðini.

Í dag hevur Byrsumúli eitt felagshús, sum er gjørt av tveimum bingjum, men í skipanaruppskotinum er lagt upp til, at eitt felagshús verður gjørt við øllum hentleikum, so sum hølum/umstøðum til innivist, smærri móttøkur, veitslur, vesir o.a. hugsanin er, at sjálvt felagshúsið er uppbygt sera einkult, bygningsgrindin verður gjørd í pørtum, ið skjótt kunnu setast upp.

Yvirhøvur er tilfarsvalið sera einkult við timbri og flagtekju, sum hóskar væl til umhvørvið og náttúruna.

Vallgarðurin og ymisk skot á gøtuni vera prýdd við stórum gróti og vøkstri, ið somuleiðis hóskar væl til lendið og umhvørvið.

Aftrat hesum kemur ein eyrvegur at liggja aftanfyri anleggið, ið skal nýtast í sambandi við rakstur. Hesin skal flætta natúrliga inn í umhvørvið. Framvið eyrvegnum verður grót og runnar, hjálpirót og onnur planta, ið hóskar til umhvørvið.

**Góðkenning til altjóða kappingar:**
Fyrispurningar hava verið um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Veiðifelagið Byrsumúli hevur greitt frá hesum viðurskiftunum í skrivið til kommuna,
*sí skjal Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir.*

Fyrst er at viðmerkja, at eingin altjóða felagsskapur góðkennir nakra skjótibreyt yvirhøvur, hvørki her ella aðra staðni. Góðkenningarnar koma frá lokalum myndugleikum í mun til teirra lógarkrøv um trygd og umhvørvi v.m., meðan ítróttarligu reglurnar um kappingarnar eru ásettar av ISSF.

<u>Ítróttarlig krøv</u>: Ásetingar fyri mát/stødd á breyt, longd/ferð og vinklar, hvussu dúgvurnar skulu flúgva o.s.fr. eru at finna í kappingarreglunum frá ISSF. Sí skjal *ISSF reglur um skjótibreytir.* Skipanaruppskotið er í tráð við hesar ásetingarnar. Harumframt vendir økið rætt í mun til ljósviðurskiftini, sum ISSF mælir til, og veðurlagið á staðnum er tað besta, sum felagið kann ynskja sær.

Tað er kappingarleiðslan til einstøku kappingina, sum góðkennir ''breytina'', og tað snýr seg um, hvørt kastimaskinurnar eru innstillaðar rætt í mun til ítróttargreinina, til dømis OL-trap og OL-skeet.

Tá tað kemur til umstøðurnar rundan um breytina; felagshús, vesir o.a. er ikki talan um ítróttarlig krøv, tó sum liður í verkætlanin skulu hesi viðurskiftir; felagshús, vesir o.a. vera á nøktandi støði eftir BK17. Harumframt er tað ynski hjá kommununi, at nøktandi athølir/umstøður eru funktionel til virksemið.

<u>Trygdarkrøv</u>: Tað er løgreglan, sum góðkennir trygdina, her er talan um trygdarfrástøðu og hvønn veg skotið verður. Verandi breyt er góðkend, og skal nýggja breytin somuleiðis góðkennast, tá hendan er liðug.

Umhvørviskrøv: Umhvørvisstovan umsitur Umhvørvisgóðkenningina fyri virksemið á breytini. Somuleiðis er verandi breyt góðkend. Skipanaruppskotið leggur upp til, at virksemið tekur enn størri hædd fyri umhvørvinum.

Nevnast skal at Veiðifelagið Byrsumúli hevur sett seg í samband við Danmarks Jægerforbund. Og fingið tey at meta um skipanaruppskortið viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Danmarks Jægerforbund er av tí fatan, at nýggja skjótibreytin lkur allar treytir, ið eru galdandi til kappingar í OL-trap og OL-skeet. Sí skjal *190204 DJ skrivelse/MLMAL.*

Umsitingin hevur sett seg í samband við Skjótisamband Føroya við fyrispurning um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Skjótisamband Føroya hevur kanna skipanaruppskoti og greitt frá í skrivið til kommuna, sí skjal *Svar til Tórshavnar kommunu.*

Sagt verður at uppskotið um nýggja breyt lýkur allar treytir til heimligar kappingar eins væl og hon lýkur treytirnar til einar komandi oyggjaleikir. Breytin kemur sjalvsagt ongantíð at rúma heimmeistarakappingar ella Olympisku leikunum, men við einari OL-trap breyt og tveimum OL-skeet breytum, kunnu flest allar aljtóða og millumtjóðakappingar um okkara leiðir haldast her.

Verður hugt at møguligum framtíðarkrøvum til kappingar, so bendir einki á at møgulig broyting í reglunum fyri kappingargreinarnar skuldi viðført, at broytingar skulu gerast á sjálva breytina, so hon ikki kann nýtast longur. Áður, tá ið broytingar hava verið so hevur tað snúð seg um ferð og vinklar á dúgvunum viðvikjandi kastimaskinunum og ikki sjálvari breytini.

Í sambandi við oyggjaleikir so við breytin kunna rúma, OL.trap, Automatic Ball Trap og OL-skeet, eins væl og ovara skeet breytin í uppskotinum kann brúkast til Compak-Sporting-breyt. Til tað síðst krevst tó, at fleiri kastimaskinur verða settar upp, men hetta rúmar breytin væl.

Sjótisamband Føroya metir tí, at uppskotið uppá nýggja breyt vil tryggja skjótiítróttin í Føroyum í mong ár.

**Átøk í verkætlanini:**
Skipanaruppskotið leggur upp til, at anleggið kann skipast í pørtum. Ynskiligt hjá felagnum er, at skjótibreytirnar verða gjørdar sum tað fyrsta, soleiðis at uppruddingin gerst meiri lagalig. Síðani skulu vollarnir gerast, umframt gøtur og felagshús.

**Víðari fyrireikingar**
Í sambandi við viðgerð í mentamálanevndini kemur umsitingin at gera ítøkiligt tilmæli um, hvussu farast kann fram í mun til møguliga víðari fyrireikingar, herundir projektering, samstarvið við felagið, kostnaðarmetingar, fígging v.m.

**Skjøl:**
*- Journal nr. 15-03761-55 BYRSUMÚLI SKIPANARUPPSKOT DES.2018*
*- Journal nr. 15-03761-58 Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-58 ISSF reglur um skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-60 190204 DJ skrivelse/MLMAL*
*- Journal nr. 15/03761-61 Svar til Tórshavnar kommunu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til, at skipanaruppskotið verður samtykt sum ætlan fyri økið/virksemið, at øll loyvi og myndugleikakrøv verða dagførd, nú skjótibreytin verður endurnýggjað, og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við støði í skipanaruppskotinum er nú klárt at fyrireika verkætlanina víðari saman við Veiðifelagnum Byrsumúla. Fyrsta stig er at fáa í lag avtalu við ráðgevarafelag um projektering av lendisarbeiðinum.

Til ber at projektera verkætlanina í einum ella í stigum, har sjálvt lendisarbeiðið eisini tekur atlit til, at felagið kann halda fram við venjingum í arbeiðstíðarskeiðnum. Á fundinum verður greitt frá viðurskiftum kring kostnað vm. í sambandi við projektering av slíkum anleggi/lendi og bygningum.

Mett verður hóskandi at seta av 300 tkr. í fyrstu atløgu til víðari tilgongdina. Sí tilmæli í máli 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at farið verður í tilgongd at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini at leggja aftur fyri nevndina.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla um víðarimenning av verkætlanini og at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini, at leggja aftur fyri nevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at samstarvsavtalan eisini umfatar regluliga rudding.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um samstarvsaavtalu.

Umsitingin hevur eisini mett um, hvør leistur er tann frægasti í mun til at fáa projektera og útint verkætlanina. Mett verður at mest átroðkandi er at fáa drenað skjótiøkið og fáa gjørt vøllgarðarnar. Í fyrsta lagi tí at tað verður tað sum gerð mest mun at vera framt fyrst og í øðrum lagi at avmarkað kostnaðin til hetta fyrsta verkætlanarstigið.

Viðv. framferðarhátti kann veljast millum:

a). Projektera verkætlanina og síðani fara í útboð
Fyrimunurin er at ymsar møguligar óvissur vera færri og tað fæst eitt gott tilfar til grund fyri útboðnum av lendisarbeiðinum.

b). Bjóða arbeiðið út sum eina heildararbeiðstøku
Høvuðsfyrimunurin er at arbeiðið helst verður lættari at laga til og innan fyri ásettan kostnaðarrammu. Tó er neyðugt við nakað av nøgdarmetinginum áðrenn farið verður undir útboð so tað er nøkulunda greitt hvørjar nøgdir talan er um so skulu flytast, herundir gera nakrar kanningar viðv. dýpinum av tilfari í økinum. Hetta er mett til nakrar 10 tkr. og kann dekkast av kontu 5365 Stuðul til løgur.

Kostnaðarmeting
Í verandi støðu er ikki nøkur dagført kostnaðarmeting. Talan er um verkætlan, ið helst kostar fleiri mio.kr. Felagið bjóðar seg fram til at gera arbeiðir við bygningar, pallar o.a. meðan lendisarbeiðið sum heild krevur arbeiðstakara við røttu amboðunum og royndunum.

Fígging
Byrsumúli hevur ikki nakra fíggjarogn av týdningi og sum munar í hesum føri. Kommunan hevur ikki tøka fígging til verkætlanina í ár og tí má støða takast til um fígging skal setast av í løguætlanini fyri 2020 ella 2021.

Felagið bjóðar seg hinvegin at gera sjálvboðið arbeiðið innan onnur viðurskifti enn grót og moldarbeiðið og kann tað so innganga sum egininnsatsur.

Skotið verður upp at felagið og TK í næstum fara undir fyrireikingar til at søkja uttanhýsis stuðul til verkætlanina ella partar av henni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). Um verkætlanin í fyrsta umfarið verður avmarkað til at drena skjótiøkið og gera vøllgarðar.

b). Um antin at projektera verkætlanina og síðani fara í útboð ella at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøku.

c). Við støði í valinum av pkt. a og b. at fara undir endaligar samráðingar um eina samstarvsavtalu at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum. Nevndin staðfestir, at játtan ikki er tøk í ár og at málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanar-arbeiðið og langtíðarløguætlanina.

**Ískoyti:**
Við atliti til at fáa betri grundarlag fyri møguligari verkætlan og útbjóðing verður mett hóskandi at fáa gjørt ymiskar fyrireikingar, herundir:

Við støði í skipanaruppskotinum at:
1. Søkja um loyvi hjá friðingarmyndugleikunum til verkætlanina
2. Søkja um nýggja umhvørvisgóðkenning

Umframt:
3. Fáa gjørt lendis- og jørðkanningar, uppmátingar og avseting av verkætlanarøkinum fyri m.a. at fáa metingar um nøgdir av tilfari, ið skal flytast og útvegast og herundir kostnaðarmeting.
4. Fáa gjørt samstarvsavtalu við Byrsumúla um verkætlanina, herundir egininnsatsin hjá Byrsumúla og ætlan um at søkja um uttanhýsis fígging.

Fyribils verður mett, at pkt. 3 kostar 100 tkr. Mett verður at fígging til endamálið kann útvegast av upphæddini, ið var játtað til konto 5717 Ítróttaanlegg til fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll (mál 18/00009), ein verkætlanin, ið ikki er útlit fyri at útinna í ár. Ætlanin er at fáa ráðgeva til kanningarnar.

Tíðarætlan:
Mett verður, at tilgongdin viðv. pkt. 1-4 tekur nakrar mánaðir og at eitt útboð helst kann vera í 2020, treytað av neyðugum loyvum og fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu um fyrireikingar til at bjóða út arbeiðstøku uppá drening, planering og gerð av vøllgarðum til nýggja skjótibreyt, herundir neyðug loyvi.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging til skjótibreyt hjá Byrsumúla í 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 3.000 tkr. til skjótibreyt, t.e. játtanin skal brúkast til at byggja skjótibreyt, herímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna, umframt ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 1.000 tkr. til 2022.

Við hesum ber sannlíkt til at fara undir at fyrireika og byggja nýggja skjótibreyt í Sandvíkum, ið nýtast kann til venjing, frálæru og altjóða kappingar.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið, ið gjørdi skitsuprojektið at standa fyri liðugt projektering og útboðnum av verkætlanini.

Tilgongdin við at fáa neyðug loyvi til vega og tekur væntandi nakrar mánaðir.

Málið er at arbeiðið kann vera klárt at bjóða út í vár, tá neyðug loyvi væntandi eru fingin til vega, og fara undir útinning í summar. Byggiarbeiðið í lendinum væntast at ganga inn í 2021.

Forkanningar viðv. lendinum byrja í næstum og er dialogur í gongd við felagið um samstarvsavtalu. Ætlandi verða úrslitini av forkanningunum, uppskot til samstarvsavtalu og ráðgevaraavtala klár til fundin í nevndini 11. mars 2020.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um ráðgevaraavtalu.
b). at flyta 3.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Viðv. samstarvsavtalu
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um eina samstarvsavtalu og eru komin ásamt um eina avtalu. Sí hjálagt uppskot.

Viðv. umsóknum um loyvir
Tilgongd at fáa neyðug loyvi er í gongd.

Roknað verður við at svar fyriliggja frá øllum myndugleikum innan mai 2020.

Tær eru ikki byrjaðar enn, men verður tað væntandi í apríl-mai 2020.

Viðv. ráðgevaraavtalu
Samráðingar eru ávegis og væntast eitt úrslit at fyriliggja í mai 2020.

Alt eftir hvussu tað gongur við ymsu loyvunum og forkanningunum er málið at kunnu bjóða arbeiðstøkuna út í juni 2020. Væntandi verður talan um innbodna lisiatión.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

## Ískoyti:
Loyvisviðurskifti
Tilgongdin er væl ávegis og verður vónandi komið á mál við tí í summar.

Forkanningar
Sum liður í at fáa neyvari nøgdarmetingar viðv. økinum hevur Sp/f Munin gjørt sonevndar GEO-kanningar. Frágreiðingin verður væntandi tøk í viku 24.

Ráðgevaraavtala
Við støði í forkanningunum vera í juni samráðingar við Osbjørn Jacobsen/Henning Larsen, Føroya deild um ráðgevaraavtalu.

Útbjóðing
Ætlandi verður arbeiðið boðið út í innbodnari lisitatión so skjótt viðurskiftini omanfyri eru klár. Ætlandi kann arbeiðið byrja í heyst.

Teknisk útgerð
Felagið hevur søkt um at kunna fáa stuðul til at endurnýggja teknisku leirdúgvuskjótiútgerðina. Felagið hevur heintað inn tilboð, ið ljóðar uppá 175 tkr., felagið ynskir ein stuðul á 175 tkr.. Felagið kemur at gera ein egininnsats við niðurtøku av verandi útgerð og uppsetan av teirri nýggju mett til 30 tímar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta felagnum 175 tkr. í stuðli til kastiútgerð at rinda av løgukontu L57033.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

## 144/20 Venjingarhøli í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 92/19 | 19/00423-2 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 01.10.2019 | 2/19 | 19/00423-2 |
| 3 Økisnevndin | 18.03.2019 | 6/19 | 19/00423-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 147/19 | 19/00423-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 7/20 | 19/00423-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 68/20 | 19/00423-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 70/20 | 19/00423-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 21/20 | 19/00423-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 91/20 | 19/00423-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 85/20 | 19/00423-2 |
| 11 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 57/20 | 19/00423-2 |
| 12 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 79/20 | 19/00423-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 211/20 | 19/00423-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 186/20 | 19/00423-2 |
| 15 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 144/20 | 19/00423-2 |

**Upprunin til málið:**
Jákup Dam, býráðslimur.

**Samandráttur:**
Uppskotið snýr seg um at fáa bygt ein minni hjábygning afturat høllini upp á høvuðsinngongdina norðanfyri til at seta upp venjingarmaskinur av ymsum slag til brúk innan ítróttin v.m.

**Lýsing av málinum:**
Sbrt. uppskotinum er hugsanin í fyrsta umfari at fáa planerað, stoypt og takt ein rábygning á umleið 100 m2, ið skal staðsetast uppat verandi hallarbygningi. Síðani er hugsanin, at húsavørður hjá Ítróttaanleggum stigvíst fer undir innrætting av hølinum til venjingarendamál. Harumframt koma fakveitingar innan el- og hvs. Fyribils verður mett, at kostnaðurin fyri tað, sum skal bíleggjast av uttanhýsis veitingum ella tilfari, verður umleið 800 tkr.

Ítróttaanlegg og umsitingin meta, at onnur alternativ eiga at verða umhugsað viðv. umstøðum til venjingarútgerð. Uppat høllini er fimleikahøllin í Kollafjarðar skúla.

Mett verður, at tað ikki er alneyðugt, at skúlin bæði hevur ítróttahøll og fimleikahøll fult út til taks. Ein loysn við venjingarútgerð í parti av fimleikahøllini kundi eisini verið umhugsað, ið haraftrat má metast bíligari loysn.

Tað hevði so gjørt, at skúlin o.o. framhaldandi kundu brúkt fimleikahøllina partvíst til ymisk serstøk høvi, samstundis sum tað ikki verður neyðugt at gera íløgu í uppíbygging av ítróttarhøllini. Á 1. hædd í høllini við inngongdina er eisini ein stór loftshædd. Henda kundi eisini verið innrættað, men mett verður, at tann verkætlanin kostar nakrar mió. kr. vegna brunakrøv, trappuviðurskifti, lyftu v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í Tórshavnar kommunu eru privatar venjingarmiðstøðir, sum heild eigur at vera sýnt ansi viðv. kappingaravlaging.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eingi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Ávís.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tekning av uppskotinum viðv. útbygging av ítróttahøllini.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari við ætlan, har partur av fimleikahøll skúlans verður gjørd til venjingarhøli.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við at byggja ein tilbygning aftrat ítróttarhøllini og beina málið í staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð og økisnevndina.

**Økisnevndin 18. mars 2019:** Samtykt at játta ein part av íløguni kr. 400.000,-, vísandi til raðfestingarlistan sum er gjørdur yvir bygdirnar mál. nr 19/01034. Bergun Kass var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti**
Nú er greitt at Økisnevndin játtar 400 tkr. til verkætlanina, umframt tær 300 tkr. sum eru settar av á kontuni fyri smærri ítróttaanlegg. Tá ávís fígging nú er tøk, er tíðin búgvin til næsta stig, ið er at fáa innheintað tilboð uppá gerð av innlokaðum hjábygningi. Hugsanin er at fáa ráðgeva Ove Mortensen, arktitekt at gera skitsuuppskot, ið verður latið til byggivaldið til góðkenningar. Síðani verður farið undir at bjóða arbeiðið viðv. gerð av innilokaðum hjábygningi út sum undirhondsboð til tveir veitarar. Væntandi tekur tilgongdin at gera skitsuprojekt og at fáa innheintað tilboð til og við mai 2019. Ætlanin er at hetta verkætlanarstigið skal kunnu fremjast fyri í mesta lagi 700 tkr.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fáa gjørt avtalu um skitsuprojekt við Ove Mortensen, ark. og søkja um myndugleikagóðkenning.

b). at bjóða arbeiðið at gera innilokaðan hjábygning út til tveir veitarar sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 01. oktober 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í høllini er loft, sum ikki er gjørt liðugt, og sum kundi verið innrættað til m.a. venjingarhøli og felagshøli annars. Í fyrireikingararbeiðnum hevur tekniska fyrisiting víst á tað óhepna, at nýggjur hølistørvur verður loystur við at byggja høllina út, heldur enn at gera loftið liðugt og útvega ta meirfígging, ið krevst.

Ymsar ætlanir hava verið um at innrætta loftið. Avbjóðingin er fyrst og fremst kostnaður til brunaviðurskifti og atkomu við lyft. Trivnaðarfyrisitingin metir, at loysnir hesum viðvíikjandi eiga at kannast nærri, so at til ber at viðgera innrætting av loftinum sum loysn til venjingarhølið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal fyrireika aðra hølisloysn enn samtykt 8. mai 2019.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Samtykt at halda fast við samtyktina frá 8. mai 2019.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var viðgjørt seinast, hevur Jákup Dam, býráðslimur, biðið um frágreiðing, hvørt tað samanlagt er ein fyrimunur heldur at gera eina loysn inni í verandi hølum á Loftinum, heldur enn at byggja afturat høllini sum annars samtykt.

Umsitingin metir, at ein loysn kann gerast fyri umleið 2.200 tkr. og fevnir tá um innrættan av allari hæddini, tó ikki íroknað lyftu millum hæddirnar. Undantak kann væntandi fáast fyri lyftu í upp til 3 ár.

Sí hjálagt skitsur viðv. innrætting av verkætlan á Loftinum í Høllini.

Ein avbjóðing er at fáa gólvið so mikið stoytdoyvandi, at venjingar við tungum vektum ikki larma óneyðugt og gera stoytskaðar á elskipan v.m. Neyðug atlit verða tikin í tí sambandi í gólvloysnini.

Í løtuni eru 700 tkr. tøkar til endamálið á projektkontu L57029F Venjingarhøli í Kollafirði.
Til at fíggja restina av tørvinum verður í apríl 2020 gjørt tilmæli í sambandi við framflytingar frá fíggjarárinum 2019 í fíggjarætlanini, har restfíggingin kr. 1,5 mió. verður játtað inn á kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum, soleiðis at tað í alt verða 2.200 tkr. Tá er eisini nærri greitt sáttmálaupphædd í høvuðsarbeiðstøkuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini til at samtykkja:
a) at gera venjingarhøli á loftinum í høllini og heimila umsitingini at gera avtalu um projektering við Ove Mortensen, ark. og søkja um myndugleikagóðkenning,
b) at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð og høvuðsarbeiðstøka,
c) at flyta 700 tkr. av projektkonto L57029F Venjingarhøli í Kollafirði til kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum - oyramerkt til hesa verkætlan, og
d) at restupphæddin 1.500 tkr. verður játtað í viðgerðini av framflytingum av játtanum frá 2019 til kontu

Málið verður beint í býráðið um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men biðja umsitingina koma aftur í nevnd við tilmæli viðvíkjandi kostnaði og fígging til gerð av lyft.

**Ískoyti**:
Viðv. kostnaðarmeting fyri lyftu
Umsitingin hevur kannað nærri viðv. kostnaðinum fyri at fáa lyft gjørda.
Mett verður at lyft til 6 persónar, stálkonstruktión kring lyft, brunaverja við lættstáli og gips, GSM moduli og góðkenning hjá Arbeiðseftirlitinum kann útvegast fyri umleið 600 tkr. íroknað kommunalt MVG.

Fígging er ikki tøk til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um lyft skal útvegast til verkætlanina í hesum umfari.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd 10. mars 2020.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at fara undir verkætlanina, so sum lýst í tilmælinum, og at arbeitt verður við at fáa fígging til lyft sum skjótast.

**Ískoytið fígging nágreinað:**
Samlaða arbeiðið verður mett at kosta umleið 2,2 mió. kr.. Hetta verður fíggjað við 700 tkr. av projektkonto L 57029 Venjingarhøli í Kollafirði aðrari konto og 1,5 mió kr. av konto 6811 Áir, yvirflatuvatn og veitir frá 2019 (avlop 2019).

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
22. mai 2020 var licitatión fyri høvuðsarbeiðstøku at gera venjingarhølini. Fimm feløg vóru boðin. Tey vóru:

Sp/f Húsavarðartænastan
Sp/f JEP Smíð
Sp/f Bulur
Sp/f Búsetur
Sp/f Eysturlon

og fylgjandi feløg lótu inn tilboð og við hesum upphæddum:

Sp/f JEP Smíð 2.198.432,07 kr.
Sp/f Búsetur 2.613.962,00 kr.
Sp/f Eysturlon 2.937.643,72 kr.

Eftir at tilboðini eru eftirkannaði, kann staðfestast at Sp/f JEP Smíð hevði lægsta boð á 2.198.432,07 tkr, og at tað uppfyllir krøvini í útbjóðingartreytunum. Ætlandi er, at byrja arbeiðið beinanvegin og skal tað verða liðugt í viku 42, hetta er seinkað í umleið 2 vikur. Sáttmálin verður undirskrivaður ein av fyrstu døgunum.

**Kostnaðarmeting**
Upprunaliga var ætlanin at útinna verkætlanina innan karmarnar á kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum (Húsaumsitingin) Tøk játtan 2.200 tkr. til endamálið er á kontu 5775 ítróttaranlegg L57029 Venjingarhøli í Kollafirði. Útyvir kostnaðin til høvuðsarbeiðstøkuna eru útreiðslur til ymiskar atknýttar útreiðslur mett til umleið 400 tkr, ið er ætlanin at rinda av kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Sp/f JEP Smíð á 2.200 tkr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

## 145/20 Verkløg við Hoyvíksvøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 182/20 | 20/01962-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 172/20 | 20/01962-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 212/20 | 20/01962-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 188/20 | 20/01962-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 145/20 | 20/01962-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt í fíggjarætlanini 2020 løgukonta 5775 upphædd 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við støði í tøku játtanini til vøllin í Hoyvík í 2020 er hóskandi at fáa ásett, hvussu játtanin skal raðfestast fyri 2020. Málið hevur higartil verið viðgjørt í máli 18/00009 Fótbóltsfelagið FC Hoyvík : Felagshús við Hoyvíksvøll og máli 18/03857 Undrið FF : Virksemi og hølisviðurskifti felagsins.

Men av tí at FC Hoyvík trekti aftur umsóknina um fyribils felagshús við Hoyvíksvøll aftur, verður mett meiri yvirskoðiligt at byrja málið av nýggjum.

Felagið skrivaði 27. mai 2020: "Vit fara nú at hugsavna okkum um tað endaligu loysinina, sum Tórshavnar kommuna hevur samtykt at gera í 2021-22 og har kr. 1 mio. er sett av í 2020 til at fyrireika endaligu loysnina."

Lýsing av málinum
Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2020 eru avsettar 1.000 tkr. á løgukontu 5775 til vøllin í Hoyvík. Umframt at tað í útmeldaðu langtíðarløguætlanini er lagt upp til fígging til vøllin í Hoyvík í 2021 og 2022. Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík, t.e. játtan til at útvega fyribils felagsumstøður og aðrar batar á kringumstøður, umframt ætlaðar 10.000 tkr. til 2021 og 15.000 tkr. til 2022.

**Trappur norðanfyri og aðrar fríðkanir**
Ítróttaanlegg hevur gjørt eina fyribils loysn so viðurskiftini eru forsvarligt, men hevði verið ynskiligt at sett minni upphædd av til ymiskar betranir og fríðkanir av økinum í 2020 ella 21. M.a. við støði í máli 20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll.

**Girðing sunnanfyri**
Best var um girðingin var gjørd í 2020 og verður tí mælt til at seta 200 tkr. av av hesi løgujáttan til endamálið saman við somu upphædd á kto. 5717 Ítróttaanlegg. Málið er at arbeiðið er útint í 2020.

**Byggiskrá**
Um ætlanin er at fremja størri byggiverkætlan komandi árini við Hoyvíksvøll við felagshúsi til fótbóltsvirksemi o.a., er hóskandi at fara undir at gera byggiskrá í 2020 ella 21. Hetta kann í høvuðsheitum vera gjørt innanhýsis, men við ávísari ráðgeving. Til endamálið kundu 150 tkr. verið settar av.

**Aðrir tørvin innan ítróttaøkið v.m.**
Mett verður hóskandi at lata ávísa upphædd av hesi løgujáttan vera tøka til møguligar tørvir innan ítróttaøkið. M.a. viðv. máli '19/04413 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur' har ikki øll viðurskifti eru avkláraði enn og kann vera møguligur eykatørvur. Hetta verður ætlandi greitt til komandi eyka fund í nevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at samtykkja at játta 200 tkr. til girðing sunnanfyri
b). at taka støðu til um farast skal undir at gera byggiskrá í 2020 ella 2021 til nýtt felagshús við Hoyvíksvøll til fótbóltsfeløgni og annað viðkomandi virksemi
c). at flyta 1.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við a og c í tilmælinum. B verður tikið upp aftur á seinni fundi.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at byggiverkætlanin Skúlin á Fløtum verður liðug í næstum er ikki longur brúk fyri byggiplásssskúrunum, ið kommunan eigur har á Janusargøtu 15. Talan er um fýra skúreindir á umleið 75 m2 hvør, sum upprunaliga vórðu brúktar sum undirvísingarhøli aftanfyri Sjónleikarahúsið. Harumframt ein vesi-bingja.

Vegna virksemi við og kring Hoyvíksvøll, verður mett áhugavert sum loysn í nøkur ár, at flyta tvær av hesum eindunum og vesi-bingjuna til økið eystanfyri Hoyvíksvøll, at brúka til ymiskan tørv hjá feløgunum og stovnum, ið virka við og kring Hoyvíksvøll, tó ikki beinleiðis sum felagshøli góðkend av FSF sbrt. vallarreglugerðini.

Ítróttaanlegg kann umsita hølini og gera brúksavtalur við viðkomandi feløg og stovnar.

Til at flyta hesar tvær eindirnar og at gera klárt við fundamenti, íbindingum v.m. verður mett at vera tørvur á umleið 250 tkr. Harumframt er neyðugt at søkja um byggiloyvi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 250 tkr. av løgujáttani 5775 ætlað Hoyvíksvølli til verkætlan við tveimum skúreindum við Hoyvíksvøll. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við Mentanmálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Mentamálanevndini og mælur til at onnur, varandi loysn verður funnin á hølisviðurskiftinum við Hoyvíksvøll.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá umboðunum hjá Javnaðarflokkinum: Mælt verður til at finna aðra, varandi loysn á hølisviðurskiftunum við Hoyvíksvøll.

Broytingaruppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marni Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá einari samdari fíggjarnevnd 17. juni 2020 og meirilutanum í fíggjarnevndini 25. juni 2020, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, fimm blonkum og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

## 146/20 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 306/17 | 17/03897-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 2/18 | 17/03897-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 36/18 | 17/03897-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 29/18 | 17/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 18/18 | 17/03897-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 149/18 | 17/03897-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 129/18 | 17/03897-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 83/18 | 17/03897-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 185/18 | 17/03897-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 177/18 | 17/03897-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 206/18 | 17/03897-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 204/18 | 17/03897-1 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 148/18 | 17/03897-1 |
| 14 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 192/18 | 17/03897-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 343/18 | 17/03897-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 329/18 | 17/03897-1 |
| 17 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 267/18 | 17/03897-1 |
| 18 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 309/18 | 17/03897-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.12.2018 | 383/18 | 17/03897-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 376/18 | 17/03897-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 162/20 | 17/03897-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 176/20 | 17/03897-1 |
| 23 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 146/20 | 17/03897-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talið av nýføðingum í 2016 í Tórshavnar kommunu var 21% hægri enn í 2015 (52 børn). Undanfarnu 5-6 árini hevur kommunan tillagað plásskapasitetin til eitt alsamt lækkandi barnatal við tað, at dagrøktarskipanin og virksemið í dagstovninum Vípan eru niðurløgd hesi árini.

Nú er øvugta støða, og tí hevur umsitingin í 2016 og 2017 arbeitt við ymsum loysnum til tess at tryggja øllum pláss. Í vár eru fingin áleið 30 vøggustovupláss, í leigaðum hølum, og við at fremja eina útbygging í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Vegna framhaldandi tørv, hevur umsitingin arbeitt við øðrum loysnum. Til skúlabyrjan 2017/18 er frítíðarskúlin í Hornabø fluttur til felagseind í Kongagøtu, (sí mál 17/00817 Felagseind við skúla og frítíðarskúla í Kongagøtu) fyri á tann hátt at fáa nýggja vøggustovu í Hornabø. Sostatt eru bæði í Kongagøtu og í Hornabø gjørdar tillagingar, soleiðis at tað passar til givna virksemið.

Umframt hesi átøk, hava dagstovnar í kommununi tillagað stovnsins virksemi til tess, at teir hava kunnað tikið fleiri vøggustovubørn inn so hvørt í 2017. Tískil eru so gott sum eingi tøk pláss á dagstovnunum í kommununi.

Snarskivan, ið umsitur plássávísingina, hevur nú boðað barna- og ungdómsdeildini frá, at tørvur er á dagstovnaplássum, bæði vøggustovu- og barnagarðsplássum frá ársskifti 2017/18 at rokna, hetta serliga

vegna tilflyting til kommununa. Í løtuni standa 26 børn á bíðilista til vøggustovu, umframt 10 systkinapør, sum ynskja pláss á sama stovni. Harumframt koma fleiri á lista til eftirfylgjandi mánaðirnar.

Stovnarnir eru sum omanfyri nevnt longu fullir. Til tess at tryggja øllum á bíðilista pláss, verður neyðugt at útvega høli - skjótast. Veitir kommunan ikki pláss, kann Almannaverkið sbrt. forsorgarlógini veita foreldrum
fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, men álagt er kommununi at endurrinda landskassanum hesar útreiðslur. Fyri stakan forsyrgjara vil talan verða um kr. 15.674 um mðr.

Ynskiligt er, at loysnin, sum nú skal finnast, er ein varandi ella langtíðarloysn skilt á tann hátt, at tað er ikki haldbart at leiga og innrætta høli fyri stutta tíð í senn, so sum tað var gjørt í Kirkjustovu frá januar til juni 2017. Hetta er kostnaðarmikið, og haraftrat er torført at fáa starvsfólk til dagstovnaøkið yvirhøvur og uppaftur torførari til eitt so stutt tíðarskeið.

Stutttíðarloysnir hava eisini tann vansa, at vøggustovubørn skulu flyta umhvørvið og kvetta relatiónir við vaksin, sum tey hava kent í 6 mðr. til aftur at skapa nýggjar relatiónir, tá tey vera flutt.

Umsitingin er farin í gongd við at finna høli.

Eitt uppskot kundi verið vøggustova og barnagarður í gamla realskúlanum. Í umhvørvinum í Kongagøtu eru góðir møguleikar til útivirksemi, bæði spælipláss í garðinum við Móttøkuhúsinum og spæliplássi í Grasagarði, umframt at tað virksemið, sum er ætlað fyri fimleikahøllina í Finsen, gagnligt fyri dagstovnatilboðið.

Virksemið í felagseindini í Kongagøtu kann eisini verða til gagns fyri vøggustovu- og barnagarðsvirksemi. Tað eru gjørdar tillagingar til frítíðarskúla virksemi í húsinum hjá Frk. Chor, sum eisini kann verða til gagns fyri dagstovnatilboðið fyrrapartin av degnum.

Fyrimunur er, at kommunan eigur bygningin og tískil er eingin leiga, men hølini skulu klárgerast, og óvist er, hvat tað kostar.

Aðrar loysnir kundi verið sethús, men tann marknaðurin er ikki lættur at koma framat í løtuni uttan stóran kostnað.

Undir øllum umstøðum verður neyðugt at útvega fígging, so at kommunan kann veita neyðugu plássini og ansingina, alternativt veita endurgjald fyri vantandi barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar | Fyri ávís økir í | Fyri ávísar samfelagsbólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini boða nevndini frá plásstørvi og harvið fíggjartørvi til høli og rakstur, evt. endurgjald fyri vantandi barnaansing sbrt forsorgarlógini, og at umsitingin arbeiðir við loysnum at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Dags dato er tørvur á 46 vøggustovuplássum og 17 barnagarðsplássum pr. 1. februar 2018.

Sum lýst omanfyri til fundin 29. november 2017 er arbeitt við at fáa til vega bráðfeingispláss og meira varandi loysnir.

Bráðfeingis ber til at skipa eina fyribils vøggustovu í gamla skúlanum á Hvítanesi. Har kunnu fáast til vega 10-12 pláss. Hetta er roynt áður, og ætlanin er, at leiðslan í Birkilund tekur sær av tilboðnum, ið er skjót at seta í verk. Staðbundna nevndin á Hvítanesi hevur givið samtykki til ætlanina treytað av, at ljósviðurskifti kring skúlan verða fingin í rættlag, at tað er væl frámerkt, hvar bilar til og frá skúlanum skulu parkera í bygdini, og at skelti verða sett upp í bygdini um, at ansa eftir børnum, ið spæla.

Harumframt verður stovnurin í Hornabø, sum byrjaði í august 2017, fyltur skjótari enn ætlað, so har verða 10-12 børn tikin inn.

<u>Realskúlin</u>
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um at skipa part av gamla realskúlanum til dagstovn sum

Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Seinastu árini hava ov fá pláss verið í miðbýnum. Staðsetingin er tískil góð í mun til afturvendandi tørvin á fleiri plássum í miðbýnum.

Við ávísum tillagingum kann realskúlin gerast dagstovnur við ml. 30-54 plássum alt eftir, hvussu stóran part av bygninginum, ið brúktur verður til endamálið, og hvussu samansetingin ml. vøggustovu- og barnagarðsbørn er.

Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03883 Skúlin á Fløtum hølisviðurskifti (Realskúlin).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða ætlanina við dagstovni í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt og nevndin tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini at skipa Realskúlan til dagstovn.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina frá undanfarna nevndarfundi. Víst verður somuleiðis til uppskot um fígging at gera realskúlan kláran til dagstovn, mál 17/03656.

Í løtuni verða neyvari kostnaðarmetingar gjørdar við støði í tilboðsprísum. Ætlandi flytur Heilsuhúsið út komandi vikurnar soleiðis, at partur av realskúlanum kann takast í nýtslu sum dagstovnur umleið hálvan februar. Restin av realskúlanum verður tikin í nýtslu, tá allur bygningurin er tøkur og so hvørt tillagingarnar eru gjørdar. Harumframt verða høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum.

Til tess at kunna seta tillagingararbeiðini í gongd, og til tess at kommunan kann bjóða foreldrum nýggju plássini út, er neyðugt at staðfesta endaliga, at dagstovnur skal skipast í realskúlanum.

Nærri yvirlit yvir, hvussu aktuelli plásstørvurin verður loystur, verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er framvegis støðugt trýst á kommununa um at veita fleiri dagstovnapláss. Hóast fleiri tillagingar eru gjørdar og aðrar ávegis soleiðis, at fleiri pláss eru komin á dagstovnaøkinum, so er avbjóðingin ikki bast, um hugt verður fram til várið 2019.

Við nýútvegaðu plássunum í gamla realskúlanum kann væntast, at tey, ið d.d. eru á bíðilista, fáa bjóðað pláss til ynsktu tíð í august 2018, hetta tó treytað av, at allur bygningurin verður nýttur til dagstovnavirksemi.

Hetta loysir bráðfeingisavbjóðingina til august, men eingi pláss eru frá september. Vanliga mynstrið er, at ml. 60 og 90 børn leggjast aftrat tíðarskeiðið september-mai.

Vísandi til ætlanina, at Skúlin á Fløtum flytur úr brúna skúla í Fríðriks Petersensgøtu (sí mál 17/03883), er møguleiki at brúka bygningin til dagstovn frá sumrinum ella so skjótt til ber at hava bygningin kláran. Mett verður, at hetta er góður "buffari" at fylla upp so hvørt tørvur er á dagstovnaplássum tíðarskeiðið fram móti jólum alt eftir, hvussu nógv børn rúmast har.

Alneyðugt er tó eisini at taka avgerð um meira framtíðartryggjaðar loysnir, so henda bráðfeingisstøða, har nýggjar fyribilsloysnir er einasti handlimøguleiki, ikki gerst vanliga støðan.

Í fyrireikingararbeiðinum til talgildu plássupptøkuskipanina, sum fer at geva umsitingini munandi betri møguleika at staðfesta plásstørv mánaðir fram í tíðina, og í arbeiðinum at gagnnýta møguliga tøkan plásskapasitet á dagstovnaøkinum, hava barna- og ungdómsdeildin og húsaumsitingin pláss-skrásett allar stovnar og stovur. Hetta er gjørt eisini í mun til nýggju bygningskunngerðina, sum vísir á minsta mark fyri fermetrum til hvørt barn á dagstovni/stovu, og í mun til námsfrøðiligt viðmæli um bólkastødd av børnum í dagstovnaaldri.

Henda gjøgnumgongd vísir, at onkrir stovnar hava heldur stórt barnatal, meðan aðrir kunnu rúma fleiri børnum, verða ávísar tillagingar gjørdar. Henda støða, har onkrir stovnar skulu hava færri børn enn í dag, eigur at takast við, tá ið samlaði plásstørvurin verður viðgjørdur. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

Niðanfyri verður víst á loysnir:

1. Til tess at basa bráðfeingistørvin, ið er, og sum aftur kemur á heysti 2018:
   - At allur gamli realskúlin verður nýttur til dagstovnavirksemi. Realskúlin hevur í løtuni 21 pláss. Tá allar tillagingarnar eru lidnar, rúmast bygningurin í mesta lagi 68 børnum, hetta veldst um samansetingina av vøggustovu- og barnagarðsbørnum.
   - At brúni skúli verður tillagaður og nýttur til dagstovnavirsemi frá heysti 2018. Í løtuni verður kannað, hvussu nógvum børnum, ið brúni skúli kann rúma, hvat krevst av tillagingum, og hvat tað verður mett at kosta, men roknast kann helst við trimum stovum. Eisini verður kannað, hvørt bygningurin er egnaður sum ein varandi loysn, ella um hetta er at meta sum ein fyribilsloysn.
   - At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribils loysn. Loysnin er á Hvítanesi er væl umtókt og kann halda fram uttan stórvegis tiltøk.

2. Til tess at fáa til vega fleiri pláss við at tillaga innrætting á nøkrum stovnum:
   - At arbeitt verður víðari við uppskotunum um tillagingar í innrætting.
   - At avbjóðingin, ið ávísir stovnar hava við barnatalinum, verður umrødd og atlit tikið til tað yvir tíð, harundir ávís býlingshús og Kurla.

Sum omanfyri lýst eru allir verandi dagstovnar gjøgnumgingnir av barna- og ungdómsdeildini og húsaumsitingini til at meta um, á hvørjum stovni tað ber til at gera tillagingar í innrætting, so stovnurin kann rúma fleiri børnum. Burturúr hesum eru komin ymisk uppskot uppá tillagingar at økja plásskapasitetin. Fyrimunur við hesum er, at einstaka rakstrarstaðið fær betri rakstrargrundarlag, og at bygningarnir verða fullnýttir við nýggjum varandi plássum, heldur enn at økja um talið av bygningum/rakstrarstøðum.

Enn vantar at kostnaðarmeta uppskotini, sum aftur er grundarlag fyri eini raðfesting, har hetta loysir seg best. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

3. Til tess at framtíðartryggja plásskapasitetin við út- og nýbygging, har tað eisini verða fingin til vega nýggj varandi pláss (íløgur):

- At arbeiða víðari við uppskoti um at byggja nýggjan og størri dagstovn á Argjum í staðin fyri verandi dagstovnin á Argjum.
- At arbeiða víðari við uppskoti at tillaga Skúlan í Kongagøtu til varandi miðbýarstovn, tá bygningurin verður tøkur summarið 2020.

Nýggj varandi pláss er fortreyt fyri, at tað støðugt skal bera til at veita foreldrum plásstrygd. Harumframt er tað fortreyt fyri endurnýggjan av ótíðarhóskandi plássum, har antin bygningurin eigur at verða saneraður sum dagstovnur ella er ikki egnaður á annan hátt.

Uppskot fyriliggur uppá útbygging av dagstovninum á Hamrinum á Argjum. Treytað av, at nýtt lendi verður lagt aftrat verandi grundøki, kann fáast ein vøggustova og eina barnagarðsstova afturat. Kostnaðarmeting uttan lendiskeyp er nakað yvir kr. 10 mió. Til ber eisini at byggja dagstovnin í Maritugøtu út við einum vognrúmi, sum leysgevur annað høli á stovninum til 10 nýggj vøggustovupláss. Hetta uppskot er ikki kostnaðarmett enn. Metast má, at eisini aðrir stovnar við fyrimuni kunnu byggjast út, og eigur hetta at verða kannað ítøkiliga beinanvegin, íroknað kostnaðarmeting og raðfesting.

Mentamálanevndin hevur áður fingið lagt fram uppskot til nýggjan og væl størri dagstovn á Argjum (mál 17/03943) lutvíst til at endurnýggja ótíðarhóskandi stovnspláss/bygning og til at útvega uml. 40 pláss fleiri (samlaður plásskapasitetur sbrt. uppskotinum 112). Kostnaður uml. kr. 35 mió. Til ber ikki einki at gera, tí verandi stovnur krevur stórar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020 og flutt verður úr skúlanum í Kongagøtu, er uppskot, at bygningurin verður gjørdur um til dagstovn at koma í staðin fyri realskúlan, sum ætlandi er fyribilsloysn. Mett verður, at bygningurin rúmar 100-120 børnum alt eftir samansetingini av vøggustovu- og barnagarðsbørnum. Fyrimunur er, at bygningurin rúmar øllum børnunum í realskúlanum umframt t.d. Kurlu ella brúna skúla, verða hesi niðurløgd. Bygningurin í Kongagøtu er nýggjur og í góðum standi, og mett verður ikki neyðugt við stórum tillagingum.

Fyrimunur við hesum uppskoti er, at kommunan sleppur undan íløgu í nýggjan dagstovn, ið ikki verður minni enn tær kr. 35 mió, sum nýggi dagstovnurin á Argjum verður mettur at kosta, og mett verður ikki sannlíkt, at kommunan byggir tveir stovnar við uml. 100 plássum í senn, hóast plásstørv.

<u>Fíggjartørvur:</u>
Til tess støðugt at fáa til vega nýggj pláss, tað verið seg við smærri tillagingum í innrætting, útbyggingum og nýbyggingum, er neyðugt at raðfesta fígging til endamálið bæði í rakstri og íløgum. Umsitingin kemur við neyvari greining av tørvi, so hvørt uppskotini verða kostnaðarmett og raðfest. Roknast kann við nýggjum fíggjartørvi í inniverandi ári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
- At allur realskúlin verður dagstovnur í minsta lagi fram til árskiftið 2020/21.
- At brúni skúli verður dagstovnur frá august 2018 í minsta lagi fram til árskiftið 2020/21, og at umsitingin ger neyvari meting um kostnað at gera bygningin kláran til dagstovn at leggja aftur fyri nevndina.
- At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribilsloysn.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at samtykkja:
- At umsitingin leggur fram neyvari raðfesting av tillagingarmøguleikum í innrætting á dagstovnum, har tað verður mett at hava fyrimun at økja plásskapasitetin.
- At heimild verður latin umsitingini at fáa til vega ítøkilig og kostnaðarmett uppskot til útbyggingar av verandi stovnum.
- At prinsipiell støða verður tikin til uppskotið, sum lagt er fram um bygging av nýggjum og størri dagstovni á Argjum, og at fáa fígging til vega í langtíðaríløguætlanini.
- At taka prinsipiella støðu til, at skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til varandi dagstovn eftir

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teim fyrstu seks tilmælunum, og at fara undir eina tilgongd at avgera, hvat skúlabygningurin í Kongagøtu skal brúkast til.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmæli og samtyktir omanfyri.

Høvuðsavbjóðing júst nú er:
- At tað eru ov nógv børn inni á fleiri stovnum
- At nettotilflytingin av børnum undir skúlaaldur eftir øllum at døma hevur verið serliga stór í 2017
- At rættiliga stórur bíðilisti er eftir plássum longu frá august

Hetta lagt saman gevur ein tørv á plássum svarandi til ein miðal árgang í aldrinum 0-7 ár.

Raðfestast má í fyrsta lagi at útvega nýggj pláss, áðrenn til ber yvir tíð at lækka barnatalið á ávísum stovnum.

Staðfest er, at realskúlin verður ikki allur tikin í nýtslu fyrr enn 1. november 2018, tí arbeiðið verður ikki liðugt fyrr enn tá. Í løtuni eru 25 børn í realskúlanum, men væntast kann ikki, at hini uml. 40 plássini eru tøk fyrr enn í november. Ætlandi er realskúlin fyribils loysn tvey ár fram, tvs. hesi skulu endurútvegast í seinasta lagi um tvey ár. Brúni skúli kann, um arbeiðið fer í gongd nú í summar, væntandi verður klárur at taka í nýtslu í januar 2019. Har eru 64 varandi pláss.

Støðan ger, at arbeiðast mugu við fleiri loysnum í senn og tað beinanvegin.

Gjørd eru nú uppskot og fyribils kostnaðarmetingar uppá tillagingar í Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, sum samlað geva 44 pláss (24 VG og 20 BG) fyri uml. kr. 2,5 mió handverkaraútreiðslur, tvs uttan mvg, byggiharraútreiðslur, innbúgv v.m.

At tillaga Brúna skúla við neyðugum útbyggingum av vognrúmi, vognskúri, svala (útgongdum frá stovum), innrættingum í stovnunum, liðugt gjørt útiøki v.m. er mett til kr. 6,3 mió – í hesum føri er allar byggiharraútreiðslur íroknaðar.

Hesar fýra verkætlanirnar geva sostatt 108 varandi pláss fyri uml. kr. 10 mió í íløgum, og kunnu allar verða lidnar komandi 6-7 mánaðirnar, verður arbeiðið byrjað nú.

Verður skúlin í Kongagøtu gjørdur um til dagstovn um 2-2,5 ár, so verða 100 pláss aftrat fyri ta upphædd, ið tillagingarnar kosta – í tí førinum mest smærri innrættingar.

Dagstovnurin á Argjum er størri íløguætlan, har tað í fyrsta umfari snýr seg um at framtíðartryggja verandi 70 plássini við at byggja nýggjan og størri stovn, har tað kunnu fáast uml. 33 pláss aftrat. Kostnaðarmetingin fyri uppskotið til bygning, ið lagt er fram í mentamálanevndini, er uml. kr. 35 mió, men hetta skal viðgerast neyvari. Tó eigur upphædd til neyvari verkætlanarfyrireikingar og prosjekting at verða fingin til vega skjótast og helst í inniverandi ári, so at møgulig bygging kann byrja næsta ár.

Øll hesi átøk, har plássini í skúlabygninginum í Kongagøtu og nýggja Dagstovninum á Argjum tó ikki kunnu roknast við fyrr enn í 2020/21, samstundis sum plássini í realskúlanum tá ætlandi detta burtur, geva í alt 176 pláss.

Trygd er ikki fyri, at hetta er nokk, men innanfyri komandi 6-8 mánaðirnar eru tó við uppskotunum omanfyri sannlíkindi fyri, at til ber at hava 148 nýggj pláss tøk (Velbastað 20 BG, Maritugøta 12 VG, Inni á Gøtu 12 VG, Brúni skúli 64, Realskúlin 40).

Kollafjørður:
Plásstrot er eisini á Dagstovninum Kura í Kollafirði. Barnatalið er hækkað nakað síðstu árini, og ábendingar eru um framhaldandi vøkstur í barnatalinum. Møguleikar at byggja Kuru út við eini vøggustovu og eini barnagarðsstovu eiga tí at kannast, umframt at frítíðarskúlin og ungdómstilboðið halda til í lutvíst leigaðum hølum, ið ikki longur eru hóskandi. Kommunan kundi sum fyribils loysn tikið upp samband við samkomuna Zion, ið er beint við, við tí endamáli at leiga og innrætta kjallaran til dagstovn, og annars hava felags garð við Kuru. Hesi pláss kunnu sostatt útvegast yvir rakstur.

Onnur atlit:
Tá so stórt fokus er á bráðfeingis tørvin, so eigur at verða mint á onnur atlit, ið eisini hava við sær øktan plásstørv og harvið fígging. Dagstovnurin í Kaldbak er eisini við at vera ov lítil. Dagstovnurin í Løkjatúni hevur ikki nøktandi umstøður til vognar, kjallarahæddin í Býlingshúsinum í Norðasta horni skal umvælast og kundi hýst nýggjari barnagarðsstovu, Býlingshúsið á Ternuryggi manglar vognrúm, og Stella Maris hevur tørv á tillagingum, tí bygningurin er gamal.

Onnur vaksandi avbjóðing eru børn við “serligum serligum” tørvi. Hetta eru børn, sum ikki kunnu vera í vanligu stovunum á dagstovnaøkinum vegna heilsuvanda eitt nú í mun til smittu, ella hava umfevnandi menningaravbjóðingar. Her kunnu smærri rúm á ávísum stovnum setast av til hetta, men sum kann ávirka vanliga plásskapasitetin.

Til slík atlit eigur ein føst upphædd, t.d. kr. 1 mió, at verða sett av árliga á kontu 3214 broytingar og minni umvælingar.

Fígging:
Arbeiðið við realskúlanum er fíggjað, men tað eru hinar ætlanirnar ikki.

Størsta arbeiðið í mun til loysnirnar her og nú er Brúni skúli. Her er møguligt at flyta kr. 6 mió av íløgujáttanini, sum ætlað er til musikkskúlabyggingina í ár, tí roknað verður har við minninýtslu í ár. Hetta hevur sostatt ikki avleiðing fyri musikkskúlabyggingina, men krevur tó, at upphæddin verður játtað aftur til musikkskúlabyggingina í 2019.

Verkætlanirnar á Velbastað, Maritugøtu og Inni á Gøtu hava onga fígging. Her mugu útvegast ml. kr. 3-3,5 mió til endamálið.

Eingin játtan er sett av til verkætlanarfyrireikingar og prosjektering av nýggjum Dagstovni á Argjum. Mett verður, at neyðugt er við kr. 3,5 mió til endamálið til tess at menna prosjektið fram til útboð (mál 17/03943).

Spurningurin um framtíðina hjá skúlabygninginum í Kongagøtu má takast skjótast.

Verður hann ikki dagstovnur, má annar stovnur í miðbýnum byggjast og arbeiðið at fyrireika prosjekt tí byrja beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 6 mió til at út- og umbyggja Brúna skúla til dagstovn, íroknað at gera útiøkið líðugt, og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og

5175 Musikkskúlin løgukarmur L0001 til løgukontu 3175 barnaansing, sum verður at játtað musikkskúlaverkætlanini aftur í fíggjarætlanini 2019.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at taka undir við uppskotunum um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið við at umraðfesta í íløguætlanina fyri 2018, og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla somuleiðis til at játta kr. 3,5 mió til prosjektfyrireikingar v.m. av nýggjum Dagstovni á Argjum við umraðfestingum í íløguætlanini fyri 2018, og í hesum sambandi at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla eisini til at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningin teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

At enda mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til endaliga støðutakan um skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til dagstovn eftir 2020, og um ikki, so at játta fígging kr. 1 mió til at seta í gongd prosjektfyrireikingar v.m. til bygging av nýggjum dagstovni í miðbýnum, og í hesum sambandi at at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018**: Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera brúna skúla um til dagstovn og játta kr. 6 mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L00001 til løgukontu 3175 barnaansing, og í hesum sambandi heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Málið beinast í býráðið um fíggjarnevndina.

Harumframt samtykt at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningi teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

Vent verður aftur til hini tilmælini á seinni fundi.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, stemma blankt og krevja málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotini til síðsta mentamálanevndarfund um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu til tess fáa 44 nýggj dagstovnapláss at nøkta part av bráðfeingis plásstørvinum, og sum mett verður kosta kr. 3,5 mió at fáa til vega. Til henda fund var tó ikki møguligt at ávísa fígging.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 ætlað umlættingar- og rehabiliteringsdepli, tí roknað verður við, at henda verkætlanin hevur ikki tørv á allari játtanini í ár. Hetta hevur sostatt ikki nakra avleiðing fyri verkætlanina í ár, men krevur tó, at umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (L27011) hesa játtan aftur sum part av samlaðu íløgujáttanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Tikið av skrá vísandi til, at nevndarlimir hava kravt málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til síðsta ískoytið og tilmælið omanfyri um at játta kr. 3,5 mió til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Sambært nýggjum kostnaðarmetingum verður játtanartørvurin helst um kr. 5,5 mió.

Mett verður, at fyri tær kr. 3,5 mió ber í øllum førum til at fremja tvær av ætlanunum, men til ber ikki at staðfesta endaliga kostnaðin fyri allar ætlanirnar fyrr enn tilboðskostnaðurin fyriliggur eftir útboð. Mett verður tí skilabest, at umsitingin við støði í innkomnu tilboðunum raðfestir ætlanirnar, ið kunnu fíggjast innanfyri kr. 3,5 mió, og at møgulig fígging til triðju ætlanina verður reist antin sum eykajáttanarmál í 2018 ella sum partur av fíggjarætlanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 til løgukontu 3175 barnaansing til endamálið.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælir til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018**: Ein meiriluti Annika Olsen, Turið Horn og Gunvør Balle tekur undir við samtyktini í Mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein mælir til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Umframt verður víst á tað, ið minnilutin í Mentamálanevndini vísir á.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

Uppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í mentamálanevndini tann 6. juni 2018 og samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini tann 20. juni 2018, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang, Helena Dam á Neystabø , Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus

Blankt atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen.

**Býráðsfundur 30. august 2018**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtyktina 30. august 2018 um at játta kr. 3,5 mió til at gera tillagingar á trimum dagstovnum hetta til tess at fáa til vega fleiri dagstovnapláss.

Byrjað er við at bjóða út arbeiðini viðvíkjandi Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Nú tilboðini eru komin inn kann staðfestast, at fíggingin røkkur ikki til meira enn aðra verkætlanina. Tilboðið uppá Maritugøtu er uml. kr. 3,1 mió og uppá Inni á Gøtu kr. 2,4 mió mvg íroknað, men ikki aðrir projektkostnaðir, ið roknast til uml. kr. 0,5 mió.

Samlaður kostnaður verður kr. 6 mió, og fíggjartørvur til at fáa framt báðar hesar verkætlanirnar er sostatt kr. 2,5 mió.

At munurin á kostnaðarmeting og tilboðum er so stórur skyldast fyri stóran part, at kostnaðarmetingin er gjørd tíðliga í tilgongdini, og at verkætlanirnar eru mentar so hvørt bæði sambært tørvi og krøvum.

Avbjóðing hjá kommununi er, at hesi nýggju plássini í Maritugøtu og Inni á Gøtu eru bókað hjá børnum at byrja februar/mars. Tað er sostatt neyðugt at fáa hesi arbeiði í gongd.

Í býráðnum liggur ein eykajáttan til íløgur at útvega fleiri dagstovnapláss, sí mál 18/03937 Flyting millum kontur á grein 3, har ætlandi kr. 2,5 mió verða játtaðar til kontu 3175 Barnaansing (íløgur). Henda kann játtast inn á løgukontu L31009 Tillagingar á dagstovnum. Avgerð um tað verður at gera í máli 18/03937.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fremja verkætlanirnar viðvíkjandi Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu fyri ein samlaða játtan uppá kr. 6 mió á kontu 3175 Barnansing L31009 og heimila umsitingini at gera neyðugar sáttmálar.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið við arbeiðstakaran, sum umbyggir Brúna skúla til dagstovn, til tess at framskunda umbyggingina soleiðis, at stovnurin er klárur at taka børn inn 1. mars heldur enn 1. mai. Samlaði meirkostnaðurin stavar serliga frá eyka arbeiðstímum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 1,5 mió av løgujáttan 3175 Barnaansing fyri 2019 til løgukontu L31008 Umvæling av Brúna skúla til dagstovn og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanirnar at gera Brúna skúla (Fríðriksgarð) til dagstovn, løgukonta 31008, og tillagingarnar av Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum inni á Gøtu at økja talið av dagstovnaplássum, løgukonta 31009, eru lidnar.

Verkætlanirnar hava gingið væl og kunnu nú gerast upp og málini lokast.

Á løgukontu 31008 Brúni skúli er eitt avlop uppá kr. 196.900.

Á løgukontu 31009 Tillagingar av dagstovnum er ein meirnýtsla uppá kr. 126.080.

Samlað úrslit eitt avlop kr. 70.820, ið fellur aftur til løgukarmin konta 3175 Barnaansing (íløgur).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at loka 3175 L31008 Brúni skúli og 3175 L31009 Tillagingar av dagstovnum og flyta samlað avlop kr. 70.820 á løgukarmin konta 3175 Barnaansing (íløgur).

Málið at beina í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Kunnað varð um málið og beitt í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

## 147/20 Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingadalsvegin 2. stig (2013-2048)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 16/16 | 16/00460-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 76/16 | 16/00460-5 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 51/16 | 16/00460-5 |
| 4 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 111/16 | 16/00460-5 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.04.2017 | 25/17 | 16/00460-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 88/17 | 16/00460-5 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 127/17 | 16/00460-5 |
| 8 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 26/20 | 16/00460-5 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 180/20 | 16/00460-5 |
| 10 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 147/20 | 16/00460-5 |

**Málslýsing:**
Nú ið fyrsti partur av býlingavegnum er gjørdur og handaður kommununi, eigur støða at verða tikin til, hvørt haldast skal fram við vegagerð á teimum umleið 120 metrunum, sum eru eftir at gera, frá íbindingini í útstykkingina hjá Sp/f Barni Poulsen, Baraldsgøta og fram til Villingardalsvegin.

Fyrsti partur av vegnum er gjørdur eftir prosjekti frá HMP-consult (j. nr. 2012-1353/1) fyri umleið kr. 14.000,- fyri meturin. Prosjektuppskot frá UP-Verkfrøði tókt (j. nr. 2010-1960/6), fyri tann partin av vegnum, sum eftir er at gera fram til íbinding í Villingardalsvegin.

Eingin kostnaðarmeting er tøk fyri henda seinna partin av vegnum, men av tí at stórur jarðarmunir eru móti grannaognunum á báðum síðum, sum krevja lutfalsliga høgar stuðlamúrar, má roknast við munandi størri metur kostnað enn á undanfarna parti. Við einum meturprísi álj. kr. 21.000,- til 25.000,- verður samlaði kostnaðurin fyri hetta vegastrekkið uppá ca. 130 m mettur til umleið 2,7 til 3,2 mió. kr.

Eftir prosjektuppskotinum, verða eisini umleið 25 ferðmetrar av lendi, at útvega hvørjumegin vegamótið við Villingardalsvegin burturav ávikavist matr. nr. 1363p og matr. nr 1362b. Harumframt nakrir fáir fermetrar av matr. nr. 1362b, Tórshavn.

Mett verður, at tað er umráðandi at fara undir vegaarbeiðið, áðrenn tað verður bygt ov tætt við markið til ætlaða vegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 250.000,- av markaðum íløgukørmum fyri vegir í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini fyri 2014 til at gera liðugt prosjekt og útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndina aftur, við støði í fyriliggjandi prosjektuppskoti frá UP-Verkfrøði og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Á íløguætlan kommununnar fyri 2016, eru avsettar kr. 2 mió. til dagføring av Sundsvegnum.

Neyðugt er at dagføra Sundsvegin millum verandi rundkoyringar í einum og røkkur nevnda upphædd tí ikki til hesa dagføring.

Av tí at neyðugt verður at steingja Sundsvegin, tá hesin verður dagførdur, kann avsetta upphæddin við fyrimuni verða nýtt til at bøta um trongu ferðsluviðurskiftini, sum gerast millum Vegin Langa og Vestara Ringveg, meðan dagføringararbeiðið fer fram.
Hetta kann gerast við at gera býlingavegin millum Blómubrekku og Villingadalsvegin lidnan, soleiðis at onnur farleið eisini er tøk, meðan Sundsvegurin verður dagførdur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 2 mió. kr. av íløgujáttanini fyri 2016 til dagføring av Sundsvegnum (kto. 8175) til at gera liðugt prosjekt at seta í útboð við innbodnari lisitatión, og at beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum vísandi til at hetta letur upp fyri at fjarhiti sleppur oman í býin.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til at dagføra Sundsvegin soleiðis, at fjarhitin kann fáast longur oman í býin og at heita á fíggjarnevndina at útvega størri játtan til endamálið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot til gerð av býlingavegnum er tøkt frá ráðgeva (sí j.nr. 16/00460-9).
Við støði í nevnda prosjektuppskoti eru grannarnir framvið ætlaða vegnum kunnaðir um vegagerðina og í hvønn mun komið verður inn á teirra øki í sambandi við grevstur o.a. og at nærri skrivligar avtalur verða at gera í hesum sambandi, áðrenn arbeiðið byrjar.

Grannarnir hava havt høvi at gera viðmerkingar til ætlaðu vegagerðina á kunningarfundum og hevur ein av grannunum eftirfylgjandi vent aftur við skrivligari áheitan um at ætlaði vegurin verður broyttur framvið hjá teimum.

Í sambandi við at neyðugt er at umskipa verandi vegamót/atkomu frá Villingadalsvegnum til matriklarnar 1363c, 1363q og 1363r, eru samráðingar við arvingarnar til vegøkið matr. 1363p, um at kommunan yvirtekur vegøkið.

Eisini eru samráðingar við ánararnar av matr. nr. 1363c um marknaumskipan í sambandi við ætlaða nýggja vegamótið móti Villingadalsvegnum.

Tekniska nevnd 29. november 2016: Kunnað varð um málið.

Avtalur um lendi til vegagerðina eru fingnar í lag og hevur ráðgevi vegna kommununa sett arbeiðið at gera býlingavegin í útboð til hesar arbeiðstakarar:

- Articon P/f
- J&K Petersen P/f
- TG-Verk P/f
- Andrias Berg Sp/f
- Maskinkoyring Sp/f

Tilboð og tilmæli verða tøk til nevndarfundin tann 4. apríl 2017.

Tríggir arbeiðstakarar lótu inn tilboð uppá arbeiðið at gera býlingavegin og vóru tilboðsupphæddirnar hesar:

- Articon P/f kr. 3.987.914.-
- Andrias Berg Sp/f kr. 3.975.817,-
- Maskinkoyring Sp/f kr. 5.608.030,-

Ráðgevi kommununnar, Sp/f Ráð hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Sp/f Andrias Berg.

Við støði í tilboðnum frá Andrias Berg Sp/f hevur umsitingin mett samlaða kostnaðin fyri vegagerðina til kr. 5.589.979,-, tá MVG, trygging, óvæntað v.m. er íroknað (j.nr. 16/00460-16).

Tøk játtan til verkætlanina er kr. 1.890.000,- og íresta tí kr. 3.700.000,- fyri at farast kann undir vegagerðina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 3.700.000,- afturat til verkætlanina av íløgukarminum til vegir í 2017, at heimila verður umsitingini at gera sáttmála við Andrias Berg Sp/f um gerð av arbeiðinum og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera býlingavegin millum Blómubrekku og Villingadalsvegin gekk sum ætlað og varð handað kommununi til ásetta tíð tann 27. mars 2018.

Endalig uppgerð av arbeiðinum er komin í drag, orsakað av at tað hevur tikið væl av tíð at enda matrikuler viðurskifti fram við vegnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At loka verkætlanina L811023 Býlingavegur Blómubrekka/Villingadalsvegur 2. stig.
2. At avlopið kr. 4.980,- verður flutt á konto 8175, L810001 Løgukarmur fyri vegir 2020.
3. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Kunnað varð um málið og beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

# 148/20 Umsókn um keyp av uppískoytisstykki av matr. nr. 3a til matr. nr. 1oe, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 115/18 | 18/01471-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 88/20 | 18/01471-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 179/20 | 18/01471-2 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 148/20 | 18/01471-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Búnaðarstovan biður um ummæli til at selja eitt uppískoytisstykki á 650 fermetrar til matr. 1oe av matr. 3a Hoyvík.

- Matr. 1oe liggur sum eitt vinnustykki á Hjalla og er 4.766 til støddar
- Matr. 3a liggur sum eitt festi.

Økini, sum søkt verður um, liggja í tveimum byggisamtyktum 1oe liggur í B7 til vinnustykkir og 3a liggur í 4. Grundumráði til landbúnað í almennu byggisamtyktini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**§ 25. Ásetingar fyri 4. Grundumráði**

1. 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

    a) Tó er loyvt at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.

    b) Á jarðarstykkjum omanfyri 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja tilsamans 60 m² í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 m² gólvvídd.

    c) Á jarðarstykkjum undir 5.000 m² er í mesta lagi loyvt at byggja tilsamans 30 m² gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.

    d) Eisini er loyvt at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.

**§ 14. Ásetingar fyri umráðispart B7 í 3. grundumráði**
1 Loyvt er einans at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 5 til 7 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

4 Byggistigið má ikki fara upp um 0,4

5 Rúmmálið á húsunum má ikki fara upp um 2,5 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum.

6 Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 13 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
onki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
onki

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 5-7

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
ongar

**Skjøl**
Umsókn frá Búnaðarstovuni j.nr. 18/01471-1
Kort frá kortal 18/01471-3
Kort frá kortal 18/01471-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi leiðarin á byggideildini mæla frá at viðmæla umsóknina, at Búnaðarstovan selur eitt uppískoytisstykki á 650 fermetrar, vísandi til at partar av økinum sum ætlanin er at keypa liggur í 4. grundumráði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Nýggj umsókn er komin um at keypa eitt uppískoytisstykki umleið 650 fermetrar av matr. 139a frá Búnaðarstovunu til at leggja saman við 1oe á Hjalla.

Almenna byggisamtyktin er nú broytt eftir umsókn frá eigaranum av matr. 1oe á Hjalla frá 4. grundumráði til B7.

Tað er ein treyt fyri at Búnaðarstovan selur uppískoytisstykki, at ein byggilinja skal ásetast í skeytið, sum er 12 m frá markinum móti norðan og 6 metur frá markinum eystureftir.

Ætlanin er, at uppískoytisstykkið á 650 fermetrar skal leggjast saman við matr. 1oe av matr. 3a Hoyvík og kemur soleiðis at verða partur av einari kommunalari útstykking. Tað er tí umráðandi, at Tórshavnar kommuna keypir økið frá Búnaðarstovuni, fyri at selja tað víðari til umsøkjaran, eftir somu treytum sum onnur hava keypt í økinum og at skeytið verður við somu ásetingum og treytum sum fyri restina av útstykkingini. Víðarisølan krevur góðkenning av kommunala eftirlitinum, tá talan er um meira enn 300 $m^2$.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at Tórshavnar kommuna keypir økið frá Búnaðarstovuni, til víðarisølu at leggja saman við 1oe á Hjalla, at ein byggilinja verður ásett í skeytið, sum er 12 m frá markinum móti norðan og 6 metur frá markinum eystureftir, treytað av at loyvi fæst frá kommunala eftirlitinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal boðaði frá, at hon metti seg vera ógegniga at luttaka í viðgerðini av málinum og bað um at sleppa av fundi. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar.

## 149/20 Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 34/19 | 19/00411-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 31/19 | 19/00411-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 23/19 | 19/00411-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 176/19 | 19/00411-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 205/19 | 19/00411-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 190/19 | 19/00411-1 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 141/19 | 19/00411-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 71/19 | 19/00411-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 157/20 | 19/00411-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 177/20 | 19/00411-1 |
| 11 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 149/20 | 19/00411-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss, har ein av ætlaðu verkætlanum er at útbyggja Býlingshúsið vesturi á Flat. Ávíst fyrireikingararbeiðið hevur verið í hesum sambandi, har kostnaðarmetingar og tilboð eru fingin til vega fyri útbyggingini. Nú kommunan hevur leigað skúlalonina í Hoydølum og at talan er um stóra íløgu, verður mett skilabest, at arbeiðið verður boðið út á annan hátt, enn gjørt er. At annar leistur verður valdur kann hava við sær útreiðslur fyri kommununa um krav verður sett fram um gjald fyri útint arbeiði hesum viðvíkjandi.

Mett verður skilabest at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til tríggjuar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa).

Ætlanin er at byggja Býlingshúsið vesturi á Flat út við fýra nýggjum stovum, so at stovnurin fer at hava sjey stovur. Víst verður í hesum sambandi til mál 18/03848 Staðseting av nýggjum og víðkan av dagstovnum, har økið er sett av til endamálið. Krav til byggingina verður harumframt betri parkeringsumstøður í økinum.

Til tess at bjóða arbeiðið út, skal gerast útbjóðingartilfar, ið lýsir hølistørv, bygningskrøv, funktión v.m. Neyðugt er í hesum sambandi at seta av upphædd til fyrireikingar, ið mett verður kr. 100.000 ætlað ráðgeving, umframt samsýning til teir bjóðandi, ið ikki fáa arbeiðstøkusáttmála. Skotið verður í hesum sambandi upp kr. 75.000 í samsýning. Tilsamans er fíggjartørvurin til hesa tilgongdina kr. 250.000.
Á løgukarmi á grein 3 Børn og ung konta 3175 Barnaansing fyri 2019 eru í alt settar kr. 20 mió av til dagstovnar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fáa heimild til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út arbeiðið at útbyggja Býlingshúsið vesturi á Flat í innbodnari lisitatión til tríggjar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa), og at gera avtalu um ráðgeving í hesum sambandi. Harumframt verður mælt til at játta kr. 250.000 av løgukarmi 3175 Barnaansing til nýggja løgukontu Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum vísandi til, at hon er ógegnið.

**Ískoyti:**
Greitt verður frá úrskurði viðvíkjandi innkomnu uppskotunum og tilboðunum.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Trý heildararbeiðstakaratoymi vórðu boðin í innbodna lisitatión at byggja út Býlings-húsið vesturi á Flat. Tvey tilboð komu inn.

Tvey tilboð komu inn við hesum handverkaraútreiðslum (HVÚ):

| | |
|---|---|
| Sp/f ÁTS | kr. 28.189.000,00 |
| Sp/f Búsetur | kr. 34.962.000,00 |

Tilboðini eru mett eftir hesum metingartættum:

5. Arkitekturur og landslag (15%)
6. Uppfylling av byggiskrá (25%)
7. Innrætting, funktión og spælipláss (25%)
8. Tilboðsupphædd (35%)

Niðurstøðan hjá dómsnevndini er, at Sp/f ÁTS fær flest stig og hevur samlað sæð eitt betri uppskot. Allir neyðugir hentleikar eru við og byggiskráin er væl fylgd. Innrættingin er nøktandi. Prosjektið kann tillagast nakað. Tilboðsprísurin og fermetrakostnaður er eisini nøktandi. – Sí annars fylgiskjal 1a Dómsnevnd niðurstøða, og fylgiskjal 2 Tekningar og myndir.

Samlað kostnaðarmeting, har tað aftrat HVÚ er roknað við byggiharraveitingum, ráðgeving, verkætlanarleiðslu, eftirliti, listprýði, innbúgvi, óvæntaðum og mvg, er kr. 36.477.998, sí fylgiskjal.

Í íløguætlanini fyri 2019 eru á løgukontu 3175 barnaansing kr. 18 mió tøkar umframt kr. 171.919 á løgukontu 3175 L31010 Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat og kr. 155.496 á løgukontu 3175 L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum. Í alt eru sostatt kr. 18.327.415 tøkar til byggingina. Fíggjartørvurin avrundað er sostatt kr. 18.150.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin fyri verkætlanardeildina mæla til at fara í endaligar samráðingar við Sp/f ÁTS um útbygging av Býlingshúsinum vesturi á Flat og at skriva undir endaligan arbeiðstøkusáttmála.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina til at játta kr. 18 mió av løgukontu 3175 løgukarmur L00001 og kr. 155.000 av løgukontu 3175 L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum at flyta á løgukontu 3175 L31010 Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat. Aftrat verður mælt til at játta kr. 18,15 mió á íløguætlanini fyri 2020 til endamálið, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiriluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergunn Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neyst, tekur ikki undir við málinum vísandi til, at tað ikki er ávíst, hvussu byggingin skal fíggjast.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Verkætlanin um útbygging av Býlingshúsinun vesturi á Flat er samtykt á býráðsfundi 20. juni 2019. Sáttmáli undirskrivaður við heildararbeiðstakara tann 03.07.2019.

Kunning um ferðslu og P-pláss:
Í sambandi við útbygging av býlingshúsinum vesturi á Flat hava grannar og eigarafelag gjørt vart við sína misnøgd um ferðsluviðurskifti á økinum yvirfyri teknisku deild. Ónøgdin snýr seg í stuttum um økta ferðslu eftir Per Mohrs vegi í sambandi við útbygging og økta ferðslu eftir Vegnum Langa.

Ferðslugrannskoðan (skjal 1). er bíløgd í hesum sambandi, sum viðgerð klagupunktini.
Verkætlanin við útbygging av dagstovninum varð í sínari tíð bjóðað út sum heildararbeiðstøka. Eftir at

gjørt nakrar tillagingar við parkeringsplássinum á vinnandi uppskotinum, soleiðis at Per Mohrs vegur verður minni órógvaður við útkoyring av nýggjum p-plássi, við m.a. at fáa útkoyringina frá nýggjum p-plássi longur suður. (skjal 2).

Eitt týdningarmikið punkt í ferðslugrannskoðanini er sýnið eystureftir, tá bilar standa fremst við Per Mohrs veg. Hæddin á verandi lendi móti Vegnum Langa forðar fyri nøktandi útsýni eystureftir og hetta ger útkoyringina ikki nóg trygga. At grava hæddina av lendinum niður eystanfyri útkoyringina verður mett at kunna gerast í sambandi við verandi verkætlan, og harvið kann tryggjast nøktandi sýni framyvir. Eisini skal útkoyring frá Per Mohrs vegi strikast betri og gonguteigur gerast inn á Per Mohrs veg.

Á fundum við umsitingina hava grannar og eigarafeløg ynskt aðra loysn enn hana, sum umsitingin hevur arbeitt við. Grannar og umboð fyri eigarafelag ynskja, at verandi vegur verður broyttur og lagdur um, so íbinding verður longur eysturi (skjal 3). Hetta viðførir m.a., at nýggja ætlaða parkeringsøkið má deilast í tvey, og økt gangandi ferðsla verður tvørtur um nýggjan veg. Starvsfólk á stovninum ynskja ikki grøna økið millum nýggja stovnin og Vegin Langa bygt.
Ein leyslig meting at gera nýggjan íbindingarveg kostar umleið 1,5 mió. kr.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sp/f ÁTS er heildararbeiðstakari og ger arbeiði við útbyggingini av Býlingshúsið Vesturi á Flat. Sáttmálin er undirskrivaður 03.07.2019 áljóðandi 28.189.000 kr. uttan mvg.

Arbeiði hevur sum heild gingið gott higartil, hóast onkrir dagar við vánaligt veður og Korona farsótt, sum hevur haft ávirkan á verkætlanina, eins og tað hevur ávirka samfelagið í hesum tíðum.

Tey flestu elementini er uppsett og verur bygningurin reistur, komandi dagin. Í næstum verur klæðing gjørd liðug, úthurðar ísettar o.a útvendugt arbeiði gjørt liðugt. Síðani verur klárt at byrja uppá arbeiði inni.

Arbeiði verur vantandi liðugt í nov/des. 2020. Um verkætlanin ikki verur ov nógv ávirka av farsóttini sum gongur. Samlaði kostnaður á tils 36,6 mio. fer vantandi at halda.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Húsaumsitingina mæla til:

- At kr. 18.200.000 verða fluttar av konto 3175, L00001 Løgukarmur fyri árið, á konto 3175, L31010 Útbygging, Býlingshúsið vesturi á Flat.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

Turið Horn boðaði frá, at hon metti seg ógegniga at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar og í hennara stað luttók Sigrun Wardum.

# 150/20 Skógfriðing av øki fram við Hoydalsá ísv makaskifti við Búnaðarstovuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 126/20 | 20/01272-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 189/20 | 20/01272-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 150/20 | 20/01272-1 |

**Upprunin til málið:**
Ynskiligt er at víðka avtaluna um makaskifti millum Føroya Landsstýri og Tórshavnar kommunu ísv bygging av Glasir við øki framvið Hoydalsá, við skjali *20/01272-2 skógfriðing_makaskifti_Búnaðarstovan_23_01_2020*.
Fundur var millum Skógfriðingarnevndina og Tórshavnar kommunu 24. Januar um hetta málið, har avtalað varð, at Tórshavnar kommuna skuldi venda aftur til Skógfriðingarnevndina við teimum ognum, ið Tórshavnar kommuna tekur undir við skulu skógfriðast ísv avtaluna um makaskifti.
ískoyti í málið um makaskifti, skal sendast sum umbøn til Føroya Landstýri, má samtykkjast politiskt og sendast ráðnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin tekur undir við, at økið rundanum Hoydalsá skal skógfriðast. Fyri almenningin er frílendið fram við Hoydalsá av stórum týdningi fyri uppihald og trivnað, og er upplagt at skógfriða økið. Umsitingin ger eisini vart við, at tá talan er um skógfriðing so tætt uppat verandi bygging, vil reglan um at hoyra Skógfriðingarnevndina, um bygt verður nærri enn 300 metrar frá skógfriðaðum øki, geva óneyðuga umsiting fyri Skógfriðingarnevndina. Avtalast má við Skógfriðingarnevndina hvussu hetta kann umsitast í praksis, og varð eisini semja um hetta, tá málið varð umrøtt á fundinum við Skógfriðingarnevndina í januar 2020.

Umsitingin tekur undir við, at økið verður skógfriðað sambært viðlagda korti skjal 20/01272-3 makaskifti_búnaðarstovan_juni 2020, og at frílendisætlan verður gjørd, sum skipar økið, sum liggur innanfyri friðingarlinjuna fyri Hoydalsá.

**Lógir, ásetingar o.a.**
72/2015:Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðarlundir (Fyrisitingarheimild til Umhvørvisstovuna) Galdandi lóg

Uppskot um lóg um Náttúrumargfeldi

**Upplýsingar frá umsitingini**
Skógfriðing av øki er bindandi í mun til røkt, og krevur árliga játtan til hald av økinum. Hetta kann avtalast nærri við Skógrøkt landsins.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*14/01476 Frílendisætlan fyri Hoydalsá,*
*17/01142 Skógfriðing, samstarv millum Tórshavnar kommunu og Skógfriðingarnevndina*
*18/00982 Skógfriðing*
*19/02816 Kampingøkið sambært ferðavinnupolitikkinum*
*20/00778 Innkomuvegurin samstarv við LV*
*Ymisk mál um urtagarðsstykkir*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

Mælt verður til, at kannað verður um til ber at skógfriða hetta økið, við áseting um, at friðingarlinjan fyri Hoydalsá er mark.
Hetta skal skiljast soleiðis, at sæð verður burtur frá ásetingini um at bygging 300 m frá skógfriðaða økinum skal til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini, men at bygging uttanfyri friðingarlinjuna verður viðgjørd eftir reglum í galdandi byggisamtyktum.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
skjal 20/01272-3 makaskifti_búnaðarstovan_juni 2020

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐
Hald av skógfriðaðum øki er í løtuni uml. 2,50 kr./$m^2$/ár. Tó kann nærri avtalast millum Tórshavnar kommunu og Skógrøkt landsins um hetta.
Harumframt kostnaðir fyri hegn, gøtuskipan og træplanting o.a. meting er ikki gjørd fyri hendan partin. Hetta raðfestir kommunan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at spyrja Búnaðarstovuna, um tað ber til at víðka verandi avtalu sambært skjali 20/01272-3 og hvørjar treytir og bindingar eru og verða settar í tí sambandi, og leggja málið aftur fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annka Olsen, Gunnvør Balle og Turið Horn, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við at skógfriða økið vísandi til at økið frammanundan liggur sum D1 økið og mælir til at økið verður varðveitt sum D1 økið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Sigrun Wardum, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 151/20 Gøtan út á Hvítasand á Boðanesgjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 144/20 | 20/02251-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 190/20 | 20/02251-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 151/20 | 20/02251-1 |

**Upprunin til málið:**
Frílendisætlanin fyri Boðanes Hoydalar, varð gjørd í drúgvum samstarvi millum Umhvørvisstovuna og Tórshavnar kommunu. Ein arbeiðsbólkur varð settur við umboðum frá Umhvørvisstovuni og Tórshavnar kommunu.

Brot úr lýsing av Frílendisætlanini:
"Á heysti í 2009 varð ein arbeiðsbólkur settur at gera uppskot til eina dispositiónsætlan fyri økið. Arbeiðsbólkurin handfór givna setningin soleiðis, at talan var um at greina tey ymsu viðurskiftini í økinum við atliti at lendi, náttúru, siðsøgu og tekniskum virðum og bindingum v.m. Við grundarlagi í hesum útgreiningum varð gjørd ein brúksætlan, har dentur varð lagdur á møguleikarnar fyri náttúru- og frílendisupplivingum í økinum.
Tey tiltøk og atgerðir, ið arbeiðsbólkurin mælti til at fremja í økinum, stuðla undir og menna upplivingarmøguleikarnar til gagn og frama fyri almenningin.
Frílendisætlanin vísir á eina brúksskipan, har tey yvirskipaðu atlitini eru umrødd og lýst soleiðis, at hesi verða partur av teimum ítøkiligu menningar- og røktarætlanum fyri økið, ið ætlandi gerast veruleiki sum frálíðir."

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin varð einmælt samtykt í býráðnum 22. nov. 2017 og varð mælt til, at tá átøk verða gjørd í økinum, sum ætlanin fevnir um, vil kommunan fylgja ætlanini. Harumframt mælti umsitingin til at raðfesta ætlanina stigvíst á langtíðarætlanini fyri verkætlanir innan fríðkan av býnum.
Sum liður í hesum arbeiði, er ætlanin at fara undir at gera gøtuna út á Hvítasand á Boðanesi, sambært frílendisætlanini á bls. 27.

Mettur kostnaður fyri at gera gøtuna er 350.000,- kr. Framflutt avlop frá 2019 verður væntandi kr. 42.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/01476 Frílendisætlanin fyri Boðanes Hoydalar

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
14/01476-8 Frílendisætlanin fyri Boðanes Hoydalar – endalig frágreiðing

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við uppskotinum um gerð av gøtu út á Hvítasand sambært Frílendisætlanini, at játta 325.000 kr. av konto 6275, L00001, løgukarmur fyri árið, til konto 6275, L62023 Frílendið við Hoydalsá og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

## 152/20 Vágsbotnur - skipan av økinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 44/18 | 18/00808-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 78/18 | 18/00808-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 58/18 | 18/00808-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 127/19 | 18/00808-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 196/19 | 18/00808-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 159/19 | 18/00808-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 176/19 | 18/00808-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 180/19 | 18/00808-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 310/19 | 18/00808-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 274/19 | 18/00808-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 129/20 | 18/00808-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 141/20 | 18/00808-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 191/20 | 18/00808-1 |
| 14 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 152/20 | 18/00808-1 |

**Upprunin til málið:**
Skipan av økinum í Vágsbotni er ein liður og møgulig verkætlan í miðbýarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk eru gjørd í Vágsbotni, sum hava virkað til, at býarlívið er nógv vaksið í økinum - serliga um summarið. Trappan, søluplintar, kaféir við uttandura borðreiðing, gistingarhús, handlar og stuttleikabátar seta sín hugnaliga og maritima dám á økið. Vágsbotnur er sostatt ein sterkur miðdepil í miðbýnum, har fleiri funktiónir møtast. Men torgið og uttanum økið er í dag ikki serliga væl skipað í mun til hvørt annað og virksemið á staðnum, ferðslu, trygd v.m. og vantar ein betri skipan og heildarloysn fyri økið.

Í sambandi við at skipa økið í Vágsbotni, skal pláss vera fyri gerandisdegi og veitslu, og hevur tað týdning ikki einans at tryggja pláss til serlig tiltøk. Karmarnir til gerandislívið skulu eisini tryggjast og styrkjast.

Torgið kann skapa betri møguleikar til uttandura virksemi sum t.d. marknaðardagar, borðreiðing og spæl. Ein partur skal framvegis nýtast til bilferðslu til Skálatrøð, men ynskið er at flyta koyribreytina fyri at skapa eitt størri samanhangandi og vælvirkandi torg.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera skipanaruppskot av torginum og at íverkseta projektering til skipan av økinum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til fyrireikandi arbeiðið og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 28.02.2019 varð í málinum Miðbýarætlan - Steinatún, journal. nr. 14/05065, samtykt at játta 1 mió. kr av verkætlanini L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum til býartorgið í Steinatúni.

Arbeiðið at gera skipanaruppskot og at íverkseta projektering til skipan av økinum í Vágsbotni varð av tí orsøk útsett. Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini Marin Katrina Frýdal ynskir nú at fara í holt aftur við fyrireikandi arbeiðið, men verkætlanin vantar játtanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275, L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt skitsuuppskot til skipan av Vágsbotni. Uppskotið byggir víðari á miðbýarætlanina og tekur støði í og samantvinnar náttúru, menniskja, søgu og mentan.
Í uppskotinum, verður bryggjukanturin longdur út í sjógvin, so betri pláss er til uppihald og eisini betri pláss til fiskasølutorgið. Lagt verður upp til, at farleið hjá bilum verður einvegis, mitt eftir økinum so eitt torg verður hvørjumegin vegin, framman fyri trappuni eystanfyri og eisini á økinum vestanfyri farleiðina.

Belegningur verður ætlaður soleiðis skipaður, at tað eggjar bilum at seta ferðina niður, soleiðis at talan meira verður um eina seyrugøtu enn høvuðsfarleið.

Plantur og innbúgv eru ætlað flytilig, soleiðis at økið er hugnaligt at vera í, og so at hetta er lætt at broyta í mun til tey ymsu tiltøkini.

Skitsuætlanin sum fyriliggur, verður grundarlag undir almennari hoyring á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, har borgarar kunnu gera viðmerkingar til ætlanina, og koma við hugskotum til Vágsbotn í framtíðini.

Innkomin hugskot verða viðgjørd og tikin við í víðari prosjekttilgongdini.
Tá hetta er gjørt, verður prosjekteringin boðin út, og prosjekteringssáttmáli við ráðgeva um skipanaruppskot og prosjektuppskot lagdur fyri nevndina aftur.

**Skjøl:**
18-00808-8 *Vágsbotnur skipan framløga*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at verandi skitsuuppskot verður lagt til almenna hoyring, uppskotsfasan verður boðin út, og sáttmáli við ráðgeva lagdur fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Neyðugt verður at gera forkanningar og annað í sambandi við at prosjektering verður boðin út.
Til samlaðu ætlanina fyri Vágsbotn verður neyðugt at raðfesta fíggingina at ætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 2.300.000,00 av konto 6275, L00001 Løgukarminum fyri árið, til verandi verkætlan L62034, Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 3.300.000,00 av konto 6275, L00001 Løgukarminum fyri árið, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arkitektakappingin um at skipa torgið í Vágsbotni er liðug. Úrslitið av kappingini varð almannakunngjørt 11.06.2020, og gjørdist Zeta Arkitektar vinnari av kappingini.

Á seinasta fundi varð kunnað um innkomnu uppskotini og dómsnevndarálitið, sum nú kunnu síggjast í málinum.

**Skjøl:**
Dómsnevndarálit 2020_Undirskrivað, journal nr. 18/00808-18
Vágsbotnur_A3 Mappa_uppskot #71421 (Zeta Arkitektar), journal nr. 18/00808-19
Vágsbotnur_A3 Mappa_uppskot #14547 (Henning Larsen), journal nr. 18/00808-20
Vágsbotnur_A3 Mappa_uppskot #23308 (SNA Arkitektar), journal nr. 18/00808-21

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at staðfesta dómsnevndarálitið, og at heimila umsitingini at fara í sáttmálasamráðingar við Zeta Arkitektar og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Turið Horn, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020**: Atkvøtt varð um meirilutatilmælið hjá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

# 153/20 Umsókn um grundøki til vardar bústaðir – Sambýli í Reynstúni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 214/18 | 18/03494-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 318/18 | 18/03494-5 |
| 3 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 65/18 | 18/03494-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 335/18 | 18/03494-5 |
| 5 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 280/18 | 18/03494-5 |
| 6 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 32/19 | 18/03494-5 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 86/19 | 18/03494-5 |
| 8 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 43/19 | 18/03494-5 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 96/19 | 18/03494-5 |
| 10 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 50/19 | 18/03494-5 |
| 11 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 63/19 | 18/03494-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 17/20 | 18/03494-5 |
| 13 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 43/20 | 18/03494-5 |
| 14 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 127/20 | 18/03494-5 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 104/20 | 18/03494-5 |
| 16 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 153/20 | 18/03494-5 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Almannaráðið sendi í mars mánað í fjør kommununi umbøn um grundøkir til vardar bústaðir í Tórshavn. Vísandi til bráðfeingis tørvin á nýggjum og tíðarhóskandi vardum bústøðum og bústovnum í Tórshavn, hevur landstýriskvinnan í almannamálum gjørt eina raðfestingarætlan fyri at loysa bráðfeingis tørvin á bústøðum fram til 2022. Tørvur er á fýra grundøkjum í Tórshavn til nýtt barnaheim og trý sambýli, tískil er ynskiligt, at kommunan kann veita Almannaráðnum fýra grundøkir til endamálið í Tórshavn, íroknað Argir og Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin umrøddi spurningin um økir til barnaheim og sambýlir í tráð við býarplanleggingina, og vísti í hesum sambandi á nøkur økir í ávikavist Tórshavn, Hoyvík og á Argjum. Har ímillum varð víst á eitt øki við Reynstún/Glyvursveg á Argjum, matr. nr. 4cl, 4cm og 4bs, sum í fyrsta umfari ikki varð ynskt til eina staðseting til eitt sambýli, sí kortskjalið *Økið á Argjum_Kort*. Almannaráðið hevur seinni víst økinum ans, har ynski er at staðseta eitt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Trý lógaruppskot vóru í desember mánað løgd fyri Tingið, sum fevna um bygging av nýggjum barnaheimi, bú- og umlættingarheimi til børn og ung við autismu og bygging av tveimum vardum bústøðum til fólk við menningartarni. Landsverk hevur tí latið evnað eina byggiskrá til eitt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, har tað verður víst til økið í Reynstúni á Argjum við tí í huga, at Tórshavnar kommuna skal samtykkja staðsetingina til endamálið, sí byggiskrá og fylgiskjøl.
Eitt sambýli hóskar væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Byggingin verður staðsett fyri endan av einum vegi við sethúsum, og kann byggingin tí skapa ein samanhang við verandi býling, samstundis sum byggingin kann skapa sítt egna nærumhvørvið. Heimið skal staðsetast á byggiøkið soleiðis, at hetta liggur skilabest í mun til atkomu og parkering.

Ástaðarfundur var hin 16. februar 2018, har kommunan saman við umboðum frá ymsu áhugabólkunum vísti á ymsu økini og møguleikarnar. Býarverkfrøðingurin var somuleiðis við á staðnum, har staðfest varð, at besta atkoman til økið er umvegis Reynstún

Ferðslan til og frá heiminum verður væntandi tann sama sum á líknandi bústøðum, ið Almannaráðið hevur í dag. Húsfólk verða koyrd við mini-bussum, og starvsfólk hava persónbilar. Fyri ein vanligan gerandisdag er ferðlsan sum fylgjandi:

Húsfólk: 3 fráferðir við bussi millum kl. 8.00-9.00
1 fráferð kl. 10.00
1 fráferð kl. 10.30
1 heimferð kl. 14.00
3 heimferðir ímillum kl. 15.00-16.00

Starvsfólk: 7 starvsfólk møta kl. 7.00
8 starvsfólk møta ímillum kl. 15.00-16.00
2 starvsfólk møta kl. 23.00
2 starvsfólk fara heim kl. 7.00
4 starvsfólk fara heim kl. 12.00
2 starvsfólk fara heim kl. 15.00
8 starvsfólk fara heim ímillum kl. 20-23

Í dag hava øll starvsfólkini ikki koyrikort, summi búgva í grannalagnum og ganga til arbeiðis, meðan onnur taka bussin. Væntast kann tískil við minni bilferðslu enn lýst omanfyri. Eingin føst vitjanartíð er, og vitjandi eru allar gerandisdagar og í vikuskiftinum, væntast skal við áleið einum bili um dagin. Í vikuskiftinum er ferðslan hjá húsfólkum áleið 1-2 túrar um dagin, meðan ferðslan hjá starvsfólkunum er hin sama, sum í gerandisdøgunum. Ruskinnsavnan og vørumóttøka er einaferð um vikuna.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið í Reynstúni, matr. nr. 4cl, 4cm og 4bs, liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

1. *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
2. *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
3. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.*
4. *Byggistig 0,3*
5. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Í sambandi við at Tórshavnar býráð á fundi 26. apríl 2001 samtykti at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið millum Reynstún og dagstovnin frá at vera B3 vinnuøki til A1 sethúsaøki, varð mótmæli frá eigarafelagnum Havnardalur ABC sent kommununi.

Í mótmælisskrivinum, dagfest 30. mai 2001, verður víst á, at eitt sethúsaøki kemur at økja um virksemið í verandi býlingi, og undrast tey á, at kommunan ikki hevur aðrar ætlanir við einum so høgligum øki, umframt at økið ikki er partur av eini størri heildarætlan. Grundað á, at ongin ítøkilig ætlan er fyri einum atkomuvegi til økið, vilja undirritaðu greitt mótmæla, at tey á ongan hátt kunnu góðtaka, at vegurin Reynstún verður nýttur sum møguligur atkomuvegur til økið. Mótmælið fevnir somuleiðis um nýtslu av Reynstúni sum fyribils arbeiðsveg ella atkomuveg til økið, meðan bygging fer fram.

Í sambandi við bygging av sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki hevur eigarafelagið Havnardalur ABC aftur sent kommununi skriv, har víst verður til mótmælið frá 2001, umframt at tey gera vart við sína

ónøgd, at tey ikki eru kunnaði og hoyrd um eina slíka stóra byggiætlan, sum tey meta fer at broyta umhvørvið í økinum munandi, sí mótmælið.

Økið er seinni broytt til A3 í almennu byggisamtyktini, og loyvir ásetingin tí, at eitt nýtt sambýli verður bygt í økinum. Tórshavnar kommuna ynskir somuleiðis at rúma øllum borgarum, tí er góð grundgeving at sameina eitt sambýli í eitt bústaðarøki, sum er við til at skapa ein fjølbroyttan bý.

Umsitingin var saman við býarverkfrøðinginum á staðnum, har staðfest varð, at vegurin Reynstún er egnaður sum atkomuvegur. Víst varð somuleiðis á, at ongin vegatkoma skal vera frá Glyvursvegnum. Økið er byggiøki, sum sjálvsagt hevur eina økta ferðslu við sær, men grundað á virksemið lýst omanfyri, metir umsitingin ikki, at ferðsluviðurskiftini verða stórliga broytt. Einki er tí til hindurs fyri byggingini, tó skal vegatkoman góðkennast av teknisku nevnd. Harumframt verður mett, at eitt 17 ára gamalt mótmælisskriv er óviðkomandi í eini viðgerð, har fleiri broytingar eru farnar fram.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Umsókn um grundøkir til vardar íbúðir, journal nr. 17/00903

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Serstøk byggisamtykt skal gerast í sambandi við útstykkingina.

**Umhvørvisárin:**
Einki

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**
Hevur ikki verið til viðmerkingar hjá øðrum.

**Skjøl:**
*Økið á Argjum_Kort,* journal nr. 18/03494-9
*Byggiskrá_Sambýlið í Reynstúni*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 01_Sambandi millum eindirnar*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 02_Gentle teaching*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 03_Námsfrøðiliga arbeiðið á Eirargarði*, journal nr. 18/03494-8
*Fylgiskjal 05_Tíðarætlan*, journal nr. 18/03494-8
*Mótmæli*, journal nr. 18/03494-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**
Tórshavnar kommuna skal selja Almannaráðnum lendið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki, og at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson mælir til at finna aðra staðseting.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska deild hevur viðgjørt málið við atliti til reinsiverki, leiðingum og atkomu til sambýlið.
Verkætlanin má taka atlit til at nýtt reinsiverk til ovara part av Reynstúni og Reynsgøtu skal staðsetast har (P-økið kann brúkast), umframt til hetta byggjaríið, hetta má takast við í skipanina av økinum. Ætlandi skal eisini fjarhitaleiðing leggjast gjøgnum økið, frá rundkoyringini niðan til hitamiðstøðina. Mett verður at hetta kann gerast uttan størri ávirkan á verkætlanina. Viðvíkjandi atkomuvegum verður mett, at ferðslutrýstið frá stovninum er so mikið lítið, at tað ikki er til stórvegis ampar fyri íbúgvarnar har. Hinvegin kann byggingin vera við til at betra um vendimøguleikarnar við endan á Reynstúni, og møguliga eisini geva nøkur P-pláss at nýta í sambandi við føðingardagar o.l.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja Almannamálaráðnum lendi at byggja sambýli á fyri kr. 156/m².

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, treytað av at góð parkeringsviðurskifti verða.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, atkvøða ímóti og mæla til at finna aðra staðseting.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við meirilutanum í Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Eon minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein atkvøða ímóti og mæla til at finna aðra staðseting.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Kunningarfundur var tann 7. januar 2019 hildin fyri grannunum í Reynstúni, har Almannaverkið og Tórshavnar kommuna høvdu eina framløgu, har fleiri sjónarmið viðvíkjandi bygging av nýggjum sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki vórðu løgd fram.

Greitt varð frá, hvussu byggingin er ætlað skipað í eindum við lítlum íbúðum (35 $m^2$ til støddar), arbeiðstíðir hjá starvsfólkum, og hvørjar dagligar fráferðir og vitjanir búfólk og vitjandi gera. Økisásetingarnar í almennu byggisamtyktini vórðu lýstar, umframt at greitt varð frá ferðslu- og generellu parkeringsviðuskiftunum í økinum. Um eitt sambýli verður gjørt fyri endan á vegnum, so er ætlanin, at vendiplássið verður gjørt nøktandi, og hugsast kann, at nøkur parkeringspláss verða tøk til eitt nú føðingardagar v.m.

Grannarnir førdu fram sína ónøgd í sambandi við, at atkoman til sambýlið skal vera umvegis Reynstún, og ynsktu at vita hví íbinding ikki kann gerast í Glyvursvegin. Sum áður nevnt, so ynskir kommunan ikki, at innkoyring er frá Glyvursvegnum, tí hesin vegurin verður helst høvuðsæðr við nógvari ferðslu út á Glyvursnes. Og tá Glyvursvegurin er ikki egnaður til íbinding, er eyðsætt, at Reynstún verður atkomuvegur, og er Reynstún somuleiðis mett, at vera nøktandi til økta virksemið í økinum. Kommunan vísti á, at møguliga kann arbeiðsvegur gerast inn frá Glyvursvegnum í byggitíðini, men skal hetta kannast nærmari í framhaldandi tilgongdini. Og ikki minst varð greitt frá um íbúgvarnar, sum skulu búgva í sambýlinum. Talan er um um brúkarar, ið eru illa fyri, og koma teir tí ikki at ávirka grannalagið nakað serligt.

Aðrar viðmerkingar frá grannunum vóru t.d., at myndirnar í framløguni vóru misvísandi, at grannar omanfyri á Reynsgøtu parkera í Reynstúni, og at fleiri bilar eru til hvørt húski, og tí er parkering á vegnum.

Síðani fundin hevur Almannamálaráðið sent kommununi skipanaruppskotið fyri ætlaðu byggingina. Umsitingin metir tað ikki vera neyðugt við eini serstakari byggisamtykt fyri økið og nýbyggingina í Reynstúni, grundað á ásetingarnar fyri A3 øki, ið eitt nú ásetir at loyvt er at byggja stovnar á økinum. Tað er einans neyðugt við serstakari byggisamtykt, um talan er um eina útstykking, og um byggingin ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Umsitingin metur ikki, at ætlaða byggingin kann kallast ein útstykking, tá talan er um ein bygning/ein stovn. Av tí at eingin serstøk byggisamtykt verður gjørd, verður heldur eingin almenn hoyring av málinum. Mett verður tí, at grannarnir, grundað á teirra mótmælið eiga at verða kunnaðir um ætlaðu byggingina. Kunningarfundur hesum viðvíkjandi verður eftir ætlan hildin í viku 20.

**Skipanaruppskotið**
Á heystið 2018 bjóðaði Landsverk ráðgeving av nýggjum sambýli út í kapping. MAP Arkitektar vunnu kappingina, sum varð avgjørd í desember 2018, og varð skipanaruppskotið latið kommununi síðst í mars mánaða í ár, sí Fylgiskjal 2 - skipanaruppskot.

Hugsjónin í uppskotinum er, at búfólkini sum hava skerdar virkis førleikar skulu varðveita sínar kropsligu, sálarligu og sosialu førleikar so leingi til ber. Nærveran og sambandi við onnur menniskju er kjarnin í námsfrøðiliga arbeiðinum í heiminum, og eru fysisku karmarnir inni og úti tí einfaldir og sansastimbrandi, lætt er at finna vegin fram og at fáa samband við onnur búfólk og starvsfólk. Á staðnum eru góðir møguleikar fyri at skapa sansastimbrandi upplivingar fyri búfólk og familjur teirra. Lagt verður tí upp til, at búfólkini uppliva staðið við at eygleiða, hoyra, lurta og nerta.

Byggingin er skipað í tríggjar eindir, harav tvær eru búeindir við 9 íbúðum í hvørjari og eini felagseind, sum fevnir um starvsfólkahøli, felagskøk, vaskarí, vesi til gestir og avvarðandi, tøknirúm og sansarúm. Hvør búeind er somuleiðis skipað við 3 býlingum, sum fevna um tríggjar íbúðir og eitt felags tún. Innrætting av túnum, val av tilfari og litum kann skipast við luttøku av búfólkunum, soleiðis at tey eru við til at seta sín dám á heimið.

Atkoma til sambýlið er frá Reynstúni, og parkeringspláss við áleið 26 p-básum vera á økinum, um roknað

Glyvursvegin og niðan til sambýlið og Reynsgøtu. Gøtusambandið kann verða til gagns fyri grannalagið í Reynstúni, og verður verandi gøtusamband óbroytt. Umsitingin ger neyðugar tillagingar um neyðugt.

Umsitingin hevur ásannað, at ætlaðu parkeringsplássini upp at Reynstúni og vendiplássið, sum ynskiligt verður gjørt nøktandi ikki er við í ætlanini. Heitt er á Landsverk um møguleikan fyri at flyta runt upp á hetta í framhaldandi tilgongini.

**Skjøl:**
Fylgiskjal 2 Reynstún - Skipanaruppskot (útg. 2), journal nr. 18/03494-24

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Vísandi til at vendipláss og parkering skal verða við endan á Reynstúni verður málið útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 7. mai 2019.

**Ískoyti:**
Kunnandi fundur var við íbúgvarnar í Reynstúni mánadagin 13. mai 2019. Kjakið til fundin bleiv rættiliga heitt, og varð tí avgjørt at taka ein fund millum byggiharran og umsitingina fyri at umrøða støðuna.

Hesin fundurin varð hildin 22. mai 2019 og møttu Almannamálaráðið, Almannaverkið og Landsverk, umframt borgarstjórin og umboð fyri kommunalu umsitingina. Niðurstøðan á fundinum varð, at umboð frá byggiharranum skuldu koma á fund í byggi- og býarskipanarnevndini 7. juni 2019 at leggja skipanaruppskotið fram, og skuldu allir býráðslimirnir somuleiðis bjóðast til hendan kunnandi fundin, soleiðis at spurningar ella ivamál til skipanaruppskotið kundu verða svarað beinleiðis av byggiharranum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðari á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Landsstýriskvinnan í Almannamálaráðnum, umboð fyri byggiharran og MAP arkitektar greiddu frá og svaraðu spurningum í sambandi við skipanaruppskotið.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við stasetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

Bjørg Dam atkvøður blankt.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Gjørt verður vart við, at skipanin av økinum er broytt, eins og ráðgevi greiddi frá á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 7. juni 2019. Sostatt eru 8 parkeringspláss við innkoyringina til vardu bústaðirnar, og restin innast á stykkinum, uml. 50 m frá innkoyringini. *Støðumynd Parkering 500-01 18/03494-38*

*lýsir hetta.* Tá byggingin er liðug, verður øll parkeringin tøk hjá grannalagnum at brúka og kemur sostatt grannunum til góðar.

**Skjøl:**
*Støðumynd_Parkering_500-01 18/03494-38*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið fyri nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki í Reynstúni á Argjum, at arbeiðsvegur verður gjørdur frá Glyvursvegnum í byggitíðini og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigursson, tekur ikki undir við stasetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Tá ið fíggjarnevndin 28. november 2018 viðgjørdi málið, tók meirilutin í nevndini bert støðu til tilmælið frá tekniska stjóra og býarverkfrøðinginum um at góðkenna staðsetingina í Reynstúni til eitt nýtt sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Fíggjarnevndin tók sostatt ikki støðu til tilmælið frá kommunustjóranum og leiðaranum á stjórnarskrivstovuni um at selja lendi at byggja sambýli á fyri kr. 156/m².

Fyri at kunna avgreiða málið, er neyðugt at fíggjarnevndin og býráðið viðgera tilmælið í mun til sjálva søluna av lendinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum til fundin 28. november 2018 at selja Almannamálaráðnum økið í Reynstúni til sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki fyri kr. 156/m².

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við staðsetingini og mælir ístaðin til at staðseta stovnin við barnagarðin á Argjahamri og býlingin á Argjahamri.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í nevnd, ið fall við 7 atkvøðum ímóti og 6 atkvøðum fyri.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Sauelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrinu Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um broytingaruppskot frá umboðnum hjá Fólkaflokkinum, Tjóðveldi og Framsókn um at taka undir við tilmælnum hjá meirilutanum í fíggjarnevndini við teirri broyting, at út- og innkoyring verður frá Glyvursvegnum og lokað verður fyri endan á vegnum í Reynstúni, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Halla Samuelsen og Bjøghild Djurhuus.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

## 154/20 Útstykking Stórabrekka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 138/17 | 17/01822-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 160/17 | 17/01822-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 172/17 | 17/01822-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 202/17 | 17/01822-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2018 | 278/18 | 17/01822-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 87/19 | 17/01822-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 142/19 | 17/01822-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 112/19 | 17/01822-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 106/20 | 17/01822-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 130/20 | 17/01822-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 11.06.2020 | 146/20 | 17/01822-1 |
| 12 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 124/20 | 17/01822-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 154/20 | 17/01822-1 |

**Málslýsing:**
Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Ynski er nú um at seta í verk eina útstykking á hesum sama øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin viðvíkjandi framtíðar bygging, og er ynski um at gera eina øðrvísi útstykking á økinum við blandaðum bústøðum. Sum sæst niðanfyri, so skal serstøk byggisamtykt gerast fyri útstykkingina við Dalin Langa, sum umframt at tryggja skilagóða bygging, er við til at staðseta bygingina, atkomu, parkering, fríøki v.m.

Men fyri at seta skjøtul á arbeiðið at fyrireika útstykkingina við Dalin Langa er neyðugt at byrja við eini byggiskrá fyri økið, sum lýsir, hvør bygging talan er um. Tískil verður biðið um, at nevndin góðkennir at farið verður undir at gera eina byggiskrá fyri økið, umframt at bjóða sniðgevingina av útstykkingini út til ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, verður í kommunuætlanini nevnt “Heyggurin” og er 5,1 hektarar til støddar, sí skjalið “Økið eystan fyri Dalin Langa_Kort”. Harafturat liggur økið, sum er partur av matr. 138a, í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

*1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

*2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

*3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.*

*4. Byggistig 0,3*

*5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m², fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m² og 500 m² verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.*

*6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. .*

*7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

*8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

*9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Skjøl:**
- Økið eystan fyri Dalin Langa_Kort

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin kann fara undir at gera eina byggiskrá fyri útstykkingina, umframt at játta kr. 200.000 av kt. 6475 til sniðgeving av útstykkingini og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um status í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
SNA Arkitektar hava gjørt eitt uppskot til byggiskrá og skipan av økinum. Sí uppskotið *Stórabrekka-byggiskrá_06122018.*

Økið á Stórubrekku liggur í 100 m hædd og hevur stórsligið útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Frá miðbýnum í Havn og niðan til nýggju staðsetingina á Stórubrekku eru fimm kilometrar, og eru handilsmøguleikar, skúlar og stovnar í nærumhvørvinum.

Stórabrekka liggur á eini høvd omanfyri vinnuøkið við Vegin Langa. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn.

Uppskotið, sum SNA Arkitektar hava gjørt, arbeiðir við einum nýggjum býlingi, ið leggur seg júst millum hendan dalin vestanfyri og lendisfallið eystanfyri. Býlingurin er hugsaður sum klingrubygging í trimum fríttliggjandi eindum, har lagt verður upp fyri, at uppruna lendið verður varðveitt og gerst ein stórur partur av býlinginum.

Tær tríggjar eindirnar í klingrubyggingini verða bundnar saman við eini innara vegaskipan við parkering, og eitt øki til felagsparkering er staðsett við innkoyringina til býlingin úr Klingruni. Ein gøtuskipan, ið knýtir seg á verandi lendisgøtuskipan, bindur somuleiðis alt økið saman, og skilja hesar gøturnar seg frá koyrandi ferðslu, so tað framhaldandi verður trygt hjá fólki til gongu.

Klingruskapini verða myndað sum røðir av raðhúsum, har allar bústaðareindirnar fáa útsýni antin út á fjørðin ella móti vakra landslagnum í dalinum, umframt at allar bústaðareindirnar fáa eina síðu við lívd og nærleika. Í miðjuni á hvørjum klingruskapi eru hægri punkthús við íbúðum, har mestsum øll síggja uppum raðhúsini.

Klingruskapini við raðhúsunum eru náttúrliga staðsett í mun til lendið, soleiðis at innara landslagsrúmið liggur hægri, og er tað á hesum hálendinum, at parkeringin er staðsett inni undir langum flagtekjum. Heyggur og grøn øki mynda sostatt økið og skiftið millum raðhúsini, íbúðarbyggingina og parkeringina.

Ymiskt er, hvussu nógvir bústaðir eru í hvørjum klingruskapi, men í fyrsta klingruskapi, sum er hugsað sum fyrsta byggistig rúmast:

- 19 bústaðir í raðhúsi
- 18 íbúðir í punkthúsum
- 28 íbúðir í raðhúsum
- felagsrúm
- dagstovnur

Tá bygt verður tætt, verður mett, at 1,5 bilur til hvørt húskið er nøktandi. Byggisamtyktin setur krav um 1 p-pláss fyri hvørjar 75 $m^2$ íbúð í eini felagsparkering.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í sambandi við málið *Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019*, journal nr. 18/03848, verður málið at leggja fyri á komandi býráðsfundi at samtykkja at staðseta ein nýggjan dagstovn á Stórubrekku. Víst verður á eitt øki á eystaru síðu á Stórubrekku. Í hesum sambandi hevur tekniska deild gjørt viðmerkingar til málið, umframt at víst verður á vega- og kloakkíbindingar v.m., sí kortskjalið.

**Skjøl:**
Stórabrekka-byggiskrá_06122018, journal nr. 17/01822-8
Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019, journal nr. 18/03848-1
Dagstovnur_Stórabrekka_Vegaíbinding_Kloakkíbinding, journal nr. 18/03848-9

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið sum ætlan fyri Stórubrekku, og at umsitingin arbeiðir víðari við at nágreina uppskotið, áðrenn málið aftur verður at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2018:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.
Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Hóast tað var vanligt at búgva tætt saman, so hevur tað í Havn verið óvanligt at byggja húsini saman. Tað eru nógvir fyrimunir við at byggja tætt og lágt, tí tað krevur minni lendi, styttri vegir og leiðingar, betri lívd til vøkstur og tilhald úti, felagsøki, spælipláss og samskifti við onnur.

Fyrst 1950 árunum vórðu raðhús bygd fram við Jóannesar Paturssonar gøtu, og seinni hava vit somuleiðis sæð raðhúsabygging í eysturbýnum m.a. við Bókbindaragøtu, í Tórsbyrgi og á Berjabrekku. Men í 1990 árunum tordi kommunan at gera eina nýggja roynd at byggja tættari bústaðir. Grundin og eldverjuveggir vórðu bygd fyrst, og síðani kundi tann einstaki keyparin taka við og byggja sjálvur og soleiðis seta sín egna dám á innan fyri felags karmarnar. Talan er um tær báðar raðhúsbyggingarnar Millum Gilja og Inni á Gøtu. Hesar byggingarnar eru samansettar av húsum, ið eru bygd eitt og eitt í senn. Úrslitið er ein fín javnvág millum fría valið hjá hvørjum einstakum eigara av innrætting, tilfari og litum og so felags heildina, sum støddir, tekjur og samanbyggingar hava við sær.

Skipanaruppskotið fyri Stórubrekku fevnir um trý klingruskap við ávikavist raðhúsum og íbúðum. Lagt verður upp til, at klingruskapið í miðjuni (byggistig 1), sum somuleiðis er størsta skapið av teimum trimum, verður skipað sum raðhúsabyggingin nevnd omanfyri, at grundin og eldverjaveggirnir fyrst verða gjørdir, og síðani seta einstøku keypararnir sín dám á bygginging. Treytir viðvíkjandi skapi og útsjónd, sum skapa eina heildarmynd av byggingini, verða ásettar í serstaka byggisamtykt. Tað kann t.d. vera, at allar tekjurnar skulu vera eins fyri at skapa eitt samanhangandi strekki og heildarmynd fyri bygginging.

Umrøtt hevur verið við Bústaðir at fara í samstarv um verkætlan at fremja byggistig 3 í verkætlanini, sí skjal yvir klingruskapini og byggistig 1-3. Bústaðir vístu áhuga fyri hesum samstarvi, og tí verður mælt til at fara undir eitt fyrireikandi samstarv.

**Skjøl:**
Stórabrekka_Byggistig 1-3, journal nr. 17/01822-13

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av byggistigi 1 at leggja fyri nevndina aftur, at fara í samstarv við Bústaðir um byggistig 3, við tí endamáli at selja økið til Bústaðir at byggja íbúðir á, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bjørg Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen: Mælt verður til at heimila upsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av byggistigi 1 at leggja fyri nevndina aftur.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projektering, útbjóðing og projektuppfylging sum heildarráðgeving av verkætlanini á Stórabrekku í Hoyvík út til ráðgevararnar Arkitekar 99, Brim Arkitektar, SNA og Kontrast, og eru tilboðini soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Arkitektar 99: | 6.071.500,00 kr. u/mvg. |
| Brim: | 4.949.430,00 kr. u/mvg. |
| SNA: | 4.829.440,00 kr. u/mvg. |
| Kontrast: | 3.879.250,00 kr. u/mvg. |

Kappast varð uppá prís (80%), samanseting av toymi (10%) og tíðarætlan (10%) og er greitt, at Kontrast vann útboðið við lægsta tilboði.

Stórur munur var á tilboðunum, og mælir umsitingin til at fara í realitets samráðingar við Kontrast um møguligan ráðgevarasáttmála. Um partarnir ikki kunnu semjast um ein sáttmála, verður ynskt at fara í samráðingar við annan ráðgeva.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin fer í realitetssamráðingar við Kontrast um møguligan ráðgevarasáttmála, at leggja málið fyri aftur nevndina, tá ráðgevaraupphæddin er kend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabøð, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin fer í realitetssamráðingar við Kontrast um møguligan ráðgevarasáttmála. Tá semja er um ein ráðgevarasáttmála, verður málið lagt fyri nevnd aftur til endaliga støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at kr. 2.300.000 verða játtaðar til ráðgeving av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L62034, Vágsbotnur skipan av økinum, á konto 6475, Byggibúning bústaðir, á nýggja verkætlan "Útstykking Stórabrekka", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti.
Barbara Mikkelsen fór av fundinum, meðan hetta málið varð viðgjørt.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskoti frá umboðunum hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum: Mælt verður til at sleppa ætlanini at stykkja út í Stórubrekku og í staðin víðka um frílendið í økinum til eisini at umfata Stórubrekku, sum m.a. skal nýtast til nýggja viðarlund í Hoyvík. Samstundis verður mælt til at staðseta nýggjar útstykkingar við Stórutjørn.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bergun Kass og Bogi Andreasen.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bergun Kass og Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Samtykt við aðru viðgerð við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrin Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 155/20 Nýggj umsókn um broyting av byggisamtykt til útstykking á matr. nr 83a, Hvítanes

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 146/20 | 20/02249-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 155/20 | 20/02249-2 |
| 3 Hvítanesnevndin | 23.06.2020 | 4/20 | 20/02249-2 |
| 4 Býráðsfundur | | | 20/02249-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn er send Tórshavnar kommunu, har søkt verður um at víðka almennu byggisamtyktina fyri Hvítanes fyri matr.nr. 83a. Nágreiniliga verður søkt um at víðka verandi áseting B Bústaðarøki eitt vet norð-eystureftir frá at vera 4. grundumráði til at verða B Bústaðarøki og at broyta F Almenna frítíðarøkið, sum í verandi støðu liggur sum ein partur av vegnum, eisini til B Bústaðarøki, sí skjølini *Umsókn um broyting í byggisamtyktini* og *Áðrenn broyting.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsøkjarin hevur ætlanir um at byggja 9 bygningar, við tveimum íbúðareindum í hvørjum bygningi á ognini matr. nr. 83a, sí skjal *20200616 Hvítanes - Hús við 2 íbúðum,.pdf*. Um loyvið skal gevast til byggingina, er fyrst neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri Hvítanes, sum greitt frá omanfyri (sí kortskjal 'Eftir broyting').

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul 203a liggur í 4. grundumráði og er tí avsett til landbúnað, almenn frílendi og tílíkt. Loyvt er einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

Umráðisparturin B-Bústaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes verður lagdur til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi ella tvíhús til eitt húski í hvørjari húsaeind.

Bygging í økinum er fevnt av løgtingslóg um náttúrufriðing smb. §2, stk. 2:
*Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*

1) *Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at broytingin, ið søkt verður um, er lítil í mun til verandi byggisamtykt og at broytingin kemur at hava lítla ella onga ávirkan á verandi øki.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Umsóknin hevur verið til umrøðu hjá byggideildini og ongar viðmerkingar eru í mun til broyting av byggisamtyktini.

Um málið fer til víðari viðgerð, vil byggideildin tó síggja eina fullføra verkætlan av útstykkingini og byggingini við vegum, kloakkum o.ø., umframt tekningar av húsunum, soleiðis at ein málsviðgerð kann fara fram (sí skjali 'Umsókn um útstykkingarætlan 16.06.2020.pdf')

Mælt verður til at málið verður sent Náttúrufriðingarmyndugleikanum til nýggja viðgerð, av tí at tað eru uml. 12 ár liðin síðan eitt líknandi mál seinast var til hoyringar hjá Náttúrufriðingarmyndugleikanum (sí skjalið 'Hvítanes Dispensatión frá Yvirfriðingarnevndini')

**Skjøl**
20/02249-4 Umsókn um útstykkingarætlan 16.06.2020.pdf
20/02249-4 20200616 Hvítanes - Hús við 2 íbúðum,.pdf
20/02249-4 Hvítanes. Dispensatión frá yvirfriðingarnevndini
20/02249-5 Áðrenn broyting
20/02249-5 Eftir broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at samtykkja broytingina í byggisamtyktini sambært kortskjalinum *Eftir broyting*, treytað av góðkenning frá avvarðandi myndugleikum, og at beina málið í býráðið, umvegis staðbundnu nevndina.

**Hvítanesnevndin 23. juni 2020:** Staðbundna nevndin viðmælir broyting av byggisamtyktini, og at p-plássini verða flutt sunnanfyri byggingina, eins og at rúm verður fyri einum vendiplássi sunnanfyri byggingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghld Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

## 156/20 Uttanhýsis kanning av framtíðar tørvi á brennistøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.06.2020 | 147/20 | 20/00758-1 |
| 2 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 125/20 | 20/00758-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 156/20 | 20/00758-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/01200 Kanning um økt samstarv millum Kommunalu Brennistøðina og IRF og mál 20/00345 Uttanhýsis kanning av samanlegging av KB og IRF.

Á býráðsfundi 30. januar 2020 samtykti býráðið einmælt soljóðandi uppskot:

"At seta arbeiðsbólk at lýsa fíggjarligu fyrimunir og vansar fyri Tórshavnar kommunu at gera eina felags brennistøð ella framhaldandi skulu hava tvær brennistøðir. Kannast skal eisini hvørjir orku- og umhvørvisligir fyrimunir og vansar eru við einari ella tveimum brennistøðum.

Arbeiðsbólkurin skal vera mannaður av uttanhýsis serkønum innan fíggjarviðurskifti, verkfrøði og orku/umhvørvi. Arbeiðsbólkurin skal gera eina búskaparliga frágreiðing og greining av, hvussu framtíðin sær út í Tórshavnar kommunu við atliti at brenning, burturbeining og framtíðar skiljing av ruski, tá vit skulu verða meira burðardygg á tí grønu leiðini. Somuleiðis verður at kanna hvat tað kostar at byggja nýggjan ovn afturat verandi ovni á Sandvíkarhjalla.

Arbeiðsbólkurin skal gera eina tørvsmetning av, hvat ið krevst av plássi, støðd á brennistøð og hvørjir matr. á Hjalla eru tøkir til møguligt økt virksemi á økinum eitt nú høll til at skilja, brennistøð o.a.

Politiskur fylgibólkur umboðandi allar flokkar í Býráðnum verður settur til tess at fylgja arbeiðinum."

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til at játta kr. 800.000 til kanningina at fíggja av konto 2512 Integratión kr. 677.000 og kr. 123.000 av konto 6611 Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2020:** Samtykt at játta kr. 800.000 til kanningina at fíggja soleiðis:
Av konto 2512 Integratión kr. 577.000,
Av konto 6611 Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk kr. 123.000
Av konto 7110 Renovatión kr. 100.000
Og beina málið í býráðið, sum eykajáttan til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 157/20 Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 170/17 | 17/02748-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 222/17 | 17/02748-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 145/20 | 17/02748-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 157/20 | 17/02748-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 23.06.2020 | 34/20 | 17/02748-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 23.06.2020 | 32/20 | 17/02748-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu var á fyrsta sinni gjørd í 1972 sambært løgtingslóg nr. 13 um byggisamtyktir og býarskipan frá 21. mai 1954.

Byggisamtyktin varð endurskoðað í 1996 og seinast í 2009 í sambandi við, at býráðið og umsitingin ynsktu at endurskoða almennu byggisamtyktina og tær serstøku byggisamtyktirnar.
Síðani eru nógvar broytingar gjørdar bæði í kortskjalinum í almennu byggisamtyktini og tekstinum tó uttan, at hon er endurskoðað sum heild.
Dagførda almenna byggisamtyktin varð endaliga góðkend í desember 2012.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 2. mai 2005 og býráðið 26. mai 2006 (mál nr. 2005-1123) at seta ein bólk til at endurskoða og nútíðargera byggisamtyktina.
Endamálið var at fáa eitt betur stýrisamboð til dagligan rakstur og framtíðar útbyggingar av kommununi.
Samstundis varð tað gingið ígjøgnum verandi byggisamtykt, bæði viðvíkjandi ásetingum og reglum eins og kortskjal.
Býráðið tók undir við hesum tilmæli:
*Tilmæli:*
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd, heilsu- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina góðkennir ætlaðu skipanina av arbeiðinum og velur eina serstaka nevnd við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, samansett av 2 umboðum fyri byggi- og býarskipanarnevndina, 1 umboð fyri teknisku nevnd, 1 umboð fyri heilsu- og umhvørvisnevndina, tekniska stjóranum, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum, til at standa fyri arbeiðinum at endurskoða og nútímansgera byggisamtyktina. Samstundis verður mælt til, at fylgibólkurin ið settur er sambært býráðssamtykt 26. mai 2005, j. nr. 2005-1123, verður avtikin.*

Tey seinastu árini eru heilt nógvar umsóknir um broyting í byggisamtyktum komnar umsitingini í hendi. Søkt verður um broytingar, ið ikki skuldu verið neyðugar í mun til bygging og samtíðina. Tí er ynski um at endurskoða ta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktirnar av nýggjum. Ítøkiliga skulu byggisamtyktirnar dagførast, gerast tíðarhóskandi, verða meiri skipaðar og kunna umsitast skynsamt.

Bygningskunngerðin ásetir, at har sum ein góðkend byggisamtykt er, gongur hon framum ásetingarnar í BK17 kap. 2 um bygningsreguleringar og ásetingar.
Serstakar byggisamtyktir liggja omaná bæði bygningskunngerð og almennu byggisamtyktina.
Broytingar í byggisamtyktum eru ikki fyrisitingarligar avgerðir, men skal metast sum eitt reguleringsamboð ella "lóggávubroyting". Tí skal viðmælast til at tær skulu fylgjast.

**Mannagongd:**
Í fyrstu atløgu verður málið lagt fram til býráðið at umrøða

Skotið verður upp at skipa ein arbeiðsbólk og stýrisbólk, har tíð verður sett av til at arbeiða miðvíst við byggisamtyktunum. Atlit skulu takast til bygningskunngerðina og aðrar kunngerðir og ætlanir, soleiðis at gjøgnumskygni og samsvar er millum almennu byggisamtyktina, serstøku byggisamtyktirnar, kunngerðir og ætlanir, ið annars umrøða bygging og byggisamtyktir.

Allar deildir og starvsfólk, ið beinleiðis hava við byggisamtyktir at gera, skulu vera tikin til orðanna. Byggisamtyktirnar eru eitt sera týdningarmikið amboð og grundarlag fyri framtíðar útbygging av kommununi. Tí er neyðugt at øll, ið dagliga arbeiða við byggisamtyktum, gerast ein partur av arbeiðinum at endurskoða byggisamtyktirnar.

Týdningarmikið er, at tíð verður sett av til endurskoðanina. Arbeiðið kann skipast við einum arbeiðs- og stýrisbólki, har avgerast skal, hvør situr í ávikavist arbeiðs- og stýrisbólkinum. Í stýrisbólkinum kunnu býráðslimir og umboð fyri teknisku umsiting sita við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri. Fylgibólkar kunnu samstundis setast í verk við ávísum uppgávum, um neyðugt.

Uppskot til arbeiðsbólk:
Sigurd Justinussen, málsviðgeri
Rakul Vest Højgaard, málsviðgeri
Hans Suni Eiriksfoss, byggimálsviðgeri

Uppskot til stýrisbólk:
Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini
Tekniski stjórin
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini
Býararkitekturin

Endurskoðan og dagføring av byggisamtyktum kann fara fram 5. hvørt ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrra málið um endurskoðan av byggisamtyktunum:
2009-0216

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at umrøða málið um endurskoðan av byggisamtyktunum, at samtykkja uppskotið til mannagongd við arbeiðs- og stýrisbólki, umframt at dagføring av byggisamtyktum fer fram 5. hvørt ár og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at politisku umboðini verða Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Vísandi til § 36, stk. 1 í løgtingslóg um kommunustýri kann kommunustýrið seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd, og sambært § 36, stk. 2 í somu lóg er tað kommunustýrið, sum ásetir nærri reglur um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla býráðnum til at velja limir í stýrisbólkin, ið skal endurskoða byggisamtyktirnar.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu býráðssamtykt hevur støðugt verið arbeitt við at endurskoða byggisamtyktirnar. Ásannast má, at arbeiðið hevur verið drúgt, men eftir gjølla gjøgnumgongd er klárt at leggja uppskotið av endurskoðaðu almennu byggisamtyktini til viðgerðar.

Saman við stýrisbólkinum varð avgjørt at raðfesta almennu byggisamtyktina fyrst, síðani byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og til síðst tær serstøku byggisamtyktirnar.

Arbeiðið at endurskoða ta almennu byggisamtyktina varð býtt í trý stig:

1. **Endurskoðan í mun til Bygningskunngerðina 2017 (BK17)**

   Í 2016 setti Landsverk Bygningskunngerðina 2017 í gildi, sum er galdandi fyri bygging í øllum Føroyum. Í BK17 eru ásetingar um ymisk viðurskifti innan bygging, so sum byggiregulerandi ásetingar, innrætting av bygningum, konstruktiónir, brunaviðurskifti, inniumhvørvi, orka og innleggingar.

   Áðrenn BK17 kom í gildi, vóru ongar landsdekkandi reglur viðvíkjandi omanfyristandandi viðurskiftum, og tí vórðu tær flestu av hesum ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Eftir at BK17 kom í gildi, vórðu fleiri av teimum somu viðurskiftunum umrødd í bæði BK17 og í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og kundi hetta tykjast ørkymlandi hjá summum borgarum. Tí varð tað mett at verða skilabest, at tær ásetingarnar, sum nú eisini stóðu í BK17, vórðu tiknar úr almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

   Sí annars skjalið *Endurskoðan í mun til BK17*, sum samanber kapitlarnar í almennu byggisamtyktini við kapitlarnar í Bygningskunngerðini 2017.

2. **Endurskoðan av kortinum (býarskipanini)**
   Næst varð farið í holt við at endurskoða kortið, ið skipar býin í tey ymisku økini. Nógvar broytingar/tillagingar eru gjørdar, og kunnu hesar síggjast á skjalinum *Endurskoðan av býarskipanini 17.06.20*, men nakrar orsakir eru gjøgnumgangandi, og tær eru:

   - Tillaging í mun til markaviðurskifti.
   - Broyting soleiðis at samsvar er við virksemið í økinum.
   - Broyting í sambandi við at ásetingarnar fyri økið eru broyttar.
   - Broyting, soleiðis at skúlar liggja í D3 øki, sum er kannað endamálinum.

3. **Endurskoðan av byggifyriskipandi ásetingunum**
   Tað er í kapitlinum "byggifyriskipandi ásetingar", at reglur viðvíkjandi bygging, so sum hædd, byggistig, nýtslustig, í teimum ymisku økjunum eru ásettar. Kapittulin er tann største parturin av Almennu byggisamtyktini, og tá tey viðurskiftini, ið eru umrødd í BK17, eru tikin úr Almennu byggisamtyktini, er tað eisini hesin kapittulin, ið fyllir meginpartin av Almennu byggisamtyktini.

   Broytingin av teimum byggifyriskipandi ásetingunum er býtt í tveir partar:

   - Raðfylgja og orðagreiningar; Raðfylgjan av ásetingunum í teimum ymisku økjunum var ymisk og orðað ymiskt. Fyrsta stigið í endurskoðanini av teimum byggifyriskipandi ásetingunum var at skipa ásetingarnar eins, við t.d. at brúka tær somu orðingarnar og raðfylgjuna. Somuleiðis var tørvur á at greina nøkur av orðunum, m.a. orðið "miðstaðabygging" nærri, sí skjal *Byggifyriskipandi ásetingar.*

- Broytingar av ásetingum; Nakrar fáar broytingar eru av ásetingunum fyri tey ymisku økini, t.d. er áseting um umhvørvisflokking koyrd inn í øllum økjum, har bústaðir og vinna er blandað.

  Størsta broytingin er í B-vinnuøkjunum. Áðrenn endurskoðanina vóru 11 ymisk vinnuøki, og í fleiri av teimum eru frábrigdini lítil. Yvirskipað eru tey býtt í 4 bólkar: 2 ymisk øki til havnavirksemi, 3 ymisk øki til vinnuvirki við "lættari" vinnu, 3 ymisk øki til vinnuvirki við "tyngri" vinnu og 2 ymisk øki, sum eru blandað vinna og miðstaðabygging.

  Tað, at tað eru so nógv ymisk vinnuøki, kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru so lítlir. Ynskið er at fækka um hesi vinnuøkini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir. Soleiðis kann man fremja ein hugburð og siðvenju, har tann Almenna byggisamtyktin verður tann støðuga, varandi skipanin av býnum, meðan tær serstøku byggisamtyktirnar taka atlit til gongdina í samfelagnum, politikkir, ætlanir o.s.fr.

  Uppskotið til endurskoðanina av B-vinnuøkjunum er gjørt út frá meginreglunum, sum eru nevndar omanfyri, og eftir endurskoðanina eru tey 11 vinnuøkini minkaði niður í 6 ymisk vinnuøki: 2 til havnavirksemi, 2 til vinnuvirki við "lættari" vinnu og 2 til vinnuvirki við "tyngri" vinnu.

  Sí annars nærri frágreiðing um broytingar av byggifyriskipandi ásetingum í skjalinum *Byggifyriskipandi ásetingar B og C øki.*

Nøkur avleidd mál standast av endurskoðanini av Almennu byggisamtyktini:

- Ein avleiðing av at hava eina meginreglu, har økini (t.d. vinnuøkini) gerast færri er, at fleiri serstakar byggisamtyktir skulu gerast, og er neyðugt at gera hesar, samstundis sum at endurskoðaða Almenna byggisamtyktin verður sett í gildi.
- Av tí at tær serstøku byggisamtyktirnar eru heimilaðar í tí Almennu byggisamtyktini, og at hendan nú verður endurskoðað, er somuleiðis neyðugt at gera broytingar í nøkrum av teimum serstøku byggisamtyktunum, samstundis sum at endurskoðaða Almenna byggisamtyktin verður sett í gildi, sí skjal *Yvirlit yvir avleidd mál.*

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**

Í stýrisbólkinum vóru:
Marin Katrina Frýdal (Politiskt umboð)
Jákup Dam (Politiskt umboð)
Tróndur Sigurðsson (Politiskt umboð)
Marius Müller (Tekniskur stjóri)
Óli á Grindafløtti (Leiðari á byggi- og umhvørvisdeildini)
Birita Wardum(Býararkitektur)/Barbara Mikkelsen (Leiðari á Býarskipanardeildini)

Í arbeiðsbólkinum vóru:
Rakul Vest Højgaard (Býarskipanardeildin)
Hans Nielsen (Tekniska deild)
Hans Suni Eiriksfoss (Byggi- og umhvørvisdeildin)

Harumframt hevur hoyring og framløga verið fyri umboðum fyri býarskipanardeildina, byggi- og umhvørvisdeildina, teknisku deild, stjórnarskrivstovuna, og havnarskrivstovuna.

- *Endurskoðan í mun til BK17,* journal nr. 17/02748-25.
- *Byggifyriskipandi ásetingar,* journal nr. 17/02748-25.
- *Byggifyriskipandi ásetingar B og C øki,* journal nr. 17/02748-25.
- *Endurskoðan av almennu byggisamtyktini 17.06.20,* journal nr. 17/02748-26.
- *Endurskoðan av býarskipanini 17.06.20,* journal nr. 17/02748-26.
- *Yvirlit yvir avleidd mál,* journal nr. 17/02748-27.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at:
- Samtykkja uppskotið til endurskoðaða Almenna byggisamtykt sambært skjølunum *Endurskoðan av almennu byggisamtyktini 17.06.20* og *Endurskoðan av býarskipanini 17.06.20*.
- Samtykkja, at umsitingin fer undir at gera og broyta tær serstøku byggisamtyktirnar, sum verða beinleiðis ávirkaðar av endurskoðaðu Almennu byggisamtyktini.
- Beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 23. juni 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Tekniska nevnd 23. juni 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

## 158/20 Tøkir skúlabygningar 2019-2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.05.2019 | 171/19 | 19/01969-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 209/19 | 19/01969-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 225/19 | 19/01969-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 248/19 | 19/01969-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 236/19 | 19/01969-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 201/19 | 19/01969-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 268/19 | 19/01969-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 271/19 | 19/01969-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 28.10.2019 | 292/19 | 19/01969-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 289/19 | 19/01969-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 315/19 | 19/01969-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 14/20 | 19/01969-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 11/20 | 19/01969-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 126/20 | 19/01969-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 122/20 | 19/01969-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 168/20 | 19/01969-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 210/20 | 19/01969-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 187/20 | 19/01969-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 158/20 | 19/01969-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nýggi Musikkskúlin verður tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina og Skúlin á Fløtum verður tikin í nýtslu til skúlaársbyrjan 2020-2021. Í hesum sambandi verða fleiri bygningar tøkir til møgulig onnur endamál.

Húsaumsitingin hevur gjørt yvirlit yvir ymsar bygningar við stamdátum, bygningslýsingum og meting um bygningsstøði og í nøkrum føri um egna nýtsluendamál. Sí framløgu, ið løgd er fram í fíggjarnevndini.

Talan er í høvuðsheitum um skúlabygningar, sum knýta seg til verandi virksemið hjá Musikkskúlanum og Skúlanum á Fløtum, tó ikki Venjingarskúlan (Skúlaeindin á Frælsinum hjá Skúlanum á Fløtum), sum ætlandi verður avhendaður Mentamálaráðnum í sambandi við kampusætlanina.

Innan trivnaðarfyrisitingina eru nógv áleikandi mál um hølistørv bæði innan dagstovnaøkið, skúlaøkið og mentamálaøkið. Umframt kommunala hølistørvin, eru fleiri felagsskapir o.o., ið ynskja høli frá kommununi til frítíðarvirksemi, felagshøli v.m.

Aðrar ætlanir í kommununi fevna eisini um nakrar av hesum bygningum. Sum omanfyri nevnt er Venjingarskúlin ætlaður kampusætlanini. Arbeitt verður eisini við íbúðarætlan á Frúutrøð, har verandi musikkskúli og kommunulæknahøli er partur av ætlani.
Tað er tí eisini greitt, at til ber ikki at nøkta allan henda tørv og ætlanir annars við teimum bygningum, sum nú verða tøkir. Talan er í høvuðsheitum um Argja skúla, Realskúlin, Skúlan í Kongagøtu, Gula skúla við Landavegin og Skansastovu

Aðrir bygningar kunnu tó eisini koma í spæl. Verður t.d. NámX flutt út á Argir, sum uppskot er um, lata nýggir møguleikar seg upp í Eysturskúlanum eitt nú at skipa forskúlatilboð og frítíðarskúla í bygninginum, og bygningurin, sum í dag hýsir frítíðarskúlanum Smílibýlið, kann seljast ella nýtast til annað endamál. Øvugt, flytur NámX ikki út á Argir, kann tann skúlin brúkast til annað endamál.

Eisini á dagstovnaøkinum eru yvirskipað atlit at taka. Realskúlin sum dagstovnur er fyribilsloysn vegna vaksandi tørvin á dagstovnaplássum. Møguleikin antin at flyta ella víðka stovnin í Skúlan í Kongagøtu hevur týdning bæði fyri samlaða plásskapasitetin og íløguætlanina hjá kommununi, har leggjast má upp fyri nýbygging.

Havast skal í huga, at hóast bygningar verða tøkir, so eru ikki allir í besta standi ella egnaðir at flyta inn í uttan víðari. Eitt nýtt nýtsluendamál kann hava við sær útreiðslur til bygningsdagføringar í mun til myndugleikakrøv og neyðugar hølistillagingar, sum hædd skal takast fyri.

Mett verður, at nøkur av høvuðsmálunum, ið skulu takast við í hesa umrøðu, eru:

- Tørvurin á fleiri dagstovnaplássum
- Møgulig flyting av NámX
- Serskúlatilboð
- Frítíðarfelagsskapir

Umsitingin greiðir á fundinum nærri frá um ymsu tørvirnar, ætlanirnar og ynskini. Endamálið er, at fyrisitingin tekur samanum og ger tilmæli um samanhangandi raðfestingar til endaliga støðutakan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- Framløga um bygningar
- Kampusætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 708 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at fyrisitingin ger tilmæli um samanhangandi raðfesting av nýtsluendamálum til ymsu bygningarnar.

**Mentamálanevndin 13. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin saman við mentamáladeildini og barna- og ungdómsdeildini hava viðgjørt møguleikar fyri samanhangandi raðfesting til ymsu tøku bygningarnar.

Viðgerðin hevur tikið støði í áleikandi málum um hølistørv og ynski, sí einstøku lýsingarnar niðanfyri.

Í nøkrum førum verður mælt til ítøkiliga raðfesting av nýtsluendamáli og bygningi, í øðrum førum verður mælt til raðfesting at arbeiða víðari við.

Gjørdar eru ikki ítøkiligar kostnaðarmetingar av flytingum ella broytingum í virksemi.

**Guli skúlin á Landavegnum 32 (Skúlin á Fløtum – Eindin á Landavegnum)**
Viðgerðin hevur fevnt um:
- Sernámsfrøðilig skúlatilboð
- Dagstovnavirksemi
- Frítíðarvirksemi

Í løtuni heldur sernámsfrøðiligt skúlatilboð til í skúlanum, tað sonevnda 4-10 tilboðið. Innan skúlaumhvørvið eru ymisk faklig sjónarmið um, hvørt slík tilboð skulu ella kunnu vera í egnari eind ella tey heldur skulu vera integrerað í vanligum skúla. Væntast kann og fráboðað er vaksandi tørvur á hølum til sernámsfrøðilig skúlatilboð sum heild í kommununi, sí mál 18/04396 eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í Fólkaskúlunum. Har sum guli skúli er, ber til at byggja út á økinum.

a) Mælt verður til, at 4-10 tilboðið heldur fram.

**Skúlin í Kongagøtu, Realskúlin og Frk. Cohr**
Bygningarnir eru viðgjørdir undir einum. Viðgerðin hevur fevnt um:
- Dagstovnavirksemi, harundir viðvíkjandi máli um høvuðsumvæling av Vøggustovuni Stella Maris
- Framsýningarbygningur til Tórshavnar býarsavn og Tórshavnar listasavn
- Skúlavirksemi hjá Sankta Frans skúla (Mál 18/04026 Skúlastýrið í Sankta Frans skúla: Bygningsviðurskifti v.m.)
- Ymsar áheitanir um annað virksemi

Dagstovnur heldur í dag fyribils til í Realskúlanum sum liður í at nøkta tørvin á dagstovnaplássum. Uppskot er, at dagstovnurin heldur fram í realskúlanum og verður víðkaður við Skúlanum í Kongagøtu, ið sostatt verður stórur námsfrøðiligur miðbýarstovnur. Húsini hjá Frk. Cohr hýsa í dag frítíðarskúlavirksemi og kunnu knýtast uppí dagstovnavirksemið. Íløgan í klárgerð er lítil, hinvegin tálmar loysnin íløgutørvin hjá kommununi í nógvi pláss munandi

Vísandi til mál um stóra høvuðsumvæling av Vøggustovuni Stella Maris, verður skotið uppi heldur at niðurleggja Stella Maris sum stovn og flyta børnini í Kongagøtu/realskúlan. Hóast børnini í Stella Maris flyta í Kongagøtu/realskúlan, verða framvegis nýggj dagstovnapláss fingin til vega har. Barakkirnar í Kongagøtu verða tiknar burtur og gevur tað rúm fyri betri uttandura viðurskiftum.

b) Mælt verður til, at realskúlin, skúlin í Kongagøtu og Frk. Cohr verður at brúka til dagstovn sum samanhangandi tilboð, higar eisini børnini í Stella Maris flyta.

**Argja skúli (tann nýggjari og eldri) (í verandi støðu Skúlin á Fløtum – Eindin á Argjum)**
Bygningarnir eru viðgjørdir undir einum. Viðgerðin hevur fevnt um:

- NámX
- Dagstovnavirksemi í sambandi við mál um Dagstovnin á Argjum

Uppskot hevur leingi verið um, at NámX verður staðsettur í Argja skúla og skipaður sum sjálvstøðugur skúli (Mál 17/00298 Skúlabygnaður í Tórshavnar kommunu árini 2017-2021). Mett verður, at nýggjari skúlin aleina nøktar ikki allan hølistørvin, serliga mangla fakhøli. Hesi kunnu fáast til vega antin við at umbyggja eldra partin av Argja skúla ella við at taka hann niður og byggja nýtt upp til tørvin, so at NámX verður framtíðartryggjaður ungdómsskúladepil. Alternativ til hetta er at samstarva við aðrar skúlar um fakhøli.

Dagstovnurin á Argjum hevur átrokandi tørv á høvuðsumvæling. Tilmæli er um heldur at taka hann niður og byggja nýggjan og størri dagstovn á sama grundøki. Uttan mun til, um talan verður um nýbygging ella umvæling, so verður neyðugt at flyta børnini úr stovninum, meðan bygt verður. Uppskot er, at nýggjari partur av Argja skúla verður brúktur til dagstovn, meðan bygt verður ætlandi árni 2021-2022. Viðv. gamla Argja skúla verður nærri støða tikin seinni. Í verandi støðu hava m.a. AA-felagsskapir virksemi har.

Í hesum tíðarskeiðið eigur verkætlan at fáa tørvandi høli til NámX fyrireikað og gjørd soleiðis, at NámX kann flyta út á Argir 2022 ella 2023, ella at samstørv verða skipað við skúlar um hesi høli.

c) Mælt verður til, at NámX flytur út á Argir og neyðug høli verða fingin til vega, men at skúlin í fyrsta umfari hýsir børnum í dagstovninum á Argjum í sambandi við byggimál.

**Eysturskúlin og Smílibýlið**
Bygningarnir eru viðgjørdir undir einum. Viðgerðin hevur fevnt um:

- NámX
- Forskúla og frítíðarskúla
- Sernámsfrøðilig skúlatilboð

Tá NámX er flutt út ætlandi uml. 2022-23, kann frítíðarskúli til Eysturskúlan flyta inn, eins og at møguleiki er at skipa forskúlatilboð. Við hesum kann frítíðarskúlin í Smílibýlinum niðurleggjast.

Um NámX ikki flytur úr Eysturskúlanum, verða ongar stórvegis broytingar.

d) Vísandi til tilmæli um at flyta NámX úr Eysturskúlanum, verður harumframt mælt til at flyta frítíðarskúlan í Smílibýlinum inn í Eysturskúlan umframt at skipa forskúlatilboð.

**Skansastova**
Viðgerðin hevur fevnt um:

- Frítíðarvirksemi

Bygningurin kann hýsa fleiri frítíðarendamálum. M.a.Lions Club Tórshavn (menn) og Lions Liljan

kann Lions eisini fara úr leigumálinum við kommununa í Múllers pakkhúsi, og sum kommunan hevur ynski um.

Boð uppá miðhæddina kann vera leigað bridgefeløgunum evt. sum býti fyri bridgehúsið. Samráð um hetta er ikki tikin upp enn. Tøkum lætt heldur til í niðastu hædd, men høli kann tó eisini brúkast til annað virksemi. Týdningarmikið er tó, at virksemini í húsinum hóska til hvørt annað.

e) Mælt verður til at geva frítíðarfelagsskapum leigumál í bygninginum.

**Venjingarskúlin lon 4 (Skúlin á Fløtum – Eindin á Frælsinum)**
Viðgerðin hevur fevnt um:
- Frítíðarvirksemi

Vísandi til ætlanina um Fróðskaparsetur/kampus verður venjingarskúlin fyribils ikki tikin við í hesa viðgerð. Her verður kortini víst á, at Lon 4 er 100% kommunal ogn. Lonin er staðsett ytst í ætlaða kampusøkinum móti høllini á Stórheyggi. Hugsast kann, at lonin verður ikki fevnd av teim fyrstu byggistigunum í kampusætlanini.

Lon 4 kundi komið inn í myndina aftrat ella í staðin fyri Skansastovu, ið er minni bygningur. Hugsandi er, at til ber at hýsa bridge, talvi, golfsimulatori, dart v.m. í lon 4.

f) Mælt verður til at kanna møguleikarnar við Lon 4 nærri.

**Gamli musikkskúlin á Frúutrøð** 1
Viðgerðin hevur fevnt um:
- Fyribils býarsavn

Í løtuni verður fyrireikað íbúðarætlan saman við Bústøðum (mál 18/00950 íbúða-rbygging á Frúutrøð). Um hetta skuldi komið í drag, er møguleiki, at bygningurin eitt tíðarskeið hýsir Tórshavnar býarsavni at brúka til framsýningar og skrivstovuhald v.m. GHM hevur leigumál á ovaru hæddini og skal ein loysn finnast til teirra í næstum.

g) Mælt verður til at hava henda møguleika opnan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
a) At 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum heldur fram í bygninginum á Landavegnum.
b) At Realskúlin, skúlin í Kongagøtu og Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð, og at børnini í Vøggustovuni Stella Maris flyta higar
c) At NámX flytur í Argja skúla tó eftir, at Dagstovnurin á Argjum er liðugt bygdur
d) At um og tá NámX flytur út á Argir, so flytur frítíðarskúlin Smílibýlið í Eysturskúlan og forskúlatilboð verður skipað
e) At Skansastova verður at leigað út til frítíðarfelagsskapir
f) At møguleikarnir fyri at brúka Lon 4 í venjingarskúlanum til frítíðarvirksemi verða kannaðir
g) At møguleikin at brúka gamla musikkskúlabygningin á Frúutrøð til fyribils býarsavn, verður hildin opin alt eftir, hvussu íbúðarætlanin verður realiserað.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt
Mentamálanevndin 24. juni 2019: Samtykt at taka undir við a) at 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum heldur fram í bygninginum á Landavegnum. Samtykt at taka undir við b) tó soleiðis, at Realskúlin, skúlin í Kongagøtu og Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð. Samtykt at taka undir við f) at møguleikarnir fyri at brúka Lon 4 í venjingarskúlanum til frítíðarvirksemi verða kannaðir.

Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka undir við c) at NámX flytur í Argja skúla tó eftir, at Dagstovnurin á Argjum er liðugt bygdur og d) at tá NámX flytur út á Argir, so flytur frítíðarskúlin Smílibýlið í Eysturskúlan og forskúlatilboð verður skipað.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam, taka ikki undir við c) og d).

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam, mælir til at gamli musikkskúlin Frúutrøð verður dagstovnur.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Víst verður til tilmæli til undanfarna mentamálanevndarfund 17. Juni 2019. Á fundinum var støða ikki tikin til pkt. e) og pkt. g).

Mett verður hóskandi at fáa avklárað hesi mál um somu leið sum hini vera viðgjørd í fíggjarnevndini.

Viðv. pkt. g).
Mett verður neyðugt at kanna neyvari og fáa meting um, hvussu Býarsavnið, ið hevur átrokandi tørv á hølisumstøðum (bæði skrivstovu & framsýning) í einum fyribils tíðarskeiði kundi húsast har, meðan íbúðarætlanin verður fyrireikað.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera kanning av fyritreytunum fyri, at Býarsavnið fyribils kann húsast í bygninginum á Frúutrøð 1 og, um samtykt í fíggjarnevndini, leggja málið aftur fyri nevnd í oktober.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum og punkt e og g í tilmælinum til fundin 24. juni 2019 og beina málið í fíggjarnevndina.

Meirilutin ynskir at umsitingin kannar fyritreytirnar fyri at ogna sær Nólsoyarstovu til býarsavn.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Eini meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við Mentamálanevndini og krevur málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur og Helena Dam á Neystabø, býráðslimur krevja málið fyri býráðið.
Býráðsfundur 26. september 2019: Broytingaruppskot frá Gunvør Balle um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið bleiv einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 28. oktober 2019:** Nevndin samtykti at:

- 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum heldur fram í bygninginum við Landavegin,
- Realskúlin, skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð,
- Argja skúli verður tillagaður til fyribils dagstovn í sambandi við, at nýggjur dagstovnur á Argjum verður bygdur,
- Skansastova og Lon 4 í Venjingarskúlanum verður leigað út til frítíðarvirksemi, og at umsitingin til næsta fund leggur fram uppskot til, hvat virksemi kann húsast har, og
- at møguleikin at brúka gamla musikkskúlabygningin á Frúutrøð til fyribils býarsavn, verður hildin opin alt eftir, hvussu íbúðarætlanin verður realiserað,

og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Begun Kass, Gunvør Balle og Heðin Mortensen, tekur undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at viðv. Argja skúla er svimjihøllin og fimleikarahøllin ikki fevnt av ætlaðu broytingunum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi blankt.

**Ískoyti**
Viðv. møguleikum fyri frítíðarvirksemi í Skansastovu

**Verandi hølir**: (sí hjáløgdu tekning)
Loftshædd býtt upp í fleiri smærri høli
Miðhædd býtt upp í fleiri smærri høli, umframt WC.
Veghædd býtt upp í eitt størri rúm, umframt fleiri heilt smærri rúm íroknað WC.

**Bygningsstøðan**:
Um nýtt virksemi av almannagagnligum slag kemur í bygningin og sum krevur ymsar umbyggingar má roknast við at ymisk krøv í BK17 vera gjørd galdandi av byggivaldinum.

Umsitingin er í holt við at gera eina byggifakliga meting um málið, ið kann fyriliggja til komandi fund.

- Felagsskapir, ið hava sýnt áhuga fyri virksemi í Skansastovu ella kundu verið aktuellir til tað:

**Lions Club Tórshavn/Lions Club Liljan**
Viðm.: Ynskja sær høli á loftinum og vilja samstundis lata fara leigumálið á loftinum í Mullers Pakkhúsi. Teirra verkætlan inniber eina umbygging av loftinum m.a. at umskifta skilaveggir, gera minni køk, umframt ves. Í felagnum eru limir, sum í stóran mun kunnu standa fyri arbeiðinum sjálvir.

**Tøkum lætt**
Viðm.: Hevur avmarkað dansivirksemi í kjallarahæddini. Er serliga sunnukvøld umleið 40 vikur um árið, men ynskir sær møguleika fyri fleiri tíðum. Virksemi hevur inntil á sumri deilt brúkið av rúminum við virksemi hjá rútmisku deild á musikkskúlanum. Sí hjálagt umsókn frá felagnum. Mál 16/01390 - Andreas Sigurstein: Áheitan vegna Dansifelagið Tøkum Lætt at hjálpa teimum við hølisviðurskiftunum.

**Mentón/Føroya tónleikarafelag**
Ynskja at hava venjingarhøli og verkætlanarhøli í bygninginum sum heild. Hetta virksemi vil hava týðandi

allan bygningin, men møguliga kundi virksemi verið í kjallaranum og miðhæddini um so er, at brúkararnir í húsinum avtala, nær tónleikavirksemi er og ikki. Sí hjálagt umsókn frá felagnum. Mál 19/02066 - Mentón og Føroya Tónleikarafelag: Umsókn um venjingarhøli í Skansastovu.

**MC felagið**
Ynskir at hava atgongd til felags virksemi. Møguliga kundi tað verið kombinerað við Tøkum lætt í kjallaranum, men er ikki upplagdur møguleiki eisini tá atlit skal takast til, hvar limir seta súkklurnar. Sí hjálagt umsókn frá felagnum. Mál 19/01209 - Páll Johan Jarnfoss: Umsókn um lendi til virksemi hjá MC Vinum.

**Bridgehúsfelagið**
Sbrt. samtykt í máli 16/01316 – Vegna nevndina í Brigdehúsinum Pól E. Egholm: Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali, hava samráðingar verið við felagið um at yvirtaka ognina hjá felagnum í Gundadali. Eitt hugskot kundi verið at latið teimum miðhæddina í Skansastovu til teirra virksemi. Eins og við loftinum vil tað innibera umvælingar- og umbyggingar, herundir at broyta innirætting, betra um vesiviðurskiftini, gera minni køk, betra um atkomu við meiri. Alt eftir hvussu hvør semjan verður við felagið, kann roknast við ávísum útreiðslum fyri TK av hesum.

**Samanumtikið viðv. Skansastovu**
Sum sæst omanfyri er áhugin fyri bygninginum størri enn tað letur seg gera at eftirlíka. Roknast skal eisini við útreiðslum til ávísar dagføringar í bygninginum eisini til at fáa bygningin góðkendan til nýtt virksemi av hesum slag. Parkeringsviðurskifti á matrikklinum eru avbjóðandi, men parkeringsøki eru í nánd.

Viðv. møguleikum fyri frítíðarvirksemi í Lon 4 á Frælsinum

Verandi hølir: (sí hjáløgdu tekningar).

**Veghæddin hevur hesi høli:**
- 3 flokkstovur
- Bókasavnshøli (svarandi til uml. 2 flokkstovur)
- Hølið í millum bókasavnshøli og starvsfólkastovuna við klæðnarúmi + - 2 WC
- Starvsfólkastova (svarandi til uml. 2 flokksstovur) + køkur.
- Minni skrivstova
- Stór long ljós gongd
- Skrivstova + minni skrivstova + gongd (ca. 1/2 skúlastova)
- Hinumegin inngongdina: 3 smærri skrivstovur + WC

**Kjallarahæddin:**
- Hinumegin inngongdina: 3 smærri skrivstovur + WC
- Bókagoymsla (svarandi til uml. 2 flokksstovur)
- Goymsla (svarandi til uml. 2 flokksstovur)
- Gongir
umframt ventilatiónsrúm o.a.

**Bygningsstøðan:**
Um nýtt virksemi av almannagagnligum slag kemur í bygningin verður í høvuðsheitum ikki rokna við stórvegis krøvum í mun til byggilóggávuna. Samstundis er greitt at bygningurin fer at krevja ábøtur eins og aðrir og verður her helst serliga aktuelt at skifta vindeygu innan nøkur ár, umframt at drena betri framvið pørtum av bygninginum og at fugtumvæla partar av kjallaranum. Hinvegin eru p-viðurskiftini í økinum heilt góð til hesi virksemi sum í høvuðsheitum eru seinnaparts- og kvøldarvirksemir.

Umsitingin er í holt við at gera eina byggifakliga meting um málið, ið kann fyriliggja til komandi fund.

Verða nýggj virksemi skipað í bygninginum, so verður at taka hædd fyri, at bygningurin er partur av kampusætlanini, ið Mentamálaráðið, kommunan og Fróðskaparsetrið hava arbeitt við. Hetta merkir, at kommunan má sleppa úr leigumálum smidliga, tá tað gerst neyðugt.

- Felagsskapir, ið kundu verið aktuellir til virksemi í Lon 4:

**Lions Club Tórshavn/Lions Club Liljan**
Í staðin fyri Skansastovu hevði Lions Club ístaðin kunna fingið t.d. eina flokkstovu + part av skrivstovuhølum í Lon 4 ella fingið skrivstovuøkið burturav. Hetta vil ikki innbera stórvegis inntriv í bygningin. Hetta er treytað av at virksemi brúkar felags hentleikar. Lions Club hevur søkt um høli í Skansastovu.

**Tøkum lætt**
Um trægólv var lagt á eina av skúlastovunum vildi virksemi lættliga kunna verið staðsett har. Samstundis kundu hølini verið brúkt til annað virksemi hjá Kvøldskúlanum v.m. aðrar tíðir tá tað ikki verður dansað. Virksemi fær atgongd til felags hentleikar.

**Bridgehúsfelagið**
Sbrt. samtykt í máli 16/01316 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali hava samráðingar verið við felagið um at yvirtaka ognina hjá felagnum í Gundadali. Eitt hugskot kundi verið at latið teimum bókasavnshøli í Lon 4, samansett við felags nýtslu av køki við annað felag, umframt felags ves við annað virksemi. Krevur bæð smærri tillagingar. Harumframt kundi avtala verið gjørd við felagið um ávísar møguleikar fyri at annað virksemi kann brúka teirra hølir sbrt. avtalu.

**Havnar telvingafelag**
Sbrt. samtykt í máli 17/00846 Hølisviðurskifti o.a. – Havnar Telvingafelag hava samráðingar verið við felagið um útvega teimum eina hóskandi framtíðar hølisloysn. Starvsfólkastovan í Lon 4 saman við atgongd til aðrar hentleikar kundi verið eitt gott boð uppá loysn fyri felagið. Harumframt kundi avtala verið gjørd við felagið um ávísar møguleikar fyri at annað virksemi kann brúka teirra hølir sbrt. avtalu.

Alt eftir hvussu hølini verða útlutaði ber helst eisini til at hýsa hesum virksemi í fyrsta umfari ella í einum seinna umfari, alt eftir um og nær kjallarin verður tikin í nýtslu heilt ella lutvíst:

**Listgrafo**
Sbrt. samtykt í máli 17/01361 Listaverkstøð í Finsen er enn óloyst hvar felagið kann vera. Ein loysn er viðv. evningsstovuni í Finsen og onnur kundi verið antin í flokksstovu á veghæddini í Lon 4 ella í kjallaranum.

**Havnar Dartfelag**
Er pt. í leigaðum hølum (sí mál 17/04244 – Havnar dartfelag - hølisviðurskifti). felagið kundi verið ávíst til eina flokksstovu á veghæddini ella annað av størru rúmunum í kjallaranum.

**Argja Dart**
Er í leigaðum hølum og gott at fingið kanna eina loysn, ið lutvíst var saman við Havnar dartfelag. Mál 18/01692 Argja Dartfelag: Hølisviðurskifti v.m.

**Tórshavnar Golfklubbi - golfsimulator**
Manglar høli. Verkætlanin í Bacalao lat seg ikki gera og kundi t.d. fingið ávíst antin eina flokksstovu á veghæddini ella loysn í kjallaranum. Mál 18/02547 Jógvan Amonsson : Umsókn vegna Tórshavnar Golffelag um rakstrarstuðul til at húsa innanhýsis golfvenjingum.

**Mentón/Føroya tónleikarafelag**
Eins og lýst viðv. Skansastovu er ikki so líkatil at fáa slíkt virksemi sameint við annað virksemi, tó kundi

krevur umvælingararbeiðið, herundir ljóðbjálving so nærumhvørvið ikki verður órógva og inni í bygninginum.

**MC felagið**
Kundi evt. fingið lutvísan brúksrætt til onkur av hølunum. Krevur nærri metingar.

Harumframt er annað virksemi sum helst eisini kundi komið uppá tal.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fara undir samráðingar um leiguavtalur við fylgjandi felagsskapir í fyrsta umfari:
- Lions Club Tórshavn/Lions Club Liljan viðvíkjandi Skansastovu
- Tøkum lætt viðvíkjandi Skansastovu
- Bridgehúsfelagið viðvíkjandi antin Skansastovu ella Lon 4
- Havnar telvingafelag viðvíkjandi antin Skansastovu ella Lon 4
- Havnar dartfelag viðvíkjandi Lon 4
- Listgrafo viðvíkjandi Lon 4

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Nevndin samtykkir at fara undir samráðingar við nevndu frítíðarfelagsskapir um møguleikar fyri at húsast í annaðhvørt Lon 4 ella Skansastovu, og at fáa kannað, hvat mettur kostnaðurin er fyri at gera Skansastovu í stand sambært krøvum, og hvat mett søluvirði av bygninginum er – at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**
**Viðv. Musikkskúlabygninginum á Frúutrøð 1**
Vísandi til samtykt 28. okt. 2019 í mentamálanevndini og 30. oktober 2019 í fíggjarnevndini viðv. at møguleikin at brúka gamla musikkskúlabygningin á Frúutrøð til fyribils býarsavn, hevur umsitingin saman við Tórshavnar býarsavni, arbeitt við at lýsa møguleikarnar. Sí hjálagt ávegis frágreiðing frá Býarsavninum um ymiskar hættir at fremja verkætlanina uppá.

Húsaumsitingin fer síðani ætlandi saman við ráðgeva at meta nærri byggifakliga um uppskotini og við støði í tí verður gjørt eitt samlað tilmæli um savns- og bygningsviðurskiftini til nevndarviðgerð í vár. Talan kann vera um eina røð av broytingum, summar kunnu helst gerast innan játtanina hjá Húsaumsitingini, meðan onnur meiri týðandi átøk vilja krevja serstaka løgujáttan.

Samstundis er semja um, at ein komandi framsýning hjá Býarsavninum v.fl. í sambandi við at tað í mai 2020 eru 75 ár síðani endan av hersetingini av Føroyum, hóskandi eigur at vera í hølunum á Frúutrøð 1. Húsaumsitingini kemur ætlandi at gera nakrar smærri tillagingar í bygninginum soleiðis at har eru nøkulunda umstøður til ta framsýningina, eitt nú atkoma fyri rørslutarnað o.a. Tær tillagingarnar vera gjørdar innanfyri raksturin á Húsaumsitingini.

Sí eisini umsókn frá Býarsavninum í sambandi við framsýningina: Mál 19/05025 Havnin undir krígnum, ið eisini er á skrá til fundin.

Á loftinum hevur GHM síni felags- og venjingarhøli. Ætlanin er, at tey hald fram har so leingi eingin onnur nøktandi hølisloysn til teirra er funnin. Aftrat á loftinum eru onnur smá høli, sum við tillagingum kunnu gerast til skrivstovupláss. Sambært viðmerking frá býarsavninum ber ikki til at samantvinna ymiskt virksemi í bygninginum, soleiðis at aðrir brúkarar eisini hava sína gongd í húsinum.

**Læknahølini í Frúutrøð**
Ongar viðtalur eru longur í bygninginum og bygningurin tí tøkur til onnur endamál.

Møguleiki er at skipa hølini sum fyribils skrivstovur hjá eindarleiðarunum á dagstovnaøkinum, sum byrja í starvi 1. februar 2020. Í løtuni er eingin onnur skrivstovuloysn til eindarleiðararnar. Verður hetta ein meira varandi loysn, eiga ávísar tillagingar at verða gjørdar í innrætting.

Kommunan skal veita Gigni høli til smábarnavirksemið. Møguliga kann hetta skipast í bygninginum um so er, at bygningurin kann brúkast til endamál í longri áramál. Metast má, at Gigni tá vildi verið einasti brúkarin í bygninginum. Skal henda ætlan setast í verk, verður neyðugt at gera ætlan um innrætting v.m. og fígging fáast til endamálið.

**Viðv. skúlabygningunum á Frælsinum (samogn TK og landið)**
Í sambandi við viðgerðina á fundinum í mentamálanevndini 13. mai 2019 var í triðja reglubrotið skrivað: "Talan er í høvuðsheitum um skúlabygningar, sum knýta seg til verandi virksemið hjá Musikkskúlanum og Skúlanum á Fløtum, tó ikki Venjingarskúlan (Skúlaeindin á Frælsinum hjá Skúlanum á Fløtum), sum ætlandi verður avhendaður Mentamálaráðnum í sambandi við kampusætlanina."

Í yvirlýsing dagf. 29. apríl 2019 frá táverandi landsstýriskvinnu í mentamálum og borgarstjóranum varð avtalað, at partarnir gera fíggjarliga uppgerð yvir felagsognirnar á Frælsinum við tí endamáli, at kommunan avhendar landinum ognirnar í 2020.

Sum liður i hesum hevur kommunan skotið upp gerðabýti soleiðis, at kommunan fær til ognar lendi til bygging í Stjórutjørn. Hesar samráðingar eru ikki lidnar, hetta eitt nú av, at nýtt landsstýri er skipað, men gongd er í málinum.

Rakstrarviðurskiftini í samognini og lutvíst í Lon 4 eru skipaði við hjálagda sáttmála um býtið av felagsútreiðslum á Føroya læraraskúla og venjingarskúlanum frá 1992, tó so at sbrt. samskifti og praksis síðani, verður økið umsitið nakað øðrvísi enn ásett her.

Pt. verður avroknað uml. 1800 tkr./árið við Setrið fyri samognarraksturin umvegis rakstrarjáttanina hjá Skúlanum á Fløtum. Hartil hava verið onkrar útreiðslur gjøgnum árini innan bygningsviðlíkahald.

Ætlandi flytur Skúlin á Fløtum í nýggja bygningin á Fløtum í august 2020. Í hesum sambandi hevur Setrið spurt, um hvussu verður víðari í bygningunum á Frælsinum, tí tað er viðkomandi í mun til m.a. reingerðarfólk v.m., ið eru í føstum starvi og eru m.a. lønt av fíggingini gjøgnum Skúlan á Fløtum. Í flestu førum er talan um 6 mánaðar uppsagnarfreist. Ikki er roknað við at Skúlin á Fløtum framhaldandi skal rinda til Setrið fyri samrakstur eftir at skúlin er fluttur á

Á fundinum í mentamálanevndini 15. januar 2020 eru mál (bæði í hesum máli og í máli viðv. sernámsfrøðiliga økinum) sum viðvíkja nýggjum kommunalum virksemi í bygningunum á Frælsinum.

Mett verður tí hóskandi, at kommunan tekur upp samskifti við Setrið/landsstýrið um framtíðar rakstrarviðurskifti og avtalum tí viðvíkjandi, og soleiðis at Setrið kann gera av, hvussu verður við reingerðarfólki, húsavørðum v.m. Hetta hevur eisini týdning viðvíkjandi møguligari nýggjari fígging frá kommununi eftir summarið rakstur.

Mett verður eisini skilagott, at partarnir í sama sambandi samskipa møguliga nýggja nýtslu av bygningunum í tilgongdini at broyta ognarviðurskiftini annars. Hædd eigur eisini at takast fyri, at stórvegis íløgur eru ikki gjørdar í bygningsstandin síðstu árini, og at nýggj nýtsla kann hava við sær fíggjartørv til bygningsábøtur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a) at umsitingin heldur á við fyrireikingunum viðv. framtíðar brúki av bygninginum á Frúutrøð 1 til Býarsavn

b) at heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at virksemi hjá Tórshavnar býarsavni ísv. framsýningina 'Havnin undir krígnum' kann vera staðsett á Frúutrøð 1 frá á várið 2020 til á heystið 2020.

c) at eindarleiðararnir á dagstovnaøkinum fyri fyrst hava skrivstovur í læknaviðtalunum í Frúutrøð, og at tað verður nærri kannað, um og hvussu smábarnavirksemið hjá Gigni kann skipast har, tá onnur loysn er funnin til eindarleiðararnar

d) at samtykkja at fara undir samráðingar við setrið og landsstýrið um omanfyri nevndu viðurskifti.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, heldur fast í at Frúutrøð verður brúkt til dagstovn og at Gigni fær fremstu raðfesting í mun til læknaviðtaluhølini á Frúutrøð og at endalig og varandi loysn verður funnin til býarsavnið. Minnilutin tekur undir við punkt d).

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndr Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini, við tí ískoyti, at Býarsavnið fyribils verður staðsett á Frúutrøð.

## Ískoyti:

Samtyktirnar á fundinum 15. januar 2020 í mentamálanevndini og í fíggjarnevndini 22. januar 2020 eru undir útinning.

Av tí at samráðingar nú eru ávegis við landsstýrið um lon 4 á Frælsinum, verður mett hóskandi at endurskoða ætlanina viðv. møguligum frítíðarfelagsskapum í lon 4, ið annars var samtykt í mentamálanevndini 27. november 2020.

Viðv. skúlabygningunum á Argjavegi (gamli Argja skúli), so mælir Húsaumsitingin til at taka bygningin niður, tá avtalan við AA-felagsskapirnar gongur út í 2022. Sæð verður tí eisini burtur frá at lata fleiri felagsskapum høli har nú.

Vísandi til tilmæli í máli 19/01794 Høvuðsumvæling av dagstovninum á Argjum, matr. Nr. 4 bq, Argir og vísandi til samtykt í mentamálanevndini 28. oktober 2019 og í fíggjarnevndini 30. oktober 2019 viðv. Argja skúla, verður mett hóskandi at endurskoða ætlanirnar fyri fyrrv. Argja skúla (skúlabygningarnir á Argjavegi) og heldur at nýta bygningarnar har til annað endamál og sum ikki krevur stórvegis ábøtur í fyrstu atløgu. Sí eisini tilmæli í máli 18/04396 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum.

A. Viðv. Skansastovu
Viðv. MC-felagnum
Sbrt. samtykt í býráðnum 27. februar. – í máli 19/01209 Umsókn frá MC-felagnum um at leiga part av øki matr. 1112, Tórshavn (mál 19/01209) er teirra umsókn viðv. Skansastovu ikki viðkomandi longur.

<u>Bygningsfaklig meting viðv. Skansastovu</u>
Húsaumsitingin hevur yvirskipað mett um málið og metir at neyðugar umvælingar koma at kosta umleið 2. mio.kr. Hóast leiguavtalur verða gjørdar við felagsskapir um høli í Skansastovu nú, so má metast má,

at hesar umvælingar mugu verða byrjaðar ella gjørdar, áðrenn flutt verður inn í 2021, um játtan fæst til endamálið.

Meting um felagsskapir, ið kundu verið hýstir í Skansastovu
Um neyðugu umvælingarnar kunnu vera gjørdar, kundi verið farið í samráðingar við fylgjandi felagsskapir um virksemi í húsinum:
- á 2. hædd: Lions Club Tórshavn og Lions Club Liljan
- á 1. hædd: Havnar dartfelag
- á 0. hædd: Tøkum lætt sum høvuðsvirksemi, sett saman við ávísum dagvirksemi hjá Mentón/Føroya tónleikarafelag, sum tó skal tillaga virksemið til, at tað ikki órógvar annað virksemi í húsinum.
Umframt at dartfelagið og Lions feløgini kundu lænt hølini til serlig høvi.

B. Viðv. Finsen – evningsstovan
Meting um felagsskapir, ið kundu verið hýstir í Finsen
- Evningsstovan: Havnar telvingarfelag

Tilber at flyta virksemi inn í hølini uttan stórvegis tillagingar og kostna. Tilber at gera leigusáttmála, ið fær gildi á heysti 2020.

C. Argja skúli (nýggjari)
Meting um felagsskapir, ið kundu verið hýstir í nýggja skúlabygningunum
4-10 skúlatilboðið hjá Skúlanum á Fløtum (sí mál 18/04396 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum).
Harumframt Argja dart, Bridgehúsfelagið og Listgrafo. Hvørjar stovur, talan kann vera um, kann nágreinast, men støddirnar eru nøktandi. Atgongd til ves í felagsøkinum. Neyðugt verður at gera grundleggjandi hentleikar til gerð av kaffi v.m. Sí hjálagt tekningar og rúmyvirlit yvir bygningin.

Annars er ikki neyðugt við stórvegis tillagingum fyri at kunna hýsa hesum felagsskapum og vónandi ber til í ávísan mu at feløgini sjálvi standa fyri tí. Til ber at gera leigusáttmálar, ið fáa gildi á heysti 2020.
Samstundis sum møguligur leigusáttmáli verður gjørdur við Brigdehúsfelagið verður gjørd semja um uppathald av leigumálinum, har verandi brigdehúsið stendur.

D. Viðv. skúlabygninginum á Landsvegnum
Um avgjørt verður at flyta 4-10 tilboð út á Argir, letur tað upp fyri, at annað virksemi kann fara í bygningin á Landsvegnum. Her kundi t.d. verið talan um Gigni (sí mál 19/01965 Gigni : Framtíðar hølisviðurskifti í Tórshavnar kommunu). Hetta kevur tó eina neyvari bygningsfakliga meting. Møguliga kann hetta vera saman við Bridgehúsfelagnum og/ella onkur skrivstovutørvur hjá minni eind í kommununi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um:
a). at fara undir samráðingar við
i). Lions Clubb Tórshavn og Lions Club Liljan um leigusáttmála um 2. hædd.
ii). Havnar dartfelag um 1. hædd.
iii). Tøkum lætt um leigusáttmála um 0. hædd, men við treyt at Mentón/Føroya tónleikarafelag fær ávísan brúksrætt til dagvirksemi har, umframt at dartfelagið og Lions feløgini skulu kunna læna hølini til serlig høvi.
b). at fara undir samráðingar við Havnar telvingarfelag um leigusáttmála um evningsstovuna í Finsen.
c). at fara undir samráðingar við Argja dart um leigusáttmála um ávíst høli í nýggja skúlabygninginum á Argjum.
d). at fara undir samráðingar við Brigdehúsfelagið um leigusáttmála um ávís høli í nýggja skúlabygninginum á Argjum, ið eisini inniber eina semju um uppathald av leigusáttmálanum um lendi í Gundadali har verandi brigdehús stendur
e). at fara undir samráðingar við Listgrafo um leigusáttmála um ávís høli í nýggja skúlabygninginum á

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Nevndin samtykti at taka undir við A1) og A3), B og E í tilmælinum.

Viðvíkjandi A2), C og D verður at taka upp á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020**: Ein samd nevnd tekur undir við mentamálanevndini við teirri broyting viðvíkjandi punkt A3, at leiguavtalur skulu gerast við Tøkum lætt, Lions Club Tórshavn og Lions Club Liljan viðvíkjandi felagshølum í Skansastovu uttan treyt um brúksrætt til tónleikafelagsskapir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur harumframt undir við pkt. c í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.
**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.
**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.
**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag

- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.
**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.
**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.
**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020 og umrøðuni í mentamálanevndini 10. juni 2020, hevur umsitingin verið í samráðingum við fylgjandi feløg:

Viðv. Tøkum lætt
Skotið verður upp at gera 5 ára leigusáttmála við Tøkum lætt um veghæddina í Skansastovu. Mánaðarliga gjaldið er 1200 kr., umframt ljós og hita mett til umleið 1000 kr./mánaðin.

Viðv. møguligum samvirknaði og brúksmøguleika til Mentón/Føroya tónleikarafelag er tað ikki tikið við sbrt. samtyktini í fíggjarnevndini.

Sum greitt frá í málinum 10. Juni 2020, so er neyðugt at raðfesta høvuðsumvæling av bygninginum í 2021 ella eftir tað. Hetta nýtist ikki hindrað, at Tøkum lætt heldur á við sínum virksemi fyribils. Um felagið fær leigusáttmála fer brúksavtalan hjá felagnum frá 2016 samstundis úr gildi.

Sí hjálagt uppskot til leigusáttmála.

Tilmæli er ávegis.

Viðv. Havnar telvingafelag
Tilmæli er ávegis.

Viðv. Listgrafo
Tilgongdin viðv. leigusáttmála við Listgrafo á Argja skúla er ikki liðug enn. Felagið ynskir sær evningsstovuna í Finsen sum við hesum tilmæli verður skotið upp at lata til Havnar telvingarfelag.

4-10 tilboðið
4.10 heldur til í Gula skúla við Landavegin (Skúlin á Fløtum – Eindin við Landavegin). Nú Skúlin á Fløtum flytur úr skúlabygninginum á Argjum, verður mælt til, at 4-10 tilboðið flytur í nýggjara partin av Argja skúla. Hetta gevur tilboðnum betri hølisumstøður og møguleika fyri, at næmingatalið í tilboðnum kann verða hægri. Hetta skúlaárið eru 29 næmingar í tilboðnum, og mett verður, at um tilboðið flytur úr bygningin á Argjum, kann næmingatalið so líðandi hækkað til uml. 50 næmingar.

Tað ber væl til at sameina skúlavirksemið við, at frítíðarfelagsskapir kunnu fáa høli í bygninginum eisini, og at frítíðarvirksemi kann vera har eftir skúlatíð.

Skúlin á Fløtum fer framhaldandi at umsita svimjihylin. Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum hava undirvísing í svimjihylinum, haraftrat hevur Skúlin á Trøðni tímar, og Havnar Svimjifelag hevur tíðir til venjing har.

Víst verður til, at tað hevur verið umrøtt at tillaga nýggjara partin av Argja skúla til dagstovn, soleiðis at Dagstovnurin á Argjum kann flyta hagar, meðan dagstovnurin verður umvældur. Henda ætlan ber ikki til, um 4-10 flytur í Argja skúla.

**Tilmæli:**
A.
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at gera 4,5 ára leigusáttmála við:

a). Tøkum lætt

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

B.
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at 4-10 tilboðið flytur í part av nýggjara Argja skúla, tá flutt verður í nýggja bygningin á Fløtum.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við a) og beina málið í fíggjarnevndina. Eisini samtykt at taka undir við b) og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at gera 4,5 ára leigusáttmála við Havnar Telvingarfelag viðvíkjandi hølum í Finsen. Mánaðarliga gjaldið íroknað el&hita er 2.500 kr.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við tilmælinum um at gera sáttmála við Havnar Telvingarfelag og harumframt samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og viðvíkjandi pkt. b at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

## 159/20 Framflytingar fyri roknskaparárið 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 136/20 | 20/01383-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 108/20 | 20/01383-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 159/20 | 20/01383-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 197/20 | 20/01383-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært Játtanarreglunum hjá Tórshavnar Kommunu verður meir- og minninýtsla framflutt til komandi árið. Hesar framflytingar skulu játtast í Býráðnum sum eykajáttan.

Í sambandi við, at ársroknskapurin fyri 2019 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2020.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn, er fyri rakstur 37,0 mió.kr. netto og fyri íløgur 143,1 mió.kr. og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 21,6 mió.kr. | 97,5 mió.kr. |
| TH | 15,4 mió.kr. | 45,6 mió.kr. |

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjal nr. 20/01383-4

Framflytingin á **§1 Kommunal fyrisiting** er íalt 2,3 mió.kr. Mælt verður til at flyta 550 tkr. av hesari upphædd til Barnatannrøktina konto 2310 á §2. Eisini verður mælt til, at flyta 52 tkr. til 1315 Nevndir og ráð orsakað av at val verður til eldraráðið heysti 2020.

Á **§2 Almanna- og heilsumál** er ein samlað minninýtsla á 7,4 mió.kr., sum verður framflutt. Heilsu- og umsorganartænastan mælir til at flyta 3,1 mió millum kontur á teirra øki. Á Trivnaðarøkinum verða 100 tkr. fluttar millum kontur.

**§3 Børn og ung** hevur eina samlaða meirnýtslu á 8,2 mió.kr. í 2019. Mælt verður til at nullstilla framflytingina fyri allar kontur, undantikið konto 3213 Systkinaavsláttur, ið hevur eina meirnýtslu á 3,1 mió.kr. Munurin upp á 5,1 mió.kr. verður fíggjaður við 2,3 mió.kr. í meirinntøkum fyri 2019 og 2,8 mió.kr. á konto 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing í 2020. Eisini verður mælt til, at dagstovnar, sum hava minninýtslu í 2019, fáa 50% av minninýtsluni framflutta. Talan er um 1,3 mió.kr., sum verður fíggjað av konto 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing í 2020.

Framflytingin á **§4 Undirvísing** er 328 tkr. 100 tkr. av hesum verða fluttar á 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur, sum hevur meirnýtslu í 2019. Kommunurnar gjalda 20% av rakstrarstuðli til lærlingaundirvísing.

**§5 Mentan og frítíð** hevur eina minninýtslu á 837 tkr., sum verður framflutt. Av hesum verða 250 tkr. fluttar til §6 L62038 Standmynd/minnismerki um Andreu Árting.

Samlaða framflytingin á **§6 Teknisk mál** er 2,7 mió.kr. Nakrar kontur á §6 hava meirnýtslu og verður mælt til at flyta 7 mió.kr. av ymiskum rakstrarkontum til tær deildirnar, sum hava meirnýtslu. Millum annað 3,9 mió.kr. til 6110 Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað og 3,5 mió.kr. til 8110-8114

**§7 Kommunal virki** hevur eitt avlop á 14,7 mió.kr. í 2019. Av hesari upphæddini eigur 7110 Renovatión 6,8 mió.kr. Mælt verður til at flyta 2 mió.kr. av §7 til §6 og at flyta íalt 500 tkr. til 7210 Brandstøðina og 7210 Bussleiðina.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til, at játta framflyting á 37,0 mió.kr. netto til rakstur og 143,1 mió.kr. til íløgur. Eisini verður mælt til, at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 20/01383-4.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Samtykt at broyta framflytingar á § 3 Børn og ung soleiðis, at dagstovnar, sum hava minninýtslu í 2019, fáa alla minninýtsluna framflutta.

Talan er um kr. 1,331 mió. kr., ið verður figgjað soleiðis:

konta 5730 stuðul til íløgur kr. 428.500
konta 2450 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál kr. 202.500
løgukonta 5775 Ítróttaranlegg Hoyvíksvøllur kr. 200.000
konta 7312 vinnutiltøk kr. 500.000.

Málið beint í býráðið til aðru viðgerð við hesi broyting í mun til samtyktina við fyrru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Turið Horn boðaði frá, at hon metti seg ógegniga at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar og í hennara stað luttók Sigrun Wardum.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 726<br><br>Formansins merki: |

# 160/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 138/20 | 20/00203-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 110/20 | 20/00203-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 181/20 | 20/00203-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 160/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. juni 2020 | Blað nr.: 727 | |
| | Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |
| | Sigrun Wardum | |